LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2009

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært §12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum vm.”

OKTOBER 2010

Innihaldsyvirlit

0 INNGANGUR 7

1 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 9

1.1 ENDAMÁLIÐ VIÐ GRANNSKOÐANINI 9
1.2 AÐALRÁÐ OG STOVNAR HAVA ÁBYRGD AV ROKNSKAPINUM 9
1.3 STÝRINGARMEGINREGLUR UM MÁL OG NÁDD ÚRSLIT 10
1.4 HÓSKANDI TÍÐARSKRÁSETINGAR 11
1.5 JOURNALISERING 12
1.6 REGLUR UM KUNNINGARTRYGD 12
1.7 VANDI FYRI MISTØKUM OG SVIKI 13

2 LØGMANSFYRISITINGIN 15

2.1 SAMSKIFTISÚTREIÐSLUR HJÁ LANDSSTÝRINUM (LG 2009/202-0123) 15

3 FÍGGJARMÁL 17

3.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI OA. 17
3.1.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2009/100-0001) 17
3.1.2 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR OT. (LG 2009/203-0181) 18
3.1.3 UM ÁVÍSAR ÚTREIÐSLUR (LG 2009/203-0999) 18
3.1.4 GRANNSKOÐAN AV LØNUM (LG 2009/511-0011) 19
3.2 FÍGGJARSTØÐAN 2009 20
3.2.1 FÍGGJARSTØÐAN IKKI FULLFÍGGJAÐ 20
3.2.2 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI OA. 20
3.2.3 HØVUÐSTØL 20
3.2.4 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (LG 2009/300-0102) 20
3.2.5 ÁOGN (LG 2009/301-0103) 25
3.2.6 GOYMSLUR 26
3.2.7 OGNIR OG ÚTBÚNAÐUR (LG 2009/300-0101) 26
3.2.8 TØKUR PENINGUR (LG 2009/300-0104) 27
3.2.9 SKULD (LG 2009/300-0201/0202) 28
3.3 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM OØ. 31
3.4 MÁL- OG AVRIKSSÁTTMÁLIN HJÁ TAKS (LG 2009/220-0000) 32
3.4.1 YVIRSKIPAÐ UM SÁTTMÁLAN SAMBÆRT FÍGGJARMÁLARÁÐNUM OG TAKS 32
3.4.2 EFTIRLIT 33
3.4.3 SAMANDRÁTTUR OG NIÐURSTØÐUR 34
3.5 AVGJALD AV KAPITALEFTIRLØNUM (LG 2009/220-0522) 35
3.6 KAPITALVINNINGSSKATTUR (LG 2009/220-0521) 36
3.7 MVG-EFTIRSTØÐUR (LG 2009/220-0522) 37
3.8 VANLIGUR LANDSSKATTUR (LG 2009/220-0521) 38
3.9 FELAGSSKATTUR (LG 2009/220-0521) 38
3.9.1 LÓGARGRUNDARLAG 38
3.9.2 ROKNSKAPARTØL 38
3.9.3 MANNAGONGDIR OG SKRÁSETINGAR 39
3.9.4 SKRIVLIGAR MANNAGONGDIR 40

3.9.5 STAKROYNDIR 40
3.9.6 NIÐURSTØÐA 40
3.10 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR AV LÁNUM (LG 2009/203-0224) 41
3.11 KERVISSKOÐAN (LG 2009/220-0521) 42

4 FISKIVINNUMÁL 45

4.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2009/205-0111) 45
4.2 TILBÚGVINGARSTOVNURIN (LG 2009/205-311) 46
4.2.1 BRUNAUMSJÓN LANDSINS 46
4.2.2 MRCC TÓRSHAVN (SJÓBJARGINGARSTØÐIN) 47
4.3 BÚNAÐARSTOVAN (LG 2009/205-0332) 50
4.4 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2009/205-0342) 56
4.5 HAVSTOVAN (LG 2009/205-0343) 56
4.6 TRYGDARMIÐSTØÐIN (LG 2009/205-0351) 58

5 VINNUMÁL 61

5.1 VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2009/206-0111) 61
5.2 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2009/206-0373) 64

6 MENTAMÁL 69

6.1 YRKISDEPILIN (LG 2009/207-0111) 69
6.2 FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR (LG 2009/207-0231) 70
6.3 LANDSMIÐSTØÐIN FYRI UNDIRVÍSINGARAMBOÐ (LG 2009/207-0231) 71
6.4 STUDNI (LG 2009/207-0231) 72
6.5 YRKISSKÚLAR (LG 2009/207-0233) 73
6.6 FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ (LG 2009/207-0233) 73
6.7 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (LG 2009/207-0233) 74
6.8 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (LG 2009/207-0235) 75
6.9 HÚSARHALDSSKÚLI FØROYA (LG 2009/208-0235) 76
6.10 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2009/207-0236) 77
6.11 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (LG 2009/207-0236) 78
6.12 SAMSKIPAN AV VIRKSEMINUM HJÁ SJÓMANSSKÚLUNUM (LG 2009/207-0236) 79
6.13 HAVLÍVFRØÐILIGA ROYNDARSTØÐIN (LG 2009/207-0236) 80
6.14 LISTASAVN FØROYA (LG 2009/207-0243) 82
6.15 FØROYA LANDSBÓKASAVN (LG 2009/207-0243) 83
6.16 VITAVARÐARHÚSINI Í AKRABYRGI (LG 2009/207-0232) 83

7 HEILSUMÁL 85

7.1 SJÚKRAKASSAR (LG 2009/211-0202) 85
7.1.1 GRANNSKOÐAN AV STUÐLI TIL SJÚKRAKASSAR 85
7.1.2 SAMSKIFTI VIÐ ALMANNASTOVUNA 88
7.1.3 HEILSUTRYGD (LG 2009/211-0202) 89
7.2 ÍLEGUSAVNIÐ (LG 2009/211-0202) 90

8 ALMANNAMÁL 93

8.1 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (LG 2009/212-0211) 93
8.2 BARNAVERND (LG 2009/212-0213) 95
8.3 MEGINSKRIVSTOVAN FYRI NÆRVERKIÐ (LG 2009/212-0216) 100
8.4 FØROYINGAR Á STOVNI Í DANMARK (LG 2009/212-0216) 101
8.5 FORSORGARÚTREIÐSLUR (LG 2009/212-0217) 102
8.5.1 HJÁLP SAMBÆRT §§ 9 OG 13 Í FORSORGARLÓGINI 102
8.5.2 STUÐUL TIL MISTA ARBEIÐSINNTØKU SMB. § 17 Í FORSORGARLÓGINI 103
8.5.3 STUÐUL TIL ÚTREIÐSLUR TIL ÁVÍSAR VIÐGERÐIR SMB. § 17 Í FORSORGARLÓGINI 109
8.5.4 KONTERING AV FORSORGARVEITINGUM 112
8.5.5 REGLUR UM ENDURBÚGVING OA. 113
8.6 VANTANDI DAGFØRING AV FORSORGARLÓGINI (LG 2009/212-0217) 114

9 UTTANRÍKISMÁL 117

9.1 UTTANRÍKISRÁÐIÐ (LG 2009/216-0111) 117
9.1.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI 117
9.1.2 LØN TIL DEILDARSTJÓRAR OG SENDIMENN 120
9.1.3 NEVNDARSAMSÝNINGAR 121

0 INNGANGUR

Sambært § 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini og § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald vm.” skal Landsstýrið, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin. Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins ot.”

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum vm.”

Sambært § 12 í lógini um grannskoðan skal roknskapargrannskoðanin innan 10 mánaðir eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína, í sambandi við at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2009 fyri Løgtingið til samtyktar.

Fremst í frágreiðingini er eitt brot, sum er av almennum slag. Síðani verður, fyri hvørt málsøki sær, tikið samanum úrslitið av grannskoðanini. Frágreiðingin er løgd fyri avvarðandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við. Í frágreiðingini er eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti eru komin í rættlag, sum vórðu umrødd í seinastu ársfrágreiðing, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum 26. oktober 2009.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2009 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2009 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Umframt ársfrágreiðingina hevur Landsgrannskoðanin í 2010 latið løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um Frávik millum játtan og nýtslu oa. (juni 2010).

Argir, 28. oktober 2010

Beinta Dam
Landsgrannskoðari

1 Almennar viðmerkingar

1.1 Endamálið við grannskoðanini

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* ongin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

1.2 Aðalráð og stovnar hava ábyrgd av roknskapinum

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn juni mánaði er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir tey, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini[1] verða roknskaparupplýsingar samsvarandi *góðkendum* ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Føroya Gjaldstova setur upp.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2009 varð latin Løgtinginum 19. mai 2010.

Góðkenning av roknskapum

Landsgrannskoðanin hevur áður í frágreiðingum víst á, at grundarlagið fyri endaliga landsroknskapinum er, at reglurnar um at góðkenna roknskapirnar verða hildnar.

Sum greitt frá í frágreiðing í juni 2010 til løgtingsgrannskoðararnar, um frávik millum játtan og nýtslu 2009, manglaðu fleiri roknskapir (stovnsnummur) at verða góðkendir, tá ið landsroknskapurin varð latin aftur og prentaður.

Ábyrgd hjá aðalráðum

Sambært § 4 í roknskaparkunngerðini skulu aðalráðini hava eftirlit við, at reglurnar um roknskaparverkið verða hildnar. Fylgja roknskaparhaldini ikki tí, sum er fyrisett, eiga aðalráðini at taka stig til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Ábyrgd hjá stovnsleiðarum

Leiðslan á einum stovni skal leggja til rættis roknskaparførslu oa. og skal tryggja, at roknskapurin er álítandi. Stovnsleiðarin skal eisini tryggja, at tey, sum arbeiða á roknskaparøkinum, hava nøktandi fakligan førleika at røkja uppgávuna.

[1] K. nr. 22/2007 frá 14. mars 2007 “um roknskaparverk landsins ot.”

1.3 Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 umrøddi Landsgrannskoðanin, at bert fáir stovnar hava sett í verk reglur um mál og nádd úrslit, sum ásett í § 7 í roknskaparkunngerðini.

Reglur í roknskaparkunngerðini

Sambært § 7 í roknskaparkunngerðini skulu aðalráðini og stovnar teirra í seinasta lagi 1. januar 2010 hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit ot.:

- Aðalráðini skulu árliga seta yvirskipað mál fyri sínar stovnar.
- Stovnarnir skulu:
  1. seta mál og krøv til avrik í tøka tilfeinginum og í yvirskipaðum málum, sum aðalráðið hevur sett,
  2. tryggja, at sett mál og krøv til avrik verða rokkin, og
  3. undir hesum tryggja, at útvegaðar verða neyðugar upplýsingar at stýra eftir, so at frávik millum ætlanir og úrslit verða fyribyrgd, gjørd sjónlig og kunnu verða rættað í neyðugan mun.
- Fyri at lýsa virksemið á stovnunum, ma. at stuðla undir stýringarmeginreglurnar, verða skrásettar hóskandi nøgdarupplýsingar, sum fevna um tað, stovnarnir avrika, og um tilfeingisnýtslu (td. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum).
- Stovnar skulu eftir tørvi gera innanvirkis roknskap við upplýsingum um, hvussu útreiðslur, inntøkur og kostnaðir eru liðaðir út á endamál, stað, framleiðslu, virksemi ot.

Innanvirkis roknskapurin skal geva grundarlag fyri at lýsa, hvat virksemið og ymisku veitingarnar kosta hvør sær ella væntandi koma at kosta, og eisini hvørji viðurskifti eru avgerandi fyri, hvussu tilfeingið verður nýtt.

Í § 7, stk. 4, er ásett, at Fíggjarmálaráðið ger av, í samráð við aðalráðini og aðrar javnsettar myndugleikar, hvørjir stovnar skulu seta í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit.

Sambært stk. 5 skal Fíggjarmálaráðið áseta neyvari reglur um, hvussu stýringarmeginreglurnar verða settar í verk.

Reglur í lóg um landsins játtanarskipan

Sambært § 11 í Ll. nr. 42/2009 “um landsins játtanarskipan” *“skulu viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið hava tilvísingar til lógarásetingar, sum gera av, hvussu játtanin verður nýtt, lýsing av teimum úrslitum, miðað verður eftir við játtanini, og upplýsingar um nádd úrslit ot.”*

Sambært álitinum um “játtanarskipan landsins”, sum er grundarlagið undir løgtingslógini, má tað standa til landsstýrismannin í fíggjarmálum at gera av, hvussu tað skal koma fram í fíggjarlógini.

Í álitinum er ásett, at tá ið tað ber til, skulu virksemisyvirlitini í viðmerkingunum til fíggjarlógina, hava upplýsingar um:

- tørv,
- tørvsfulnað, og
- effektivitet.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2011 eru bert í seks játtanum lýsingar av teimum úrslitum, miðað verður ímóti við játtanini, ella upplýsingar um nádd úrslit ot.:

- fýra stovnar hava upplýsingar um mál og avrik, og
- tveir stovnar hava í virksemisyvirlitinum greitt frá tørvi og tørvsfulnaði viðvíkjandi uppgávum stovnsins.

Hetta kundi bent á at aðalráð og stovnar ikki taka ásetingarnar í roknskaparkunngerðini í álvara, hóast tey hava havt nærum 3 ár at seta í verk reglur, sum ásett í § 7 í roknskaparkunngerðini.

1.4 Hóskandi tíðarskrásetingar

Í § 5, stk. 2, í "gomlu" roknskaparkunngerðini (K. nr. 114/1996), sum kom í gildi 1. januar 1997, var ásett, at stovnar skuldu skráseta lønir og starvsfólkanýtslu til tess at veita upplýsingar til Fíggjar- og búskapardeildina um nýtslu av starvsfólkum, lønargongdini oø. Sambært kunngerðini skuldi Føroya Gjaldstova seta neyvari reglur fyri hesari skráseting.

Sambært § 5, stk. 3, í K. nr. 22/2007, sum kom í staðin fyri K. nr. 114/1996, skal stovnsleiðarin skipa fyri, at hóskandi tíðarskráseting er á stovninum, so lønarútgjaldingarnar eru rættar.

Løn er vanliga nógv tann størsta útreiðslan hjá landsstovnunum. Í sambandi við eftirlit á stovnunum kannar Landsgrannskoðanin við stakroyndum, um lønirnar eru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokkingum, stigum oø. Hesar stakroyndir benda á, at lønarsatsirnir, útrokningarnar oa. eru rættar.

Nakrir stovnar hava skipanir at skráseta arbeiðstíð, flex, feriu, sjúku oa. Hinvegin hava bert fáir landsstovnar tíðarskráseting, har tað eisini sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Í hesum sambandi kann verða víst á, at § 7, stk. 6, í roknskaparkunngerðini ásetir, at

> *"Fyri at lýsa virksemið á stovninum, ma. at stuðla undir stýringarmeginreglurnar sbrt. stk. 1, skulu verða skrásettar hóskandi nøgdarupplýsingar, sum fevna um tað, stovnurin avrikar, og um tilfeingisnýtslu (td. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum) ot."*

Tíðarskrásetingin hevur soleiðis tvey endamál. Í fyrsta lagi at skráseta hóskandi nøgdarupplýsingar um tilfeingisnýtslu, so til ber hjá leiðsluni at síggja, hvat stovnurin hevur avrikað í mun til tað tilfeingi, sum er brúkt. Tíðarskrásetingin verður tá grundarlagið undir viðgerðini av, í hvønn mun málini, sum stovnurin setir sær, eru nádd.

Í øðrum lagi, er tíðarskrásetingin neyðug fyri at tryggja, at lønarútgjaldingarnar byggja á eitt grundarlag, sum ger, at tær eru rættar. Eru lønargjaldingarnar rættar, so er tann posturin á landsroknskapinum eisini rættur.

Vert er at leggja dent á, at tað týdningarmesta er, at upplýsingarnar verða skrásettar. Tað hevur minni at siga, hvørt upplýsingarnar verða skrásettar á pappíri, í klokkuskipan ella talgildar í einari skipan.

1.5 Journalisering

§ 7 í Ll. nr. 49/1992 “um Føroya Landsskjalasavn” ásetir, at almennir stovnar, undir eftirliti av Landsskjalasavninum, hava ábyrgdina av, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt.

Í sambandi við grannskoðan okkara á ymiskum stovnum hava vit spurt, um stovnarnir hava journalskipan, og um teir hava skrivligar reglur og mannagongdir um journalisering. Flestu stovnarnir hava journalskipan, annaðhvørt elektroniska ella manuella, men fáir hava skrivligar mannagongdir um journalisering.

Vit hava eisini áður víst á, at nakrir stovnar hava ikki nøktandi journalskipan, og fleiri hava ikki ásett minstukrøv til málsviðgerð, herímillum hvørji skjøl, upprit oa. skulu verða til skjals í einum máli, eisini fyri at tryggja, at málsviðgerðin lýkur krøvini um vegleiðing, partshoyring, skyldu at skriva upp oa. í løgtingslógunum nr. 132/1993 “um fyrisitingarlóg” og nr. 133/1993 “um innlit í fyrisitingina”.

Vert er at leggja dent á, at tað týdningarmesta er, at postur, skjøl oa. verða skrásett. Um tey verða skrásett á pappíri ella talgilt í einari skipan hevur minni at siga.

1.6 Reglur um kunningartrygd

1. februar 2005 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin, fyri 1. februar 2006, byggir á ISO 17799 standardin, at arbeiðið við KT-trygd skal verða skipað sambært BS 7799-2 standardinum, og at teir partar av ISO 17799 trygdarstandardinum, sum stovnarnir sambært ítøkiligari váðameting skulu lúka, eru settir í verk.

Rundskrivið varð sett úr gildi 1. juli 2007, tá ið dagført rundskriv, um at seta í verk KT-trygd, kom í gildi. Tíðarfreistin varð longd frá 1. februar 2006 til 1. apríl 2010.

Stovnsleiðslurnar hava ábyrgdina av, at KT-trygdin, fyri 1. apríl 2010, byggir á ISE/ISO 17799 og ISE/ISO 27001 standardin. Rundskrivið mælir til at nýta DS 484 til at seta í verk ISO 17799 standardin.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í november 2007 “um stjórnan av KT og KT-trygd” greiddi Landsgrannskoðanin frá støðuni, sum hon var tá.

Í sambandi við eftirlit á stovnum seinasta árið, hevur Landsgrannskoðanin ma. spurt um stovnarnir hava gjørt váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu, og um leiðslurnar hava orðað trygdarpolitikk. Sum tað framgongur aðrastaðni í frágreiðingini, eru ikki nógvir stovnar, sum hava orðað KT-politikk ella KT-trygdarpolitikk, ella hava gjørt nakra váðameting.

Verkseting av KT-trygd, eftir teimum standardum sum rundskrivið ásetur, krevur í fyrsta lagi, at stovnurin ger váðameting.

Eftirsum eftirlitini hjá Landsgrannskoðanini á stovnum vísir, at bert fáir stovnar hava gjørt váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu, er niðurstøðan, at reglurnar um kunningartrygd verða ikki hildnar.

1.7 Vandi fyri mistøkum og sviki

Ábyrgdin av roknskapinum ber eisini í sær, at aðalráðini og stovnarnir støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Í sambandi við eftirlitini seinastu árini hava vit spurt leiðslurnar, um tær hava mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki.

Samanumtikið kann sigast, at leiðslurnar hava ikki hugsað um vandan fyri feilum, og leiðslurnar hava heldur ikki sett nøkur tiltøk í verk at forða fyri sviki. Flestu stovnsleiðarar vísa á, at teir brúka Verkgongdarskipanina á Føroya Gjaldstovu, sum hevur innbygdan skilnað millum tey, sum skráseta og tey, sum leysgeva. Teir halda tí ikki vandar vera fyri stórvegis skeivleikum í roknskapinum. Flestu stovnsleiðarar siga seg ikki hava kunnleika um, at svik verður framt, illgruna um svik, ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

2 Løgmansfyrisitingin

2.1 Samskiftisútreiðslur hjá landsstýrinum (LG 2009/202-0123)

Síðani 2000 hevur Landsgrannskoðanin víst á vantandi lógarheimild at endurrinda samskiftisútreiðslur hjá løgmanni og landsstýrismonnum. Málið er framvegis ikki loyst.

Í fleiri uppskotum til samtyktar síðani 2001 hevur Løgtingið mælt løgmanni til at greiða spurningin um lógarheimildina.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008, sum varð samtykt av Løgtinginum 27. mai 2010, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð, at málið framvegis ikki er loyst.

Lógargrundarlag

Ongar ásetingar um kostnaðarendurgjald fyri samskiftisútreiðslur eru í Ll. nr. 10/1993 vsb. “um samsýning og eftirløn landsstýrismanna vm.”.

Ein nevnd, sett sambært Ll. nr. 77/2003 “um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna vm.”, mælti í áliti sínum í juni 2005 ma. til at útvega lógarheimild at veita løgmanni og landsstýrismonnum fría fartelefon, teldu- og alnetssamband til arbeiðsbrúks.

Sambært § 3 í somu lóg velur løgmaður nevndina fyrst í hvørjum valskeiði, og hon situr valskeiðið út. Í desember 2008 setti løgmaður aftur nevndina.

Eins og undanfarna nevnd mælir nýggja nevndin í áliti sínum frá juli 2009 til at útvega lógarheimild at veita løgmanni og landsstýrismonnum endurgjald fyri fartelefon, telduútgerð, breiðband osfr.

Borðfæ

1. oktober 2009 fekk løgmaður 84.564 kr. um árið í borðfæ (upprunaliga 60.000 kr. í 1993). Landsstýrismenn fingu 28.188 kr. um árið (upprunaliga 20.000 kr. í 1993). Borðfæ er skattafrítt, og verður javnað við somu vanligu viðbótum, sum tænastumenn fáa.

Onki eftirlit er við nýtsluni av borðfæi løgmans og landsstýrismanna, og heldur ikki finnast nøkur hagtøl, sum vísa, hvat hesin peningur verður nýttur til.

Nevndin, sum sambært Ll. nr. 77/2003 skal geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna vm., helt í juni 2005, at borðfæið átti at verið lækkað, ma. tí at ongi hagtøl eru fyri nýtsluna av hesum peningi, og tí at nevndin mælti til at hækka bæði samsýningar og kostnaðarendurgjøld til løgmann og landsstýrismenn.

Í juli 2009 mælti nevndin, sum varð sett í desember 2008, til at strika borðfæið, og at slíkar útreiðslur verða tiknar við í vanligu rakstrarjáttanini hjá aðalráðunum.

Harafturat varð mælt til, at útlegg hjá løgmanni og landsstýrismonnum skuldu verða endurgoldin móti nøktandi skjalprógvum, og at Landsstýrið gjørdi vegleiðingar um, hvørjar útreiðslur ein landsstýrismaður kundi hava í sínum embæti, við fyrimynd í tilsvarandi vegleiðingum hjá donsku stjórnini.

Frágreiðing frá løgmanni

Í oktober 2010 hevur løgmaður boðað frá, at ein arbeiðsbólkur, mannaður við embætisfólkum í Løgmansskrivstovuni, arbeiðir við málinum.

Nevndin, sum í juli 2009 lat løgmanni álit um “samsýning og eftirløn landsstýrismanna vm.”, er komin við einum uppskoti at loysa spurningin um samskiftisútreiðslur, borðfæ og samsýning landsstýrismanna. Talan er um eina heildarloysn, har øll viðurskiftini verða loyst undir einum, ein loysn, sum er munandi øðrvísi enn tann skipan, sum verður nýtt í dag.

Løgmaður vísir á, at slík loysn krevur nógva fyrireiking og eftirkannan, tí roknast má við, at arbeiðið er rímiliga rúgvismikið. Harumframt kann roknast við, at politiska viðgerðin tekur sína tíð. Hóast tað, er ætlanin at koma á mál við arbeiðinum í 2011.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Hóast lógin um samsýning og eftirløn landsstýrismanna er 17 ár gomul, og Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir í 10 ár hava víst á vantandi lógarheimild at endurrinda samskiftisútreiðslur hjá løgmanni og landsstýrismonnum, kann Landsgrannskoðanin staðfesta, at onki er hent.

Skiftandi løgmenn hava ár eftir ár víst til eina nevnd, sum skal geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna vm.

3 Fíggjarmál

3.1 Roknskaparviðurskifti oa.

3.1.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2009/100-0001)

Seinastu nógvu árini hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum.

Landsstýrismaðurin sigur orsøkina vera eina ógvusliga mótstøðu frá grunnum og stovnum at koma við í fíggjarlóg og í landsroknskap. Ein avleiðing er, at ikki hevur borið til at fingið politiska semju um spurningin.

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava aftur og aftur víst á fleiri grundleggjandi ivaspurningar, tá ið ræður um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti:

- um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum,
- um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum,
- um allir skattir/øll gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini,
- um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini,
- um roknskapirnir hjá øllum stovnum og grunnum verða grannskoðaðir og lagdir fyri Løgtingið sambært galdandi lóggávu.

Í mars 2006 legði Formansskapur Løgtingsins fram uppskot fyri Løgtingið "um landsins játtanarskipan", ið skuldi loysa fleiri ivamál viðvíkjandi stýrisskipanarlógini og játtanarskipanini, og skuldi bøta um studningsumsitingina. Lógaruppskotið fall burtur.

Í serstakari frágreiðing "um ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap", latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007, vísti Landsgrannskoðanin á, at stórar upphæddir liggja uttan fyri fíggjarlóg og landsroknskap.

Í mars 2009 legði Formansskapur Løgtingsins aftur fram stórt sæð sama uppskot "um landsins játtanarskipan". Uppskotið varð samtykt í apríl 2009.

Í álitinum til lógaruppskotið vísti Fíggjarnevndin ma. á:

> *"Tær størstu broytingarnar við nýggju játtanarskipanini eru, at nú skal støða takast til, hvørjir stovnar og grunnar skulu í fíggjarlógina.*
>
> *Tað ber tó til at áseta í lógini hjá hesum stovnum og grunnum, um hesir ikki skulu við í fíggjarlógina. Fyri at landsstýrið skal kunna fáa tíð at viðgera og fyrireika lóggávuna hjá hesum stovnum og grunnum heldur nevndin, at gildiskoman fyri hesa áseting verður 1. januar 2010."*

Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot, ið varð samtykt.

Í august 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið hevði tikið støðu í málinum, so grunnar oo., sum stríð hevði staðist um, fóru at verða tikin við í landsroknskapin. Sambært § 2, stk. 2, í Ll. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald

vm.” kann Landsstýrið gera av, at lógarinnar reglur um roknskaparhald og reglur, sum eru gjørdar sambært lógini, skulu galda fyri stovnar, feløg, grunnar oa.:

1. hvørs útreiðslur ella roknskaparliga hall verður goldið við landsstudningi ella við gjøldum, avgjøldum ella aðrari inntøku sambært lóg, ella
2. sum fáa kapitalinnskot, studning, lán, veðhald ot. ella annan stuðul frá landinum ella frá einum stovni, sum kemur undir nr. 1, um so er, at kapitalinnskotið hevur munandi týdning fyri móttakaran.

Sambært landsstýrismanninum fór Fíggjarmálaráðið at krevja av almennum grunnum, at teir fylgdu roknskaparreglunum, og at teir hvønn mánað, frá 1. januar 2010, skuldu senda Fíggjarmálaráðnum frágreiðing um roknskapartøl.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at onki av týdningi er hent á hesum øki síðani seinastu frágreiðing frá Landsgrannskoðanini. Landsstýrismaðurin sigur orsøkina vera eina ógvusliga mótstøðu frá grunnum og stovnum at koma við í fíggjarlógina og í landsroknskapin. Ein avleiðing er, at ikki hevur borið til at fingið politiska semju um spurningin.

3.1.2 Tænastumannaeftirløn ot. (LG 2009/203-0181)

Landsstýrismaðurin væntar, at við árslok 2010 ber til at siga hvussu stór eftirlønarskyldan hjá landskassanum er.

Í frágreiðingum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin víst á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum hevur ikki verið nøktandi.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at komið er á mál at skráseta eftirlønaraldurin hjá teimum, sum fáa eftirløn.

Hjá teimum, sum eru í starvi, er ætlanin, at við árslok 2010 skal vera komið so væl áleiðis at skráseta eftirlønaraldur, at til ber við vissu at siga, hvussu stór eftirlønarskyldan hjá landskassanum er.

3.1.3 Um ávísar útreiðslur (LG 2009/203-0999)

Ferðing uttanlands

Hóast 8 ár eru liðin, síðani reglurnar um bonusstig vórðu orðaðar í rundskrivi, er onki ítøkiligt hent, og rundskrivið er óbroytt.

Rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum 1. januar 2003, um tænastuferðir uttanlands, § 6, stk. 5, ásetir, at *”bonusstig, avsláttur ol., ið verða vunnin á tænastuferðum hoyra til tænastustaðin, og mugu einans nýtast til tænastuferðir. Tænastustaðurin hevur skyldu at tryggja, at vunnin bonusstig, avsláttur ol. verður brúktur soleiðis, at samlaðu ferðaútreiðslurnar hjá stovninum til tænastuferðir minka”.*

Seinni hevur Fíggjarmálaráðið ásannað, at tað er nærum høpisleyst at umsita bonusskipanirnar, og at tað er torført at tryggja, at fríir ágóðar verða skattaðir. Fíggjarmálaráðið hevur umrøtt ávísar ætlanir. Onki ítøkiligt er hent, og rundskrivið er óbroytt.

Í september 2008 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í sambandi við, at arbeitt varð við at seta í verk reglur um alment innkeyp, fór Fíggjarmálaráðið at taka stig til, at tænastuferðir uttanlands vórðu keyptar á einum stað. Tað átti at tryggja, at allar avsláttarskipanir koma landinum til góðar.

Í september 2009 ásannaði landsstýrismaðurin, at enn hevði ikki eydnast teimum at savna keypið av tænastuferðum uttanlands á einum stað, men tað merkti ikki, at ætlanin var slept.

Fartelefon- og aðrar samskiftisútreiðslur

Flestu stovnsleiðarar og øll aðalráð hava latið starvsfólki fartelefon ókeypis at nýta sum arbeiðsamboð, og fartelefonin verður vanliga tikin við heim til hús.

Í rundskrivi nr. 1/2002 frá Løgmansskrivstovuni verður ma. ásett, at fartelefon, sum verður latin starvsfólki ókeypis at nýta sum arbeiðsamboð, skal sum meginregla einans verða nýtt til samskifti, sum hevur beinleiðis við arbeiðsuppgávur stovnsins at gera.

Í rundskrivi nr. 2/2001, frá Toll- og Skattstovu Føroya “um fartelefon” er ásett, at fartelefon, sum arbeiðsgevari letur starvsfólkum sínum at nýta ókeypis, meginregluliga er at rokna sum frí telefon, sambært reglunum um fríar ágóðar. Tekur løntakarin telefonina við til hús, talar alt fyri, at hon eisini verður nýtt privat.

Bert fáir stovnar hava skipaða mannagongd, sum tryggjar, at starvsfólk endurrinda møguliga privata nýtslu.

Fíggjarmálaráðið heldur, at sum meginregla eigur almennur arbeiðsgevari ikki at lata starvsfólki fartelefon ella aðra telefon at nýta ókeypis. Grundað á hesa meginreglu eiga tað ikki at vera nógvar fráboðanir til TAKS um fría telefon. Fíggjarmálaráðið heldur tað vera eina leiðsluuppgávu á hvørjum stovni ella ráði sær at tryggja, at misnýtsla ikki fer fram.

Í september 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at fundir hava verið millum Fíggjarmálaráðið, Lønardeildina og TAKS, men endalig støða var ikki tikin til, um galdandi rundskriv skuldu broytast. Miðað varð eftir at fáa henda spurning endaliga avklaraðan í 2009.

3.1.4 Grannskoðan av lønum (LG 2009/511-0011)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 gjørt eina tvørgangandi lønargrannskoðan fyri fíggjarárið 2009. Grannskoðanin fevnir um Felags Lønarskipanina hjá Føroya Gjaldstovu, herímillum eisini um lønarskrivstovur.

Serstøk frágreiðing um grannskoðanina fer at verða latin løgtingsgrannskoðarunum í november mánað.

3.2 Fíggjarstøðan 2009

3.2.1 Fíggjarstøðan ikki fullfíggjað

Fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarstøðuni. Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivasamt, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan eru hildnar.

3.2.2 Avstemman av fíggjarstøðuni oa.

Í sambandi við kanning av postum í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum 2009 hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

3.2.3 Høvuðstøl

Á talvuni niðanfyri er ein samandráttur úr fíggjarstøðunum við árslok 2007-2009.

mió.kr.

	2007	2008	2009
OGN			
Kapitalinnskot	886	544	478
Virðisbrøv	547	1.089	1.239
Útlán	334	649	642
Áogn oa.	662	491	491
Tøkur peningur	2.765	2.508	2.122
Ogn tilsamans	**5.194**	**5.281**	**4.972**
SKULD			
Skuld	3.379	3.590	3.903
Útjavningarkonta	1.815	1.691	1.069
Skuld tilsamans	**5.194**	**5.281**	**4.972**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum “vanligum” landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, td. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir “kapitalinnskot”, og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir “virðisbrøv”.

3.2.4 Fíggjarligur útbúnaður (LG 2009/300-0102)

Kapitalogn í landsfyritøkum

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	885.786	544.164	477.808

Í 2008 er kapitalognin hækkað við tí partinum av yvirskotinum í P/f Føroya Banka í 2008, 72,7 mió.kr., sum Fíggingargrunnurin eigur. Harumframt er apportinnskotið á 414,3 mió.kr. í Vága Floghavn flutt til P/f Vága Floghavn. Við ársenda 2008 er kapitalognin í landsfyritøkunum 544,2 mió.kr.

Í 2009 er kapitalognin lækkað 66,4 mió.kr. til 477,8 mió.kr., so hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri 2008. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút, og tað er ein broyting av innrokningarmannagongdunum í mun til undanfarin ár. Gjaldstovan hevur boðað frá, at av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið fíggjarár ikki er tøkur fyrr enn aftaná at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum. Sí talvu niðanfyri:

mió.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	
Kapitalogn við ársenda 2008	544,2
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum pr. 31.12.2008	-66,4
Kapitalogn við ársenda 2009	**477,8**

Til samanberingar kann nevnast, at eginognin í Fíggingargrunninum við árslok 2009 var 508,8 mió.kr.

Í sambandi við einskiljingina í 2007 seldi Fíggingargrunnurin 66,38% av sínum partabrøvum í P/f Føroya Banka (6.600.000 partabrøv av 9.942.280). Sostatt eigur Fíggingargrunnurin nú 33,42% av partabrøvunum í P/f Føroya Banka (BankNordik).

Í ársfrágreiðingini hjá Fíggingargrunninum fyri 2009 er ognarparturin í P/f Føroya Banka bókaður til 439,0 mió.kr., sum svarar til kursvirðið 31. desember 2009. Kursvirðið var 37,7 mió.kr. hægri enn við árslok 2008, tá kursvirðið var 401,7 mió.kr.

Ongin allýsing finst av hugtakinum “landsfyritøka”, og at júst hesin grunnur er eftir í landsroknskapinum, er helst ein søgulig tilvild. Í nógv ár hevur Løgtingið, í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin, mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar ol., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum sum td. “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Virðisbrøv

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	546.906	1.088.659	1.238.699

Broytingin frá 2007 til 2008 stavar ma. frá, at partapeningurin í P/f Vága Floghavn í 2008 varð hækkaður tilsamans 479,3 mió.kr., 414,3 mió.kr. tá ið Vága Floghavn á eykaaðalfundi 24. juli 2008 bleiv skotin inn í P/f Vága Floghavn, og 65 mió.kr. tá ið partapeningurin í P/f Vága Floghavn, á eykaaðalfundi í felagnum 15. desember 2008, varð hækkaður.

Eisini varð partapeningurin í P/f Norðoyatunlinum hækkaður 32,5 mió.kr., umframt at tað almenna í 2008 hækkaði sín part av partapeninginum í P/f Smyril Line 30 mió.kr.

Við ársenda 2007 stóðu 66 t.kr. sum ogn í Nordatlantisk Turistselskab Aps., hóast felagið varð tikið av og strikað úr ”Det Centrale Virksomhedsregister” í juni 2007. Upphæddin er avskrivað í 2008.

Broytingin frá 2008 til 2009 stavar frá, at partapeningurin í P/f Vága Floghavn varð hækkaður 100 mió.kr., at partapeningurin í Norðoyatunlinum varð hækkaður 42,5 mió.kr. og at partapeningurin í P/f Fiskaaling varð hækkaður 7,5 mió.kr.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

1.000 kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2007	2008	2009	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	160.000	192.500	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	9.835	9.835	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	Ja
P/f Vága Floghavn	500	479.818	579.818	Ja
P/f Atlantic Airways	85.090	85.090	85.090	Ja *)
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	4.200	4.200	Ja
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	2.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
Nordatlantisk Turistselskab Aps.	66	-	-	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
Partabrøv tilsamans	**546.906**	**1.088.659**	**1.238.699**	

*) Partabrøvini eru skrásett ”elektroniskt” og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapir-centralen.

Í november 2005 boðaði Vinnumálaráðið almenninginum frá, at Føroya Banki, vegna Vinnumálaráðið, skuldi selja partabrøvini, sum landskassin átti í P/f Tjaldur. Lægsti prísur, sum Vinnumálaráðið vildi hava fyri partabrøvini, var innara virðið. Navnauppháddin á partabrøvum landskassans í P/f Tjaldur er 140 t.kr. og innara virðið er 131 t.kr. Partabrøvini í P/f Tjaldur eru ikki seld enn. Partabrøvini vórðu ikki skrásett í landsroknskapinum frammanundan, men frá 2006 eru tey skrásett í landsroknskapinum.

Í sjey feløgum eigur landið allan partapeningin:

1.000 kr.

Roknskapartøl 2009	Brutto vinn-ingur/søla	Úrslit eftir skatt	Samlað ogn	Egin-peningur
P/f Vágatunnilin	18.732	403	230.393	163.794
P/f Norðoyatunnilin	17.185	2	350.475	229.534
P/f Føroya Tele (samtak)	230.042	-32.064	804.511	333.886
P/f Postverk Føroya	66.637	-8.016	172.789	37.790
P/f Fiskaaling	11.976	1.272	29.873	19.944
P/f Føroya Lívstrygging (samtak)	332.547*)	15.288	3.013.894	65.143
P/f Vága Floghavn	17.929	70	583.662	571.634
Tilsamans	**695.048**	**-23.045**	**5.185.597**	**1.421.725**

*)Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum var eitt hall á 23 mió.kr, og samlaði egin-peningurin var 1,4 mia.kr. Til samanberingar kann verða nevnt, at í 2008 var samlaða úrslitið hjá somu feløgum eitt hall á 43,6 mió.kr. og eginpeningurin var 1,3 mia.kr.

Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at ætlanir eru um at einskilja Føroya Lívstrygging. Vinnumálaráðið og Ognarfelagið Lív (felagið hjá tryggingartakarunum í Lívstryggingini) eru vorðin samd um, hvussu einskiljingin av Føroya Lívstrygging skal verða skipað. Einskiljingarnevndin hevur góðkent ætlanina, ið miðar ímóti, at Føroya Lívstrygging verður endaliga einskild í hesum árinum (2010). Farið verður nú undir endaligu fyri-reikingarnar, útbjóðing og sølu.

Virðismeting

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2009 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

Innara virðið/kursvirðið, sambært ársroknskapinum fyri 2009 hjá 11 feløgum, tilsamans um 1.561 mió.kr. samanborið við keypsvirðið:

1.000 kr.

2009	Keypsvirðið	Innara virðið/ kursvirðið *)
P/f Vágatunnilin	160.300	163.794
P/f Norðoyatunnilin	235.000	229.534
P/f Vága Floghavn	579.818	571.634
P/f Føroya Tele	77.948	333.886
P/f Postverk Føroya	43.000	37.790
P/f Fiskaaling	17.376	19.944
P/f Føroya Lívstrygging	500	65.143
P/f Atlantic Airways	85.090	97.776
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	5.776
P/f Elektron	2.347	9.642
P/f Smyril Line	32.760	25.885
Partabrøv, tilsamans	**1.238.339**	**1.560.804**

*) Á talvuni er innara virðið brúkt í øllum fyritøkunum uttan í P/f Atlantic Airways, sum er skrásett á keypsskála. Har er brúkt kursvirðið 31. desember 2009.

Sum víst á í yvirlitinum, er keypsvirðið í fleiri førum munandi lægri enn innara virðið/kursvirðið. Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar av almennum fyritøkum hava vit mælt til at endurskoða verandi roknskaparreglur, og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið/kursvirðið.

Fíggjarmálaráðið kunnaði í oktober 2005 um, at ráðið ætlaði at nýta innara virðið í landsroknskapinum 2005. Tað varð ikki gjørt og er heldur ikki gjørt í landsroknskapunum eftirsíðan.

Vinningsbýti hjá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

mió.kr.

	2007	2008	2009
Føroya Tele	31,0	7,0	5,0

Rentu- og avdráttarfrí útlán

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	175.483	187.680	185.390

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, lán til sjálvsognarstovnar og um studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997.

Rentu- og avdráttarfríu lánini eru lækkað 2,8 mió.kr. netto í 2009. Ongin tilgongd var í 2009.

Útlán

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Áogn landskassans	375.862	678.640	675.136
Sett av ímóti tapi	-217.301	-217.412	-218.575
Sambært roknskapinum	**158.561**	**461.228**	**456.561**

Talan er um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán umframt gjaldførislán, sum verða umsitin av Realkreditstovninum. Harumframt er talan um eitt gjaldførislán til Ríkisstjórn Íslands.

Sett er av ímóti tapi. Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum er sett til kr. 0. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Útlánini eru lækkað 5,4 mió.kr. netto í 2009. Talan er bert um smærri tilgongdir og vanligt afturgjald.

3.2.5 Áogn (LG 2009/301-0103)

Skatta-, toll- ot. skuldarar

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Áogn landskassans	405.522	292.061	321.070
Sett av	-101.890	-109.081	-115.383
Sambært roknskapinum	**303.632**	**182.980**	**205.687**

Broytingin frá 2008 til 2009 stavar í høvuðsheitum frá, at áognin av meirvirðisgjaldi er hækkað 10,2 mió.kr., og áognin av felagsskatti er hækkað 6,9 mió.kr. Aðrar broytingar eru ma. at áognin av vanligum landsskatti er hækkað 5,3 mió.kr., og áognin av tollavgjøldum er lækkað 5,2 mió.kr.

Tíðaravmarkan

Í fleiri ár hevur Gjaldstovan víst á trupulleikan, at skipanirnar hjá TAKS ikki kunnu handfara tíðaravmarkanir. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkurnar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu “a jour” TAKS er við bókingum.

Sambært TAKS er ongin trupulleiki longur. Td. verður rentuskattur, MVG og avsetingar í skatti bókaðar í tíðarskeiði 13 í Búskaparskipan landsins, umframt at ein koyring verður gjørd við árslok, sum bókar tollingar. Annars er TAKS altíð “a jour” við árslok.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	306.251	246.365	237.461

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Landsverki, Strandferðsluni, sjúkrahúsunum og øðrum stovnum. “Aðrir skuldarar” er ma. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað fyri at geva eina rætta mynd. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum oa.

Broytingin frá 2008 til 2009 er netto ein lækking á 8,9 mió.kr. Í høvuðsheitum stavar lækkingin frá, at ágóðin, viðvíkjandi inntøkufíggjaðum virksemi á Landsverki, er lækkaður 18,9 mió.kr., kapitalvinningsskatturin er lækkaður 13,3 mió.kr., ágóðin av yvirskoti í Tjóðbankanum er lækkaður 10,3 mió.kr. og ymiskar millumrokningar við landskassan eru lækkaðar 6,5 mió.kr. Hinvegin er ein flyting úr Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir oa. bókað sum ein ágóði á 30 mió.kr., og ymisk ávegis játtanarútgjøld til stovnar eru hækkað 10,5 mió.kr.

3.2.6 Goymslur

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	51.697	61.174	47.875

Talan er um vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum Landsins, Skúlabókagrunninum (Útgávuvirksemi) og Landssjúkrahúsinum.

3.2.7 Ognir og útbúnaður (LG 2009/300-0101)

Hóast meira enn 14 ár eru liðin, síðani kravið um at skráseta almennar ognir kom í gildi, hava bert fáir stovnar dagført ognaryvirlit.

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at ognaryvirlit skulu verða gjørd yvir innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu tey ma. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir víst á, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2010 staðfestu vit aftur, at fleiri stovnar ikki enn hava dagførd yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í september 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið fór enn einaferð at heita á hini aðalráðini um at fáa skrásett tær ognir, ið enn ikki eru skrásettar.

3.2.8 Tøkur peningur (LG 2009/300-0104)

Inniogn í Landsbankanum

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	2.467.420	2.157.523	1.551.183
Harav minstainnlán	1.500.000	1.500.000	1.780.000
Munur	**967.420**	**657.523**	**-228.817**

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya" er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan. Viðmerkjast kann, at sambært Hagstovu Føroya er bruttotjóðarúrtøkan við árslok 2008 12,3 mia.kr. Sostatt skuldi minstainnlánið í Landsbanka Føroya í 2009 verið um 1,8 mia.kr.

Sambært yvirlitinum var inniognin í Landsbankanum omanfyri roknaða minstainnlánið árini 2007 og 2008, ávikavist 967,4 mió.kr. og 657,5 mió.kr. Í 2009 var inniognin í landsbankanum 228,8 mió.kr. minni, enn roknaða minstainnlánið.

Landsgrannskoðanin hevur eisini gjørt vart við, at fleiri landsstovnar og -grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhald, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum. Vit hava fleiri ferðir áður víst á, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum til lógirnar.

Stýring av landsins gjaldføri

Í einum uppriti í mars 2004 hevur Gjaldstovan ma. víst á, at hóast tað er ásett í § 15 í roknskaparkunngerðini, at allar útgjaldingar skulu fara ígjøgnum Búskaparskipan landsins, fara um 3 mia.kr., ella útivið helvtin av øllum útreiðslum oø., sum eru heimilaðar í fíggjarlógini, uttanum Búskaparskipan landsins. Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin, at neyðugt er at støða verður tikin til málið, og at neyðugt er at fáa gjørt greiðar lógar- og umsitingarkarmar á hesum øki. Gjaldstovan hevur í oktober 2010 kunnað um, at upphæddin, sum fer uttanum Búskaparskipan landsins, er nú um 2 mia.kr.

Broyting av lóggávu

Í fleiri uppskotum til samtyktar seinastu árini um at góðkenna landsroknskapirnar hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" í lógini "um Landsbankan" og í lógini "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" eru ógreið. Løgtingsgrannskoðararnir hava mælt landsstýrismanninum til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Í 2002 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" fóru at verða lýst gjøllari í uppskoti til broyting í lóg "um Landsbankan", sum fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2002. Onki uppskot varð tó lagt fyri Løgtingið.

Í september 2009 helt landsstýrismaðurin tað vera skeivt at siga, at útrokningin av bruttotjóðarinntøkuni bygdi á eitt leyst grundarlag. Hagstovan hevði í juni 2009 kunngjørt nýggj hagtøl úr tjóðarroknskapunum 1998 – 2008.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at næstu ferð broytingar fóru at verða gjørdar í landsbankalógini, fór Fíggjarmálaráðið at endurskoða hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar".

Banka-, giro- og kassapeningur

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	297.896	350.610	571.039

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar, við leysum/ivasomum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhald, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Upphæddin fyri 2009 kann sundurgreinast í tær banka- og girokontur, sum Gjaldstovan umsitur, og tann partin av banka- og girokontum, sum aðrir stovnar umsita (vanligir landsstovnar og landsfyritøkur). Gjaldstovan umsitur 371,7 mió.kr. (ella um 65%) av upphæddini.

Almannastovan, Kringvarp Føroya, Apoteksverkið, Búnaðarstovan, Strandfaraskip Landsins og Rúsdrekkasøla Landsins hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Spurningurin er, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

3.2.9 Skuld (LG 2009/300-0201/0202)

Innanlandsskuld, langfreistað

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	2.160.156	2.119.215	2.707.697

Við árslok 2009 var talan um 3 lánsbrævarøðir:

- Ein lánsbrævarað (FO-LB 100601), áljóðandi 550 mió.kr., sum fall til gjaldingar 1. juni 2010.
- Ein lánsbrævarað (FO-LB 120610), áljóðandi 1.900 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2012.
- Ein lánsbrævarað (FO-LB 180610), upprunaliga áljóðandi 256 mió.kr., sum verður niðurgoldin fram til 10. juni 2018.

Harafturat kemur tiltaksgrunnurin á 640 t.kr.

Brævalánini verða seld uttanlands, og tað er óvist, hvør "keyparin" er. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Uttanlandsskuld, langfreistað

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	500.000	500.000	500.000

Við árslok 2009 er bert talan um eitt lán, sum stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Lánið er 500 mió.kr. Sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: "Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	1.023.300	1.325.173	574.453

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 659,7 mió.kr. afturgoldnar í 2010 pr. ultimo september 2010. Sambært Landsbanka Føroya er ikki ætlanin at gjalda meira niður í 2010:

- FO-LB 180610: Avdráttur og afturkeyp av lánsbrøvum á tilsamans 109,7 mió.kr.
- FO-LB 100601: Brævalán á 550 mió.kr. er afturgoldið sambært avtalu tann 21. juni 2010.

Tær 574,5 mió.kr., sum í landsroknskapinum 2009 standa at falla til gjaldingar í 2010, svara til upphæddina, ið sambært upprunaligu avtaluni skuldi verða goldin í 2010.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Sambært roknskapinum	718.643	970.800	695.210

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðar-avmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftan-fyri.

Útjavningarkonta (LG 2009/300-0203)

1.000 kr.

Ár	2007	2008	2009
Salda 1. januar	1.008.085	1.816.741	1.690.368
RLÚ-úrslit	1.442.533	-629.838	-688.101
Ymiskar broytingar	-635.785	503.465	66.530
Salda 31. desember	**1.814.833**	**1.690.368**	**1.068.797**

Saldan á útjavningarkontuni primo 2008 samsvarar ikki við salduna ultimo 2007. Saldan 1. januar 2008 er javnað 1,9 mió.kr. í mun til salduna við ársenda 2007, og er viðvíkjandi apoteksverkinum.

“Ymiskar broytingar” fevnir um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er ma. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskap-armeginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki “Kontu fyri eginpening” í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, td. bygningar, skip, vegir ot., eru ikki virðismett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

3.3 Umsiting av skatti, avgjøldum oø.

Síðani miðskeiðis í 90-árunum hevur Landsgrannskoðanin á hvørjum ári víst á, at tørvur er á at skriva mannagongdir fyri umsitingina.

Samanumtikið má Landsgrannskoðanin ásanna, at langt er eftir á mál at áseta reglur fyri umsitingina og at seta í verk innaneftirlit á TAKS. Gongd tykist tó at vera komið á arbeiðið, batar eru at hóma og nøkur mál eru loyst.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár víst á, at innaneftirlitið á TAKS virkar ikki nóg væl. Innaneftirlit eru tiltøk, sum ovasta leiðslan, dagliga leiðslan og onnur skipa og seta í verk, fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at stovnurin røkkur sínum málum, so sum:

- at roknskapurin er rættur og álítandi,
- at raksturin er effektivur,
- at lógir verða hildnar.

Innaneftirlit skal tí verða skipað og sett í verk fyri at byrgja upp fyri teimum vandum, ið kunnu forða fyri, at stovnurin røkkur sínum málum.

Í seinastu frágreiðingunum hevur Landsgrannskoðanin eisini víst á, at tørvur hevur verið á at áseta mannagongdir fyri fleiri umsitingarøkir, og niðanfyri verður kunnað um, hvørjar ábøtur eru gjørdar, og hvørjar eru ætlaðar at verða gjørdar í teimum málum, sum vit hava grannskoðað seinastu árini:

- Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at TAKS er farið undir at gera eina skipan við kekklistum, sum skal tryggja, at stovnurin ger tey innaneftirlit, ið eru neyðug fyri at tryggja, at landsroknskapurin er rættur og álítandi, og fyri at kunna skjalprógva og hava umsjón við, at eftirlitini eru gjørd. Landsstýrismaðurin heldur tað vera eitt stig á leiðini til at styrkja innaneftirlitið á stovninum.
- Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi hevur stjórin á TAKS víst á, at arbeitt verður við at skriva leiðreglur. Nakrar eru skrivaðar. Nógvar ábøtur eru gjørdar viðvíkjandi skrásetingum, hagtølum, mannagongdum oø. seinastu árini. Hann heldur, at tað tykist, sum væl er komið burturúr fyri mál- og avrikstíðarskeiðið 2009/10, men setta málið um MVG-eftirlit í 2010 verður neyvan rokkið.
- Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at leiðreglurnar fyri umsiting av ferðaavgjaldi eru ikki lidnar enn. TAKS hevur boðað Fíggjarmála-ráðnum frá, at leiðreglurnar eru í gerð, og fara at verða lidnar í heyst (2010).
- Landsgrannskoðanin hevur, fyrstu ferð í 1997, víst á, at nøkur gistingarhús við matstovu, sum hava søkt um at fáa endurrindað oljuavgjald, bert hava fingið lutvíst endurgjald. Allar skrásetingar av gistingarhúsum eru nú gjøgnumgingnar og rættaðar, og skrásetingar fyri endurrindan av oljuavgjaldi eru gjøgnum-gingnar.
- TAKS hevur í september 2010 kunnað um, at løntakaraeftirlitið fór í gongd við at gera FAS eftirlit í september 2009, eftir góðkendari FAS vegleiðing. Øll FAS reiðaravirkini hava fingið vegleiðing um, hvussu lønarbókhaldið skal verða lagt til rættis. Sambært TAKS vóru øll tey nýggju reiðaravirkini kannað, umframt eitt av teimum verandi. Í oktober 2010 og árið út verður aftur farið á eftirlitsvitjanir, tó ásannandi at TAKS ikki nær øll FAS-skipini.
- Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at leiðreglur um lønar-hæddaravgjald nú eru settar í verk. TAKS hevur ætlanir um at gjøgnumganga roknskapirnar hjá øllum teimum virkjum, ið ikki eru MVG-skrásett og ikki

skrásett at gjalda lønarhæddaravgjald. Ætlanirnar fara at verða ásettar í komandi avrikssáttmála. Hetta arbeiði verður gjørt fyri at tryggja fullfíggjaða skráseting. TAKS boðar eisini frá, at hjá øllum, sum gjalda lønarhæddar-avgjald, verður kannað, um tey hava goldið røttu upphæddina.

3.4 Mál- og avrikssáttmálin hjá TAKS (LG 2009/220-0000)

Landsgrannskoðanin hevur kannað mál- og avrikssáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og TAKS. Hugt hevur ma. verið at, hvussu eftirlitini verða skipað, og um TAKS heldur ásetingarnar í sáttmálanum um talið á eftirlitum. Landsgrannskoðanin hevur eisini mett, um eftirlitini eru verulig. Landsgrannskoðanin hevur tó ikki roknað eftir úrslitini, sum TAKS er komið til.

Landsgrannskoðanin heldur, at yvirskipað sæð kunnu mál- og avrikssáttmálar vera eitt gott stýringaramboð í viðurskiftunum millum ráð og stovnar, og eisini innanhýsis á stovnunum. Mál- og avrikssáttmálar kunnu eisini geva størri gjøgnumskygni í tí arbeiði, sum stovnurin avrikar, bæði mótvegis myndugleikunum og almenninginum.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera týdningarmikið, at ráð og stovnar eru kritisk, tá ið mál- og avrikssáttmálar verða brúktir til at stýra við, og ansast má eftir, at sáttmálarnir hava eina veruliga stýringarfunktión. Vandi kann verða fyri at sáttmálin, bæði tá ið hann verður gjørdur, brúktur í dagliga arbeiðinum, og tá ið uppfylging skal gerast, verður ein siðvenja uttan innihald.

Í sínum arbeiði at kanna mál- og avrikssáttmálan, hevur Landsgrannskoðanin ikki kannað innaneftirlit og KT-skipanir hjá TAKS, men hevur gjørt sínar metingar út frá samrøðum við fíggjarmálastjóran, stjóran á TAKS, økisstjórar og viðkomandi starvsfólk, umframt upplýsingar úr journalskipan og hagtølum.

3.4.1 Yvirskipað um sáttmálan sambært Fíggjarmálaráðnum og TAKS

Í mai 2010 skrivaðu TAKS og Fíggjarmálaráðið undir nýggjan mál- og avrikssáttmála at galda frá 1. apríl 2010 til 31. desember 2010. Landsgrannskoðanin hevur bert kannað sáttmálan, sum var galdandi frá 1. apríl 2009 til 31. mars 2010.

Í mál- og avrikssáttmálanum eru millum annað ásetingar um innaneftirlit, har eitt av fokusøkjunum er, at eftirlitini skulu vera málrættað. Í sáttmálanum er henda orðing um eftirlit:

"Eftirlitsøkini vera vald ma. við støði í, um tað fyriliggja upplýsingar, sum benda á, at tað eru ymiskar fatanir av, hvussu reglurnar skulu umsitast. Váðametingar skulu verða grundarlagið fyri hvørji eftirlit skulu gerast. Stórur dentur skal leggjast á at eftirlitini skapa mest møguligt gagn. Mett skal vera í hvørjum føri um týdningin fyri júst at gera ávísa eftirlitið innan ávísa virkisøkið".

TAKS hevði sett sær fyri at gera samanlagt 955 eftirlit í sáttmálatíðarskeiðinum.

Fíggjarmálaráðið valdi at gera mál- og avrikssáttmála við TAKS, tí at TAKS er ein stovnur undir ráðnum, og virksemið hjá TAKS kann verða sett upp í mál. Endamálið var at fáa so nógv burturúr fíggjarliga tilfeinginum sum gjørligt. Sáttmálin noyðir eisini stovnin at gera raðfestingar, seta sær mál og at røkka teimum.

TAKS hevði sett sær mál, og hevði visjón og missjón eisini áðrenn nakar mál- og avrikssáttmáli varð gjørdur, men við at leggja málsetningarnar í ein sáttmála, varð hetta arbeiði meira skipað. Tað er leiðslan á TAKS, sum orðar visjónina og missjónina hjá stovninum.

Málini í mál- og avrikssáttmálanum verða fylgd upp á økisstjórafundum. Regluligir fundir eru um gongdina, og hildið verður fast um at røkka málunum. Eftirlitini, sum eru ásett í mál- og avrikssáttmálanum, skulu verða gjørd gjøgnum árið, og ansað verður eftir, at tey ikki hópa seg upp við endan á sáttmálaskeiðinum.

Tá ið mál- og avrikssáttmálin gongur út, verður statusfundur hildin millum Fíggjarmála-ráðið og TAKS. Tá verður ma. umrøtt, hvussu eydnaðist at náa málunum í sáttmála-num.

Mál- og avrikssáttmálin fyri 2009/2010 gekk út 31. mars 2010. Nýggi sáttmálin fyri tíðarskeiðið 2. til 4. ársfj. 2010 varð undirskrivaður meira enn ein mánað eftir, at hann skuldi vera komin í gildi. Tó hevur TAKS kunnað um, at TAKS frá 1. apríl 2010 arbeiddi eftir nýggja sáttmálanum, hóast hann ikki var undirskrivaður.

3.4.2 Eftirlit

TAKS sigur, at sjálvt um tey hava ein mál- og avrikssáttmála, har mál eru sett fyri, hvussu nógv eftirlit skulu verða gjørd, er ikki trygd fyri, at allar inntøkur, sum landið hevur krav um, koma í landskassan. TAKS hevur avmarkaða orku at gera eftirlit.

Sambært TAKS er ringt at meta um, hvussu nógv eftirlit skulu til fyri at tryggja, at allar inntøkur verða kravdar inn. TAKS hevur heldur ongi amboð at gera eina meting av, um skatta- og avgjaldsuppgerðirnar eru rættari í mun til tað, sum eftirlitsmálini skuldu bøta um.

Hvørt eftirlitini eru nóg effektiv, er, sambært TAKS, trupult at meta um. Sjálvi halda tey, at eftirlitini eru effektiv, tí hvørt eftirlitsfólk avdúkar óskattaðan pening í miðal fleiri ferðir sína løn, so at gera upp hagtøl er ein háttur hjá TAKS at vísa á effektivitetin í eftirlitunum. Sambært TAKS skulu eftirlitini eisini virka fyribyrgjandi, men tann effektiviteturin er trupul at máta.

Sambært TAKS, hava tey ongi beinleiðis amboð til at góðskutryggja eftirlitini, men TAKS arbeiðir støðugt við tí málsetningi, at góðskan skal vera á einum høgum støði. TAKS vísir á, at tað eru tey røttu starvsfólkini, við teimum røttu førleikunum, sum gera tey ymisku eftirlitini. Harumframt verður á deildunum tosað um, hvussu eftirlitini skulu verða gjørd, fyri at tryggja góða góðsku.

Støðurnar, sum koma í, í sambandi við eftirlit, eru oftast ymiskar, og tí er málsgongdin í eftirlitunum eisini ymisk, hóast talan er um sama slag av eftirliti. Tá verður góðskan tryggjað við at røttu førleikarnir á deildunum eru partur í eftirlitinum, tvs. oftani við “fleiri eygum” á hvørt eftirlit. Eftirlitini verða skjalfest í journalskipan, og hagtalsuppfylging tryggjar eisini eina góða skjalfesting, sambært TAKS.

TAKS hevur gjørt nógv burturúr at kunna almenningin um úrslitini av eftirlitunum. Leiðslan sær tað sum eitt fyribyrgjandi tiltak, sum minnir skattgjaldarar á at geva allar skattskyldugar inntøkur upp til skattingar.

3.4.3 Samandráttur og niðurstøður

Landsgrannskoðanin hevur hugt at mál- og avrikssáttmálanum millum TAKS og Fíggjarmálaráðið fyri 2009/2010, við serligum denti á ásetingunum um mál um eftirlit.

Yvirskipað um sáttmálan

Í mál- og avrikssáttmálanum eru visjónin og missjónin hjá TAKS nevndar. Landsgrannskoðanin heldur tað vera týdningarmikið, í arbeiðinum at seta mál, at TAKS eisini hevur visjónina/missjónina í huga. Tað at náa málunum í sáttmálanum eigur í síðsta enda at gera, at TAKS megnar at liva upp til visjónina/missjónina.

Í mál- og avrikssáttmálanum eru ikki ásetingar um effekt av ella góðsku á eftirlitunum. Landsgrannskoðanin heldur, at effektin av og góðskan á eftirlitunum eru týdningarmikil atlit, ið mugu verða tikin við í arbeiðinum hjá TAKS, og tí eisini eiga at verða tikin við í mál- og avrikssáttmálan.

Tað er týdningarmikið, at mál- og avrikssáttmálin er rótfestur í øllum pørtum í skipanini. TAKS heldur, at sáttmálin er væl rótfestur. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at leiðslan á TAKS framhaldandi leggur dent á at fáa boðskapin í mál- og avrikssáttmálanum út til øll starvsfólkini, soleiðis at stovnurin fær fulla nyttu av honum.

Verandi sáttmáli varð undirskrivaður meira enn ein mánað eftir, at hann skuldi vera komin í gildi. Landsgrannskoðanin mælir til, at TAKS og Fíggjarmálaráðið leggja størri dent á at undirskriva nýggjan sínámillum sáttmála áðrenn undanfarni sáttmálin fer úr gildi. Sáttmálar undanfarin ár hava eisini verið undirskrivaðir langt aftaná, at teir skuldu verið settir í gildi.

Fíggjarmálaráðið og TAKS hava ein fastan fund um árið viðvíkjandi mál- og avrikssáttmálanum, ið verður hildin, tá ið sáttmálatíðarskeiðið er runnið. Á fundinum verður úrslitið av avrikunum eftirmett. Partarnir samskifta annars óformelt um sáttmálan eftir tørvi. Landsgrannskoðanin heldur, at tað hevði verið ein fyrimunur, um partarnir samskiftu oftari um sáttmálan, soleiðis at Fíggjarmálaráðið kann verða kunnað um gongdina so hvørt.

Úrslit av kanningum um eftirlit

Í sáttmálanum finst ongin allýsing av, hvat TAKS roknar sum eitt eftirlit. Tað er ein sannroynd, at fleiri deildir hjá TAKS, so sum tolleftirlitið og eftirlitsdeildin í Saltangará, hava sum høvuðsendamál at gera eftirlit, og onkur deild arbeiðir við líkning, sum eisini kann verða kallað eitt slag av eftirliti. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nóg greitt, hvat verður roknað sum eftirlit sambært sáttmálanum, og hvat er “vanligt” arbeiði.

Landsgrannskoðanin mælir til, tá ið ein komandi mál- og avrikssáttmáli skal gerast, at gera eina allýsing av, hvat TAKS roknar sum eitt eftirlit, og eisini at gera tað greitt fyri starvsfólkunum, sum skráseta eftirlitini. Leiðslan hevur umsjón við, at tað sum verður skrásett samsvarar við málini í sáttmálanum.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um TAKS hevur rokkið málinum um tal á eftirlitum. Niðurstøðan er, at á flestu økjum hevur TAKS nátt málinum. Á nøkrum økjum eru fleiri eftirlit gjørd, enn málið var, og á øðrum nøkur færri enn ætlað.

Landsgrannskoðanin hevur eisini kannað, um eftirlitini eru framd soleiðis, at tey kunnu kallast verulig eftirlit. Vit hava gjøgnumgingið skjøl, sum hava samband við eftirlitini, og sum liggja í journalskipanini. Niðurstøðan er, at eftirlitini tykjast væl skjalfest og tykjast dygdargóð, tó við nøkrum undantøkum. Í summum førum var ikki gjørligt at meta um dygdina, td. tá ið talan er um ymisk sløg av tolleftirlitum. Flestu tolleftirlitini eru ikki skrásett í journalskipanini, men í aðrari skrá, nevnd Vinnuskráin.

Fyri tey 4 eftirlitsøkini: MVG og brennioljuavgjald, MVG og skatt (eftirlitsdeildin), tolleftirlit og eftirlit við stuðlum er galdandi, at leiðslan hevur sett mál fyri, hvussu nógv eftirlit tey ætla sær at náa í sáttmálatíðarskeiðinum. Flestu økisstjórarnir hava greitt frá, at talið á eftirlitum er ásett eftir, hvussu nógv tey halda seg kunna klára at gera. Tað tykist ikki, sum nøkur skipað ætlan (strategi) liggur aftan fyri, hvussu nógv eftirlit skulu verða gjørd, fyri at TAKS við rímiligari vissu kann siga, at skattainntøkurnar eru rættar. Samanborið við hvussu nógvir skattgjaldarar og virkir, sum skulu gjalda avgjøld og skatt, eru tilsamans í Føroyum, er samlaða talið á eftirlitum ikki stórt.

Tá ið starvsfólkatilfeingið sambært TAKS er avmarkað í mun til eftirlitsuppgávurnar, heldur Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at TAKS leggur dent á at brúka tilfeingið rætt, ma. við at málrætta eftirlitini. Landsgrannskoðanin mælir eisini til at automatisera tær eftirlitsuppgávur, sum í dag eru manuellar, men sum kunnu verða automatiseraðar.

Bert í lítlan mun eru skrivligar mannagongdir fyri eftirlitini. TAKS vísir á, at tað eru tey røttu starvsfólkini við teimum røttu førleikunum, sum gera eftirlitini. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at gera skrivligar mannagongdir á øllum økjum. Fara roynd starvsfólk td. úr starvi, eiga nýggj starvsfólk at kunna røkja starvið við at kunna seg um mannagongdirnar.

3.5 Avgjald av kapitaleftirlønum (LG 2009/220-0522)

Ábøtur eru gjørdar við umsiting av frádrátti á sjálvuppgávuni fyri kapitaleftirlønir, men framvegis er onki eftirlit við, um rætt avgjald verður goldið landskassanum, tá ið eftirlønir koma til útgjaldingar.

Í undanfarnari frágreiðing vístu vit á, at ætlaða grannskoðanin av avgjaldi av kapitaleftirlønum ikki var framd, vegna umstøður á TAKS. Ábøtur eru gjørdar við umsiting av frádrátti á sjálvuppgávuni fyri kapitaleftirlønir, men framvegis er onki eftirlit við, um rætt avgjald verður goldið landskassanum, tá ið eftirlønir koma til útgjaldingar.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið at endurskoða rentutryggingarlógina er komið so langt, at eitt nýtt lógaruppskot nú er sent til hoyringar. Ætlanin er at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í hesum árinum (2010). Landsstýrismaðurin sigur, at uppskotið er partur av sonevnda pensjónsreforminum.

Landsstýrismaðurin vísir til frágreiðing frá TAKS, har TAKS kunnar um, at allir fyrispurningar, at flyta ella umbóka ov nógv inngoldna kapitaleftirløn til lutaeftirløn, ella at gjalda út ov nógv inngoldið, eru avgreiddir. Freistin, at gera umbókingar ella at

gjalda út ov nógv inngoldið, var úti 1. oktober 2010. Samstundis er TAKS farið undir at gera eftirlit við kapitaleftirlønum, men eftirlitsætlan er ikki gjørd enn.

TAKS ætlar at fáa upplýsingar frá øllum tryggingarveitarum um allar broytingar í 2009 og 2010 – umbókingar og útgjøld, sum eru farin fram á kapitaleftirlønum viðvíkjandi árunum 2006 til 2010. Upplýsingarnar skulu nýtast sum grundarlag undir eftirlitinum.

TAKS hevur biðið SKAT í Danmark um upplýsingar um kapitaleftirlønir, sum føroyingar eiga hjá donskum eftirlønarveitarum. TAKS hevur fingið upplýsingarnar. Ætlanin er at nýta tær í eftirlitsarbeiðinum í tann mun, tað ikki er gjørt higartil.

Sambært TAKS er endamálið við eftirlitinum at tryggja, at samsvar er millum inngjald, frádrátt og avroknaðan frádrátt fyri árini 2006 til 2010, soleiðis at tá ið ætlandi verður farið undir tvungna eftirløn frá 2011[2], eru eldri viðurskifti komin í rættlag. TAKS sigur tó, at tað er ógjørligt at siga, hvussu langa tíð eftirlitsarbeiðið kemur at taka, tí eftirlitsorkan er so lítil, men arbeitt verður, til komið er á mál.

3.6 Kapitalvinningsskattur (LG 2009/220-0521)

Í seinastu frágreiðing í oktober 2009 greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðan av kapitalvinningsskatti. Landsgrannskoðanin hevði kunnað seg um mannagongdir og innaneftirlit í sambandi við álíkningina av kapitalvinningsskatti og rentuskatti, og um innaneftirlit, mannagongdir og raðfestingar hjá leiðsluni í sambandi við álíkning og hvussu leiðslan hevði eftirlit við skattingini.

Niðurstøðan av kanningini var, at automatiseringar av upplýsingum, sum skulu latast TAKS, hava bøtt um tilgongdina til upplýsingarnar. Tó vóru framvegis fleiri veikleikar í umsitingini ma. við funktiónsskilnaði, vantandi innanhýsis eftirliti og skrivligum mannagongdum, renturokning og mannagongdum viðvíkjandi skrásetingum í bókhaldsskipanini og atgongdum til KT-skipanir.

Stjórin á TAKS hevur síðani kunnað um, at nú er arbeiðið við roknskaparreglugerð og innaneftirliti tikið upp aftur. Bókingarmannagongdir eru rættaðar, og tað er “ruddað” í atgongdunum til KT-skipanirnar.

[2] Landsstýrismaðurin hevur í tíðindaskrivi í september 2010 boðað frá, at pensjónsnýskipanin verður sett í gildi 1. januar 2012.

3.7 MVG-eftirstøður (LG 2009/220-0522)

MVG-eftirstøðurnar hava ongantíð áður verið so stórar, sum í 2010. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at fleiri heimildir, sum vórðu settar í MVG-lógina í 1995, verða ikki brúktar í tann mun, ætlanin var.

Landsstýrismaðurin ætlar at útvega TAKS víðari heimildir at forða fyri, at eftirstøðurnar vaksa.

Talvan vísir MVG eftirstøðurnar 2005 – 2009 (sambært uppgerð frá TAKS):

1.000 kr.

	2005	2006	2007	2008	2009
MVG eftirstøður	62.425	70.855	60.225	72.955	91.128

MVG eftirstøðurnar eru vaksnar 28,7 mió.kr. frá 2005 til 2009, ella 46%. Viðmerkjast kann, at pr. 30. september 2010 vóru MVG eftirstøðurnar 113,4 mió.kr.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hava vit umrøtt eina kanning, sum varð gjørd í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir høvdu biðið Landsgrannskoðanina lýsa vøksturin í MVG-eftirstøðunum. Landsgrannskoðanin kannaði eisini, um nóg mikið varð gjørt fyri at fáa eftirstøðurnar kravdar inn, og í hvønn mun heimildirnar í MVG-lógini (Ll. nr. 136/1992) vóru brúktar.

Kanningin vísti, at fleiri heimildir, sum vórðu settar í MVG-lógina í 1995 (§ 23a), vórðu ikki brúktar í tann mun, ætlanin var. Umframt vantandi starvsfólkaorku á Eftirlits- og Innheintingardeildini varð víst á, at KT-skipanirnar vóru ikki nøktandi, at skipað skráseting av ávísum upplýsingum vantaði, at ov nógv manuelt arbeiði kravdist, og at skrivligar mannagongdir vantaðu.

Í september 2009 segði landsstýrismaðurin ma. at sambært TAKS á Hálsi, vórðu nakrar ásetingar í MVG-lógini ikki fylgdar tí "tað ikki hevur nakran positivan virkning fyri umsitingina, heldur tvørturímóti". Tó varð roynt at krevja trygd fyri rindanini av meirvirðisgjaldi. Fyribilsásetingarnar út frá metingum vórðu framvegis fyri tað mesta gjørdar sjálvvirkandi.

Landsstýrismaðurin vísti á, at tá ið MVG-skipanin varð sett í gildi í 1993, hevði Landsstýrið uppskot um, at TAKS skuldi fáa heimild at steingja fyritøkur, sum ikki rindaðu landskassanum tað MVG, tær høvdu kravt frá borgarunum vegna landskassan. Hetta uppskot fekk tó ikki politiska undirtøku, og varð ongantíð sett í gildi.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ætlanin er at gera eina broyting í MVG-lógini, soleiðis at TAKS fær heimild at frámelda virkir úr Vinnuskránni, sum eru í gongd, men sum skylda MVG. Eisini er ætlanin, at um virkir, sum skylda MVG, halda fram við MVG skyldugum virksemi, verða tey revsað, og "persónligt heftilsi" móti stjórn/eigarum verða gjørd galdandi. Landsstýrismaðurin fer nú undir at fáa politiska undirtøku fyri lógarbroytingini.

3.8 Vanligur landsskattur (LG 2009/220-0521)

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar álíkningar. Onki var at finnast at, og rætt varð roknað út frá givnum upplýsingum.

Talvan vísir inntøkur av vanligum landsskatti árini 2005 – 2009:

mió.kr.

	2005	2006	2007	2008	2009
Landsskattur	1.321	1.380	1.421	1.327	1.387

Vanligi landsskatturin verður í fíggjarlógini og landsroknskapinum skrásettur á høvuðskontu 20.52.1.01 “Vanligur landsskattur (ógreinað játtan)”.

Landsgrannskoðanin hevur í apríl 2010 við stakroyndum grannskoðað vanliga landsskattin. Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað, hvørji innaneftirlit TAKS ger í sambandi við árligu endauppgerðina, og grannskoðanin fevnir ikki um innaneftirlitið.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað 25 endauppgerðir fyri 2008. Talan var um 25 tilvildarliga valdar uppgerðir, tiknar úr einum lista yvir P-tøl, sum vit fingu frá TAKS.

Vit kannaðu ma., um skattaútrokning var gjørd, um neyðug skjalprógv vóru, um skattaprosentini vóru røtt og um skatturin var rætt roknaður út frá givnum upplýsingum. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

3.9 Felagsskattur (LG 2009/220-0521)

Landsgrannskoðanin hevur í apríl og mai 2010 grannskoðað felagsskatt. Grannskoðanin hevur tikið støði í samrøðum og við stakroyndum. Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað, hvørji innaneftirlit TAKS ger í sambandi við árligu endauppgerðina, og grannskoðanin fevnir ikki um innaneftirlitið.

3.9.1 Lógargrundarlag

Skattur verður kravdur sambært Ll. nr. 86/1983 “um landsskatt og kommunuskatt” vsb., og áseting av skatti til landskassan í Ll. nr. 87/1983 vsb.

Felagsskatturin er 18% av skattskyldugu inntøkuni. Inntøkugrundarlagið byggir á tey feløg, sum sambært skattalógini gjalda skatt í Føroyum. Skatturin frá feløgunum verður býttur millum land og kommunur í lutfallinum 62% til landið og 38% til kommunurnar. Felagsskatturin, sum fellur til gjaldingar í 2009, er álíknaður á teir roknskapir, har inntøkuárið fellur saman við ella endar í 2008.

3.9.2 Roknskapartøl

Felagsskattur er bæði felagsskattur til landið og til kommunurnar. Hesir skattir verða í fíggjarlógini og landsroknskapinum skrásettir á høvuðskontu 20.52.1.07 “Felagsskattur (ógreinað játtan)”.

Niðanfyri er ein talva, sum vísir gongdina sambært landsroknskapinum árini 2005 – 2009:

1.000 kr.

Felagsskattur	2005	2006	2007	2008	2009
Felagsskattur tilsamans	168.636	229.258	258.433	376.750	164.320
Flutt til kommunur	-64.227	-87.295	-98.295	-143.222	-62.266
Felagsskattur, netto	**104.409**	**141.963**	**160.138**	**233.528**	**102.054**

Inntøkurnar av felagsskatti til landið meira enn tvífaldaðust frá 2005 til 2008, úr 104,4 mió.kr. í 233,5 mió.kr., men í 2009 eru tær minkaðar aftur til umleið sama støði, sum í 2005, 102,1 mió.kr.

3.9.3 Mannagongdir og skrásetingar

Høvuðsendamálið var at grannskoða felagsskatt, men av tí at mannagongdirnar at viðgera sjálvuppgávur at kalla eru tær somu fyri feløg og vinnurekandi persónar, hevur Landsgrannskoðanin valt at umrøða feløg og vinnurekandi persónar undir einum, og viðmerkja har munur er.

TAKS hevur kunnað um, at um 3.000 feløg og 3.400 vinnurekandi persónar hava fingið sjálvuppgávu útskrivaða, og sum skal sendast aftur til TAKS.

Feløg skuldu fyri árið 2009 senda inn til TAKS sjálvuppgávu, við tilhoyrandi undirskjølum, í seinasta lagi 1. juli 2010. Um serligar orsøkir eru, sum td. sjúka, kann freistin verða longd.

Tá ið eitt felag ella vinnurekandi persónur sendur sjálvuppgávu og tilhoyrandi skjøl til TAKS, verða tey skannaði og skrásett í journalskipanini.

Sambært §§ 102 og 103 í skattalógini skal undirskriva sjálvuppgáva sendast inn, og saman við henni rakstrarroknskapur og fíggjarstøða. Eisini skal skattaroknskapur við sundurgreiningum, møgulig kapitalvinningssjálvuppgáva og vinningsbýtisuppgerð fylgja við.

Tá ið sjálvuppgávan er skrásett í journalskipanini, lesur ein málsviðgeri hana og kannar hana fyri sjónligar feilir og manglar, td. munir millum sølu og MVG.

Hugt verður at, um upphæddirnar frá roknskapinum eru rætt førdar yvir á sjálvuppgávuna, um bland er komið í tølini, og um upphæddirnar eru rættar. TAKS setur sum krav, at upphæddirnar eru sundurgreinaðar. Í viðgerðini verður dentur lagdur á, at MVG´ið og lønirnar verða stemmaðar av við skattaskipanina. Sambært TAKS eru nógvir feilir í innkomnu sjálvuppgávunum.

Skulu broytingar gerast í skattskyldugu inntøkuni, verður fyrst sent ætlanarskriv og síðani broytingarskriv við kæruvegleiðing, um broyting verður gjørd.

Sendur felag ikki sjálvuppgávu inn, verður felagið hóast tað sett í skatt. Skatturin verður ásettur út frá einari meting, sum byggir á inntøkur og útreiðslur frá undanfarnum tíðarskeiðum.

Burtursæð frá at TAKS kannar, um neyðug skjøl fylgja við sjálvuppgávunum og um nøkur ávís tøl stemma, fer vanliga ikki nøkur verulig málsviðgerð av sjálvuppgávunum fram. Td. verður skattaroknskapurin ikki kannaður eftir í tann mun, tað ber til.

Samskatting og framflutt hall

Sambært TAKS kann tað vera tvørligt at viðgera feløg, sum eru samskattaði. Um feløg eru samskattaði, skal bert útfylt sjálvuppgáva sendast inn fyri móðurfelagið. Dótturfeløgini skulu senda inn roknskap og sundurgreiningar, sum vísa skattliga úrslitið hjá hvørjum felag.

Trupulleikar eru eisini við framfluttum halli. Lógarbroyting er gjørd (Ll. nr. 23/2004), har feløg óavmarkað kunnu framflyta hall, sum er staðfest í 2002 og seinni (§ 33, pkt. 5a í Ll. nr. 86/1983 um landsskatt og kommunuskatt). Ongin skráseting av framfluttum halli er í skipanini hjá TAKS, og tí krevur tað nakað av arbeiðsorku at fylgja við, at hallini verða flutt rætt fram. Tað kann verða neyðugt at hyggja at eldri árum fyri at kanna úrslitið.

Sambært TAKS verður arbeitt við einari e-skatta skipan. TAKS væntar, at eftirlits-møguleikarnir verða munandi betri, tá ið skipanin verður virkin.

3.9.4 Skrivligar mannagongdir

Skrivligar vegleiðingar ella mannagongdir eru ikki fyri viðgerðini av sjálvuppgávum sum so. Tó finnast nakrar einstakar skrivligar vegleiðingar, men tær eru ikki savnaðar. Td. hevur TAKS gjørt ein lista yvir, hvørji skjøl skulu vera í málinum, og hvussu tey skulu handfarast í journalskipanini. Eisini er kunningarskriv gjørt til grannskoðarar, bókhaldarar oo. við ymiskum vegleiðingum viðvíkjandi innlatan av sjálvuppgávum.

3.9.5 Stakroyndir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað 15 sjálvuppgávur hjá feløgum, fyri roknskaparárið 2008. Talan var um 15 tilvildarliga valdar sjálvuppgávur, tiknar úr einum lista yvir v-tøl við partafeløgum og smápartafeløgum.

Vit kannaðu ma. um undirskrivað sjálvuppgáva, roknskapur, skattaroknskapur og møgulig onnur viðkomandi skjøl lógu í málinum, um útrokningar av skattskyldugari inntøku vóru útgreinaðar og tyktust rættar út frá givnum upplýsingum, um upplýsingar í skattaroknskapi og sjálvuppgávu samsvaraðu, um skattaútrokningin var røtt og rokning var útskrivað.

Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at viðvíkjandi stakroyndunum.

3.9.6 Niðurstøða

Málsviðgerð

Landsgrannskoðanin heldur ikki málsviðgerðina av sjálvuppgávunum vera nóg ná-greiniliga. Tá ið sjálvuppgávan og kravdu undirskjølini koma inn til TAKS, verður í stóran mun bert hugt at, um øll skjølini eru við, og um nakrar ávísar upplýsingar stemma og eru í lagi. Verulig viðgerð fer ikki fram av sjálvuppgávuni.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at TAKS viðger sjálvuppgávurnar, so at ein verulig líkning fer fram av feløgunum.

Mælt er til at finna eina hóskandi skipan at skráseta framflutt hall.

Eisini er mælt til at loysa trupulleikarnar við líkning av samskattaðum feløgum.

Eftirlit

Sambært TAKS skrásetir ein persónur sjálvuppgávuna, uttan at inntøppaðu upplýsingarnar verða kannaðar eftir av øðrum persóni.

Landsgrannskoðanin heldur, at upplýsingarnar, sum verða inntøppaðar í skipanina, og sum eru grundarlagið undir skattaútrokningini, eiga at eftirkannast av øðrum enn tí, sum tøppar inn. Tað er ikki nóg góð trygd at lata tað vera upp til skattgjaldaran at gera vart við seg, er feilur í.

Mannagongdir

Ongar skrivligar mannagongdir eru fyri umsitingini av felagsskatti, og tí kann vandi vera fyri, at viðgerðin av feløgum og persónum ikki verður eins fyri øll, og at viðurskifti ikki verða kannað, sum tey skulu.

Mannagongdirnar eiga at stuðla undir, at viðgerðin av sjálvuppgávunum verður eins fyri øll, røtt og í føstum karmum. Tað kann td. verða gjørt við kekklistum, sum fáa málsviðgerarnar at fara ígjøgnum nakrar fastar arbeiðsgongdir, sum tryggja, at øll skjøl og allar útrokningar eru tøkar, og á tann hátt tryggja, at feløg og persónar verða viðgjørd rætt. Kekklistin kann verða eitt eftirlitsamboð hjá leiðsluni at tryggja rættleikan í roknskapunum.

Eisini tá ið nýggj starvsfólk verða lærd upp, er týdningarmikið at hava skrivligar mannagongdir.

Landsgrannskoðanin mælir til, at skrivligar mannagongdir verða gjørdar fyri álíkningina av feløgum og vinnurekandi persónum. Herundir eisini mannagongdir um, hvussu TAKS tryggjar sær, at álíkningin og skrásetingin er røtt.

3.10 Stuðul til rentuútreiðslur av lánum (LG 2009/203-0224)

Í seinastu ársfrágreiðingunum hevur Landsgrannskoðanin kunnað um grannskoðanina av stuðli til rentuútreiðslur.

Landsgrannskoðanin hevur ma. víst á, at kunngerðin var ikki dagførd, ásetingin um at avmarka stuðulstíðarskeiðið var ikki fylgd, møguleiki var fyri at fáa rentustuðul í óavmarkaða tíð, møguleiki var fyri at fáa rentustuðul uttan at gjalda rentur oa.

Harumframt var ongin mannagongd um innaneftirlit, málsviðgerð ella avstemman /eftirlit, og spurningurin, um endamálið við stuðlinum var rokkið, var ikki viðgjørdur.

Í oktober 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um eitt uppskot, sum lá í Løgtinginum, løgtingsmál nr. 29/2009: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur. Uppskotið varð samtykt 18. desember 2009 (Ll. nr. 171 frá 22. desember 2009).

Tað sum í høvuðsheitum er broytt í mun til gomlu lógina er:

1. Rentustuðul verður ikki veittur til provisjón og líknandi gjøld í sambandi við stovnan og umlegging av lánum.
2. Rentustuðulin verður í mesta lagi ávíst prosent av kr. 150.000 fyri hvørt árið.
3. Stuðul verður bert veittur fyri matrikul nummarið, har bústaðurin er. Eigur viðkomandi fleiri bústaðir, verður stuðul bert veittur fyri lán til høvuðsbústaðin.
4. Stuðul verður ikki veittur til grundstykki.

Henda broyting hevur við sær, at skipanin við hækkaðum rentustuðli fellur burtur, og stuðulsloftið verður kr. 150.000. Heldur ikki verður stuðul latin til umleggjan av lánum, so sum provisjónir og onnur gjøld í sambandi við umleggingina. Tað verður tí dýrari fyri borgaran at útseta lánsgjøld, tí stuðul verður ikki latin til útreiðslurnar av umleggingini.

3.11 Kervisskoðan (LG 2009/220-0521)

Avtala um kervisskoðan

Í mai 2004 góðkendu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisskoðarin á Elektron avtaluna um kervisskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru á Elektron.

Avtalan fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki teir partar, sum eru á TAKS, so sum brúkaraumsiting, mannagongdir og annað, sum eru neyðugar fyri ein tryggan og munagóðan rakstur. Átekningar frá kervisskoðaranum og grannskoðaranum hjá Elektron eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir annars á TAKS eru tryggar.

Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2009 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av tveimum frágreiðingum, tær eru:

- “Årsrapport fra Systemrevisionen 2009”
- “Generelle IT-kontroller 2009”

Hóast tað í avtaluni um kervisskoðan stendur, at kervisskoðarin árliga skal skoða eina ávísa brúkaraskipan, er ongin slík skoðan gjørd síðan 2004.

Fyri árið 2004 varð serfrágreiðing gjørd um “Revision af innkrevjingarskipanini 2004”.

Fyri árið 2003 varð serfrágreiðing gjørd um “Revision af eToll, 2003”.

Tá ið vit lesa frágreiðingarnar frá kervisskoðaranum, skulu vit ma. hava í huga, at:

- frágreiðingarnar snúgva seg bert um tann partin av KT-kervinum hjá TAKS, sum verður umsitin av Elektron, ikki um partin, sum TAKS sjálvt hevur beinleiðis ábyrgdina av,
- niðurstøðurnar hjá kervisskoðaranum eru allar treytaðar av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á TAKS eru nøktandi,
- tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar, eToll og innkrevjingarskipanin, eru millum tær nýggjastu skipanirnar, og tískil millum tær tryggastu og frægast

skjalfestu. Høvdu aðrar og eldri skipanir verið kannaðar, høvdu tað upp á seg verið fleiri viðmerkingar,

- skattaskipanin, sum er tann elsta og týdningarmesta skipanin hjá TAKS, sum er á Elektron, er ikki skoðað.

Eru viðurskifti, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisskoðarin ítøkilig tilmæli.

Við árslok 2009 vóru 21 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár

Við árslok 2008 vóru 22 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár.

Við árslok 2007 vóru 22 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár.

Við árslok 2006 vóru 21 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár.

Við árslok 2005 vóru 22 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár.

Við árslok 2004 vóru 12 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár.

Við árslok 2003 vóru 4 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár.

Kervisskoðarin er ikki nøgdur við, at so mong gomul tilmæli eru óavgreidd.

Av teimum sjey tilmælunum frá 2000, eru fýra framvegis óavgreidd. Eitt teirra er skjalfestingin av skattaskipanini, sum kervisskoðarin øll árini hevur sagt hevur høga raðfesting.

Í ársfrágreiðingini fyri 2003 skrivar kervisskoðarin, at skipanarskjølini til fleiri skipanir eru ófullfíggjað, og at tað ger støðuna ótrygga. Hesa viðmerking endurtekur kervisskoðarin í frágreiðingum fyri 2004, 2005, 2006, 2007, 2008 og aftur fyri 2009. Harafturat eru trygdaravritini av skipanarskjølunum (systemdokumentatión), ikki nøktandi, so tað kann gerast ómøguligt at endurskapa skipanirnar hjá TAKS á Elektron, um illa vil við.

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er tó, at roknskapargrannskoðanin kann líta á, at dátu-, kervis- og rakstrartrygdin á Elektron er álítandi. Tað er tó treytað av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á TAKS eru nøktandi.

Sum nevnt í frágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini fyri 2008, vóru stórir veikleikar í innaneftirlitinum hjá TAKS. Ein innanhýsis váðameting hjá TAKS fyri 2010 er komin til sama úrslit.

Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað innaneftirlitið á TAKS í ár.

4 Fiskivinnumál

4.1 Fiskimálaráðið (LG 2009/205-0111)

Í einum broti í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 umrøddu vit aftur grannskoðanina av Fiskimálaráðnum í 2007.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd síðani 2001. Nógvar broytingar eru hendar, síðani reglugerðin varð gjørd, ma. bygnaðarbroytingar í ráðnum og broytingar í mannagongdum í sambandi við Búskaparskipan landsins. Í 2007 mæltu vit til at dagføra reglugerðina.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ætlanin er at endurskoða roknskaparreglugerðina fyri árslok 2010.

Umsiting av fiskiloyvum

Í august 2007 greiddi Fiskimálaráðið frá, at í sambandi við at umsita fiskiloyvi, hevði ráðið ikki lýst nakrar skrivligar mannagongdir.

Ráðið hevur ein lista við 11 punktum, sum siga, hvørjar upplýsingar ráðið skal hava fyri at kunna kanna eftir, um eigara- og avgerðarviðurskifti hjá feløgum eru í tráð við ásetingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í løtuni verður arbeitt við at orða mannagongdir. Arbeiðið fer at verða liðugt fyri árslok 2010.

Kassa- og peningastovnskonta

Fiskimálaráðið hevur peningastovnskontu, sum gjøld fyri fiskidagar og –loyvir verða goldin inn á. Kontan verður brúkt til at rinda útreiðslur til skeið oa. Ráðið hevur FR/VISA kort knýtt at kontuni.

Í august 2009 spurdi Landsgrannskoðanin, um Fiskimálaráðið hevði sett í verk mannagongdir fyri, hvussu ofta peningastovnskontan skuldi verða tømd í landskassan. Landsstýrismaðurin svaraði, at ráðið hevði ongar mannagongdir.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Fiskimálaráðið hevur í oktober 2010 víst á, at nógv økir á roknskapar- og bókhaldsøkinum hava verið niðurraðfest seinasta árið. Fiskimálaráðið vil fram til ársskiftið raðfesta hesi viðurskifti hægri, soleiðis at tær mest grundleggjandi reglugerðirnar og mannagongdirnar verða endurskoðaðar ella orðaðar.

4.2 Tilbúgvingarstovnurin (LG 2009/205-311)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Tilbúgvingarstovnin. Vit hava nøkur tilmæli.

4.2.1 Brunaumsjón Landsins

Í mars 2010 grannskoðaðu vit Brunaumsjón Landsins við støði í einum spurnablaði, sum vit frammanundan høvdu sent stovninum viðvíkjandi roknskapar-, lønar-, KT- og øðrum viðurskiftum.

Stovnurin er partur av Tilbúgvingarsamskipanini, sum umframt Brunaumsjón Landsins fevnir um Sjóbjargingarstøðina og Neyð- og Trygdartænastuna.

Brunaumsjón Landsins virkar eftir Ll. nr. 78 frá 12. juni 1986, um eldsbruna oa., og kunngerðum sambært lógini. Virkisøkið fevnir í samstarvi við kommunurnar í høvuðsheitum um almennu brunatrygdina í landinum.

Mál- og avriksstýring

Stovnurin hevur ikki skrásetingar, sum í nøgd og góðsku kunnu lýsa:

- hvat stovnurin avrikar,
- hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar (td. tíðarnýtsluna hjá starvsfólkunum).

Leiðslan heldur tað ikki kunna lata seg gera frammanundan at áseta ætlan um avriks-lista, og hon hevur tí ongar ætlanir um at seta mál- og avriksstýring í verk.

Roknskaparviðurskifti

Stovnurin hevur onga roknskaparreglugerð. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at roknskaparreglugerð verður gjørd fyri stovnin.

Brunaumsjón Landsins hevur onki ognaryvirlit. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at ognaryvirlit verður gjørt.

Lønarviðurskifti

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking oø. Onki var at finnast at.

Brunaumsjón Landsins nýtir setanarpolitikkin hjá tí almenna. Stovnurin brúkar eina tíðarskrásetingarskipan, har starvsfólk skráseta, nær tey koma og fara, sjúku, fundir oa.

Upplýsingar og KT-viðurskifti

Brunaumsjón Landsins hevur upplýsingar, sum hava týdning fyri virksemi stovnsins, men flestu upplýsingarnar hjá stovninum verða goymdar aðrastaðni eisini. Avrit av øllum málunum verða goymd hjá kommununum.

Umsitingin av KT-kervinum er í Fiskimálaráðnum.

Leiðslan á Brunaumsjón Landsins hevur ikki orðað nakran trygdarpolitikk, ella gjørt nakra váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu.

4.2.2 MRCC Tórshavn (Sjóbjargingarstøðin)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað MRCC Tórshavn.

Stovnarnir MRCC og Tórshavn Radio eru lagdir saman í ein stovn, og virka undir sama leiðara.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina hevur Tórshavn Radio ma. lurtiskyldu og vaktarhald sambært altjóða viðtøkum. Eisini avgreiðir stovnurin samskiftið um læknahjálp og samskiftið í sambandi við leiting og bjarging á landi.

MRCC hevur ábyrgdina av at samskipa alla leiting og bjarging á føroyskum sjóøki oa.

Mál- og avriksstýring

Leiðslan heldur tað ikki vera gjørligt frammanundan at áseta ætlan um avrikslista, tí uppgávurnar hjá MRCC eru at taka sær av at veita hjálp í neyðstøðum og í brádliga íkomnum støðum, sum illa ber til at vita nakað um frammanundan. Leiðslan hevur ongar ætlanir um at seta mál- og avriksstýring í verk fyri MRCC.

Landsgrannskoðanin mælti Tilbúgvingarstovninum til at taka spurningin upp við aðalráðið, um stovnurin kemur undir ásetingarnar í § 7, stk. 1, í Roknskaparkunngerðini, samanber § 7, stk. 4. Leiðslan hevur kunnað um, at spurningurin verður tikin upp við Fiskimálaráðið.

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at av tí at Tilbúgvingarstovnurin hevur framt bygnaðarbroytingar, er onki gjørt við mál- og avriksstýring fyri 2011 hjá MRCC/Tórshavn, Tórshavn Radio og Brunaumsjón Landsins. Mál- og avriksstýring verður sett í verk fyri 2012.

Roknskaparviðurskifti oa.

Tilbúgvingarstovnurin hevur onga roknskaparreglugerð. Stjórin greiddi frá, at roknskaparreglugerð er í gerð.

Stovnsleiðarin góðkennir mánaðarroknskapirnar regluliga.

Tilbúgvingarstovnurin hevur ikki dagført ognaryvirlit. Leiðslan kunnaði um, at hon fór í holt við at gera ognaryvirlit.

Søla av vørum og tænastum, høvuðskontu nr. 5.31.1.01 (MRCC)

Í 2009 hevur MRCC havt 180 t.kr. í inntøkum frá skipum, sum skjóta seismikk. Skipini gjalda 3.600 kr. um dagin. Í 2008 var inntøkan 694 t.kr.

Heimildin at krevja gjaldið er sambært standardforkanningarloyvinum “við atliti at leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum”, sum er gjørt við heimild í Ll. nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi.

Í standardforkanningarloyvinum, pkt. 6, er ásett, at “loyvishavarin rindar útreiðslur, sum standast av virkseminum hjá fiskiveiðiumboðnum”.

Upphæddin, sum MRCC krevur frá seismikkskipum, varð ásett frá fyrstan tíð, tá ið loyvir skuldu gevast at skjóta seismikk. Gjaldið verður avtalað munnliga millum

reiðaríini og MRCC, og er galdandi frá tí, at fiskiveiðiumboðið fer umborð í Føroyum. Umframt fasta gjaldið pr. dag rinda reiðaríini fyri ferðaútreiðslurnar.

Av gjaldinum, sum MRCC fær frá reiðaríunum, skal stovnurin rinda fiskiveiðiumboðunum samsýning og rinda fyri at tryggja umboðini. MRCC hevur avtalur við fiskiveiðiumboðini um samsýning, sum er 2.600 kr. um dagin.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, eftir hvørjari heimild MRCC hevur yvirskot av endurgjaldinum, og um nakrar útrokningar eru, sum vísa, hvussu komið er fram til ásetta gjaldið á 3.600 kr. um dagin.

Í mai 2010 greiddi MRCC frá, at gjaldið á 3.600 kr. um dagin liggur á sama støði, sum í grannalondunum, og at tað ikki finst nøkur greið heimild at hava inntøkur av slíkum.

Stovnurin kunnaði um, at tað er ikki sørt av umsiting av virkseminum, og at tey tí hava kravt 1.000 kr. um dagin til útreiðslur, ið eru beinleiðis tongdar at tí virkseminum.

MRCC kunnaði eisini um, at ivasamt er, um tað er uppgáva hjá tí almenna at umsita eygleiðaraskipanina, og at støða tí í næstum verður tikin til at flyta virksemið til privat at umsita.

Í juni 2010 hevur Landsgrannskoðanin biðið landsstýrismannin í fiskivinnumálum um viðmerkingar. Vit hava onki svar fingið.

Stakroyndir av bókingum/konteringum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur skjøl í Búskaparskipan Landsins fyri 2009. Vit mæltu til nakrar rættingar.

Lønir og starvsfólkaviðurskifti

Starvsfólkini á MRCC eru tænastumenn, og verða lønt í 28. lønarflokki í avtaluni millum Tænastumannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Landsstýrismaðurin setur bæði deildarleiðaran og starvsfólkini.

Starvsfólkini hjá Tórshavn Radio eru útbúgvin sum telegrafistar. Tey verða lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, við einari persónligari viðbót, sum varð avtalað, tá ið Fiskimálaráðið í 2003 tók yvir Tórshavn Radio.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um lønirnar eru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking oø. Vit hava onki at finnast at.

Upplýsingar og KT-viðurskifti

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at deildarleiðarin roynir at tryggja eftirlitsumhvørvið. Td. er elektronisk lásaskipan sett í verk og munandi avmarkingar eru settar fyri, hvør hevur atgongd til eftirlitshølið.

Váðameting

Ein váðameting varð gjørd í 2005, og leiðarin hevur greitt frá, at hann nú fór í holt við at fáa hana dagførda.

Trygdarpolitikkur

MRCC hevur trygdarreglur í einari trygdarhandbók, sum byggir á ISO 9001 góðkenning.

Stovnurin er klassaður av Norsk Veritas.

Persónsupplýsingar

Leiðslan kunnaði um, at allar samtalur, sum fara um MRCC, verða bandaðar. Fráboðanir og annað samskifti verður skrásett manuelt. Skrásetingarnar og bandaðu samrøðurnar verða goymdar í ein mánað uttan so, at biðið verður um at tilfarið verður goymt í longri tíð, td. til sjóforhoyr.

Stovnurin skrásetur telefonsamrøður á ljóðfílum. Í samrøðunum sæst telefonnummar til og frá, og nær samrøðan hevur verið. Innihaldið í samtaluni verður í stuttum skrivað í loggin.

Tekjan á bygninginum á Tinghúsvegi 64

Útreiðslur til nýggja tekju

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 28.762 kr. fyri arkitektaarbeiði *"viðvíkjandi: nýggjari tekju til bygningin, Tinghúsvegur 64",* bókaðar á standardroknskaparkontu 1651 "umvæling og viðlíkahaldsútreiðslur bygningar", stovnsnummar 109520 "Fiskimálaráðið". Landsgrannskoðanin spurdi, hví útreiðslan er bókað har. Vit fingu onki svar, men leiðslan vísti til Fiskimálaráðið.

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at ráðið bað arkitekt gera uppskot um, hvussu nýggj tekja kundi verða gjørd oman á bygningin. Tí halda tey, at Fiskimálaráðið eigur at rinda útreiðsluna.

Støðan viðvíkjandi ótættari tekju

Í desember 2009 greiddi Fiskimálaráðið í skrivi til fíggjarnevnd Løgtingsins frá, at metingar vóru gjørdar, hvat tað fór at kosta at tekja bygningin á Tinghúsvegi 64 av nýggjum. Metingarnar vístu, at kostnaðurin var ávikavist 2,5 ella 3,5 mió.kr. Ráðið mælti til at velja dýraru loysnina.

Leiðslan á Tilbúgvingarsamskipanini hevur í mari 2010 greitt frá, at tekjan nú er tøtt, og at tey hava ongar ætlanir um at skifta tekjuna út. Ynski hjá leiðsluni er, at ein hædd verður bygd oman á bygningin, tí so slepst undan slættari tekju, sum altíð vísir seg at geva trupulleikar við lekum. Tey hava ikki trupulleikar av fukti ella øðrum í bygninginum.

Fiskimálaráðið hevur í oktober 2010 boðað frá, at tekjan lekur aftur. Fiskimálaráðið hevur kunnað Landsverk, sum í 2010 tók yvir ábyrgdina av viðlíkahaldi av almennum bygningum, um standin á bygninginum á Tinghúsvegi 64.

4.3 Búnaðarstovan (LG 2009/205-0332)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað Búnaðarstovuna, og hevur nøkur tilmæli.

Í frágreiðingum november 2008 og oktober 2009 til løgtingsgrannskoðararnar hevur Landsgrannskoðanin gjørt vart við viðurskifti um sakargjøld.

Búnaðarstovan hevur tvær deildir, "Almennar royndir og ráðgeving" og "Búnaðarstovan". Deildirnar hava hvør sína játtan í fíggjarlógini.

Almennar royndir og ráðgeving

Høvuðskonta nr. 5.33.2.03. (rakstrarjáttan), 2.747 t.kr. netto.
Endamálið við virkseminum er, við tíðarhóskandi jarðarbrúki sum máli, at kanna møguleikarnar at menna úrtøku, dygd og virkni, fram um alt í djórahaldi og í fóðurgerð.

Búnaðarstovan

Høvuðskonta nr. 05.33.2.03 (rakstrarjáttan), 2.884 t.kr. netto.
Búnaðarstovan er skipað, sum ásett í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð", og hon fyrisitur alla almenna jørð Føroya, ið ikki er fyrisitin av ella skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni.

Búnaðarstovan fyrisitur eisini árligu studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna, sum verður veitt við heimild í Ll. nr. 32/2003 "um landbúnaðarstuðul" og sambært K. nr. 96/2003 "um stuðul til landbúnaðin".

Búnaðargrunnurin fíggjar raksturin av jarðarumsitingini, sum verður mett at kosta 2,8 mió.kr. Peningurin til endamálið er settur av á § 20: Inntøkur (høvuðskonta nr. 20.52.1.30). Landskassin fíggjar umsitingina av landbúnaðarstuðlinum og 100 t.kr. eru settar av til tað endamálið.

Innanvirkis roknskapur/mál og avriksstýring

Í 2009 hevur Búnaðarstovan ikki gjørt skrásetingar, sum í nøgd og góðsku kunnu lýsa, hvat stovnurin avrikar, og hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar.

Í 2010 hevur Búnaðarstovan gjørt mál og avrikssáttmála við Fiskimálaráðið. Stjórin greiddi í juli 2010 frá, at tey hava ikki enn mett um nádd úrslit, men tey eru nakað afturút í mun til ætlanirnar í mál- og avrikssáttmálanum.

Roknskaparviðurskifti oa.

Stovnurin hevur fleiri høvuðskontur. Felagsútreiðslurnar hjá báðum "deildunum" verða bókaðar á høvuðskontu 5.33.2.03: Búnaðarstovan. Parturin hjá "Almennum royndum og ráðgeving" verður kravdur eina ferð um mánaðin og bókaður sum inntøka hjá Búnaðarstovuni.

Roknskaparreglugerð

Búnaðarstovan hevur dagført roknskaparreglugerðina, sum er frá 2005, men hon er ikki góðkend av aðalráðnum.

Góðkenning av mánaðarroknskapum

Mánaðarroknskapirnir eru regluliga góðkendir.

Ognaryvirlit

Stovnurin hevur dagført ognaryvirlit.

Inntøkur

Søla av landsjørð

Sambært § 9 í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð" er Búnaðarstovuni heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils-, ídnaðar-, havbúnaðar-, ítrótta- og frítíðarendamál. Harafturat er Búnaðarstovuni heimilað at selja festara innistøðu, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið. Inntøkan av jarðarsølu, sakargjøldum oa. verður flutt á serliga peningastovnskontu og verður flutt haðani beinleiðis til Búnaðargrunnin.

Prísurin á jarðarsølu er ásettur í fylgiskrivi til K. nr. 95/2007 "um umsiting av landsjørð". Sambært § 7, stk. 2, í kunngerðini skulu prísirnir endurskoðast í minsta lagi 3. hvørt ár, og teir skulu verða reguleraðir eftir prísgongdini á jørð.

Í frágreiðing í sambandi við grannskoðan í 2007 hevur Búnaðarstovan greitt frá, at galdandi siðvenjan hevur verið, at Búnaðarstovan (Jarðarráðið) hevur kravt helvtina av søluprísinum, tá ið leigutraðir ella partar av teimum hava verið seldar/frábýttar. Heimildin var, sambært Búnaðarstovuni, í servitutti á leigutraðunum.

Í 2009 hevur Búnaðarstovan frábýtt part av festi til arvingar eftir hesum helvtarbýti.

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina fyri 2009 stendur: *"Ætlanin er at fáa meira fyri almenna jørð. Lógarbroytingar skulu gerast fyri at røkka málinum at fáa 15 mió.kr. meira í landskassan av søluni."*

Í uppskotinum til eykajáttanarløgtingslóg fyri apríl 2009, stendur, at *"Hóast lógarverkið verður broytt í skundi, verður ikki hildið, at tað verður møguligt at fáa 15 mió.kr. í meirinntøkum av at selja landsjørð. Biðið verður um, at nettojáttanin, sum áður, verður útreiðsluneutral. Tá ið lógarverkið kring um sølu av landsjørð er broytt, verður møguligt at gera eina meting av, hvussu stórar inntøkur landskassin kann fáa av søluni av landsjørð."*

Inntøkujáttanin til sølu av landsjørð 2009 varð lækkað 15 mió.kr., til 10 mió. kr.

Landsgrannskoðanin hevur spurt Búnaðarstovuna, hvat er gjørt fyri at fáa meira fyri almenna jørð.

Í september 2010 hevur stjórin kunnað um, at málið verður tikið upp við Fiskimálaráðið.

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at *"sum tað sæst í løgtingsfíggjarlógini fyri 2010, er ætlanin, at fáa meira fyri almenna jørð, slept."* Í fíggjarlógini 2010 er roknað við 10 mió.kr.

Sakargjøld

Í frágreiðing til Løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 umrøddi Landsgrannskoðanin sakargjøld í sambandi við sølu av landsjørð. Sambært § 11 í Ll. nr. 45/2007

"um landsjørð" ásetur landsstýrismaðurin sakargjøld, sum Búnaðarstovan kann krevja. Tað hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum ásett í § 11 í K. nr. 95/2007 soleiðis:

> *"Búnaðarstovan ásetur sakargjøld í sambandi við sølu av jørð, makaskifti, marknaumskipan, servituttstriking, festaraskifti og sáttmálar.*
>
> *Stk. 2. Sakargjøldini skulu endurskoðast í minsta lagi triðja hvørt ár."*

Landsgrannskoðanin helt ikki, at landsstýrismaðurin kundi lata lógarásettu skylduna at áseta sakargjøld frá sær til Búnaðarstovuna at áseta.

Í mai 2009 greiddi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum frá, at málið *"verður viðgjørt eina tíð afturat"* fyri at fáa staðfest:

- um lógarbroyting skal verða gjørd,
- um kunngerðin verður broytt, ella
- um ein skipað mannagongd kann verða sett í verk, ið samsvarar við orðingarnar í verandi lóg og kunngerð.

Spurdur, greiddi stjórin á Búnaðarstovuni í juli 2010 frá, at onki var hent á tí økinum.

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at av ymiskum orsøkum er higartil onki gjørt við málið. Fiskimálaráðið sigur eisini, at tey hava heitt á Búnaðarstovuna at taka málið upp, og at tað vónandi verður loyst í næstum.

Søla av kjøti:

Búnaðarstovan hevur um 180 áseyðir. Tey hava avtalu við tveir bøndur um at fletta seyðin; teir skiftast at fletta annaðhvørt ár. Harumframt hevur stovnurin nøkur ungneyt, sum liður í royndarvirksemi stovnsins. Eftir lokna roynd, verða neytini slaktað og seld.

Búnaðarstovan lýsir kjøtið til sølu í føroysku bløðunum fyri áleið sama prís, sum bøndurnir selja kjøtið fyri. Nakað av søluni er kontant, meðan restin verður fakturerað um faktureringsskipanina hjá Føroya Gjaldstovu.

Ísáing:

Búnaðarstovan hevur gjørt avtalu við Mjólkarvirki Búnaðarmanna um, at gjaldið, sum bøndurnir rinda fyri ísáing, verður eftirhildið í mjólkaravrokningini millum bóndan og MBM og avroknað Búnaðarstovuni eina ferð um mánaðin.

Lønar- og starvsfólkaviðurskifti

Landsgrannskoðanin kannaði lønarútgjaldingar í 2009, og hevur samanhildið setanarskriv, prógv oa. við galdandi lønarsáttmálar. Vit hava onki at finnast at.

Stovnurin brúkar skipanina TotalView til at skráseta arbeiðstíðina, t.v.s. nær starvsfólk koma og fara, fráveru, feriu oa.

Stjórin og deildarleiðararnir hava fartelefonir frá stovninum. Landsgrannskoðanin heitti á leiðsluna um at taka støðu til rundskriv nr. 1/2002 frá Løgmansskrivstovuni, um nýtslu av fartelefonum, og til rundskriv nr. 2/2001 frá TAKS, um fartelefon.

Búnaðarstovan eigur tríggjar persónbilar, sum hava verið brúktir til arbeiðsbrúks. Bilarnir standa inni í einum bygningi. Stjórin heldur ikki, at stovnurin hevur brúk fyri bilunum longur, og hann hevur tí roynt at selt teir, men tað hevur ikki eydnast.

Stovnurin hevur gjørt ískoyti til almenna starvsfólkapolitikkin um arbeiðsklæði, maskinur, amboð og bilar í arbeiðsørindum. Í starvsfólkapolitikkinum verður sagt, at bilar stovnsins mugu einans verða brúktir í arbeiðsørindum.

Landbúnaðarstuðul

Stovnurin umsitur høvuðskontu 5.33.2.10, Landbúnaðarstuðul. Á hesari høvuðskontu eru í 2009 játtaðar 12.560 t.kr.

Niðanfyri hevur landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini árini 2004-2009:

1.000 kr.

	2004	2005	2006	2007	2008	2009	J 2010
Mjólk	7.112	7.560	7.677	7.835	7.593	7.819	7.550
Neytakjøt	766	904	789	614	609	680	700
Seyðakjøt	1.631	1.753	1.752	1.864	1.929	1.982	1.550
Stráfóður	1.191	1.012	1.256	1.154	1.163	1.159	1.010
Súrhoyggjabrunn	0	0	32	0	0	0	50
Velting vm.	782	726	638	485	671	294	550
Húsdýralógin	65	68	60	77	62	71	70
Avloysaraskipan	435	480	480	480	481	480	480
Føroysk húsdjór	50	50	69	50	50	75	50
Tilsamans	**12.032**	**12.553**	**12.753**	**12.559**	**12.558**	**12.560**	**12.010**

Landbúnaðarstuðul verður veittur við heimild í Ll. nr. 32/2003 “um landbúnaðarstuðul” og sambært K. nr. 96/2003, “um stuðul til landbúnaðin”. Stuðulin er býttur á undirkontur til hvørt slagið av studningi.

Stuðul verður veittur til mjólk, neytakjøt, seyðakjøt, stráfóður, velting, djórahald, avloysaraskipan og til føroysk húsdjór. Stuðulin er treytaður av, at umsøkjarin er bókhaldsskyldugur og MVG skrásettur (undantikið undirkontu 10, sum er stuðul til at varðveita føroysk húsdjór).

Búnaðarstovan lýsir í bløðunum, at bøndur, sum halda seg hava rætt til at søkja um stuðul til neytakjøt og til stráfóður, kunnu søkja.

Mjólk

Stuðul til mjólk verður latin sambært § 2 í kunngerðini um stuðul til landbúnaðin. Stuðulin verður latin til mjólk, sum er í 1. flokki, og til flutning.

Treytirnar fyri at fáa stuðul eru:

Stk. 2. Studningurin verður útgoldin mjólkarvirki sambært váttaðum innvigingarlista.

Stk.3.Flutningsstudningur verður veittur mjólkarvirki eftir somu treytum, sum mjólkarstudningur, bæði hvat viðvíkur góðsku og mongd.

Búnaðarstovan fær eina ferð um mánaðin uppgerð frá MBM yvir samlaðu innvigaðu mjólkina, og eina uppgerð um árið fyri hvørt fjósið.

Í 2009 var stuðulin til mjólk 0,65 kr. fyri liturin og stuðulin til flutning 0,40 kr. fyri liturin.

Neytakjøt

Treytin fyri at lata stuðul er, sambært § 3 í kunngerðini um "stuðul til landbúnaðin", at neytini eru eldri enn 15 mánaðir. Heimilað er at lata hægri stuðul til neytakjøt, sum kemur frá útjaðaraøkjum. Í 2009 var stuðulin 25 kr/kg fyri neytakjøt frá útjaðarunum og 8 kr/kg fyri neytakjøt annars.

Á umsóknarblaðnum, um stuðul til neytakjøt, verður umsøkjarin ma. biðin um at vátta, at hann til eina og hvørja tíð kann skjalprógva, at neytini eru seld eftir handilsligum treytum ella liggja á goymslu.

Landsgrannskoðanin spurdi, um treytirnar "um sølu eftir handilsligum treytum og/ella liggja á goymslu" ikki áttu at verið ásettar í kunngerðini ella í mannagongdunum at lata studning.

Í september 2010 hevur stjórin svarað, at í avtaluni í 2010 millum Búnaðarstovuna og Fiskimálaráðið um "Mál og avrik", er stuðulsskipanin til neytakjøt sett undir áherðsluøkir, og Búnaðarstovan skal endurskoða stuðulsskipanina og gera tilmæli til landsstýrismannin um broytingar.

Eisini segði stjórin, at hann tekur til eftirtektar, at kravið í umsóknarblaðnum um handilsligar treytir fer út um verandi heimildir. Tað eigur at verða tikið við í endurskoðanina av stuðulsskipanini.

Seyðakjøt

Studningur verður latin til seyðakjøt, svarandi til 100% av sølu-MVG hjá bóndunum, sambært § 4 í kunngerð um "stuðul til landbúnaðin". Treytin fyri at lata stuðul er, at bóndin hevur latið MVG-uppgerð til TAKS, og hevur goldið MVG'ið.

Búnaðarstovan hevur ikki gjørt mannagongdir at umsita studningin.

Í juli 2010 greiddi stjórin frá, at játtanin í 2009 til stuðul helt ikki, og at Fiskimálaráðið hevur biðið hann gera uppskot at broyta kunngerðini, fyri at kunna halda játtanina í 2010.

Stráfóður

Treytin at lata studning er, sambært § 5 í kunngerðini um "stuðul til landbúnaðin", at talan er um egið framleitt stráfóður, sum verður brúkt í neytahaldinum. Eisini kann studningurin verða treytaður av, at fóðrið lýkur ásett góðskukrøv.

Búnaðarstovan ger ein býtislykil til studningin, og býtir játtaðu studningsupphæddina millum umsøkjararnar eftir nøgd av stráfóðri og talið á neytum.

Í umsóknarblaðnum um studning til stráfóður hevur Búnaðarstovan ásett treytir til dygd oa. Búnaðarstovan ger stakroyndir viðvíkjandi dygd og nøgd av fóðrinum.

Velting

Studningur kann verða veittur sambært § 7 í kunngerðini um "stuðul til landbúnaðin".

Treytin fyri útgjaldi er, at peningur er játtaður á løgtingsfíggjarlógini, tá ið studningurin skal gjaldast út.

Góðkenning skal vera til skjals, og studningurin skal vera játtaður, áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður goldin út, tá ið bøurin er blivin grønur, t.v.s. at tað kann taka eini 2 ár, frá tí at lendið er velt, til studningurin verður goldin umsøkjaranum.

Dyrkaða økið verður sýnað og skrásett, og upplýsingarnar verða goymdar í kortskipanini hjá Umhvørvisstovuni.

Koltursætlanin

Á høvuðskontu 5.33.2.14. er játtaður stuðul til Koltursætlanina, 200 t.kr. um árið árini 2006-2010. Sambært sáttmála millum Búnaðarstovuna og Sp/F Koltur skal felagið lata Búnaðarstovuni grannskoðaða uppgerð í seinasta lagi 1. juni í hvørjum eftirfylgjandi ári, har tað greitt gongur fram, at studningurin verður nýttur til røttu endamálini sambært góðkendu rakstrarætlanini.

Stjórin kunnaði um, at uppgerðirnar eru latnar Búnaðarstovuni.

Serstøk uppgerð yvir umsjón og viðlíkahald av fornminnum í Koltri 2009 og ársfrásøgn fyri Sp/F Koltur vísa, at pr. 31. desember 2009 standa 300.477 kr. sum “salda, konta hjá Búnaðarstovuni”. Upphæddin stavar frá útgoldnum studningi, sum ikki varð brúktur.

Sambært sáttmálanum millum Búnaðarstovuna og Sp/F Koltur skal ikki nýttur studningur rindast aftur til landskassan, tá ið sáttmálaskeiðið er av, t.e. 31. desember 2010.

Upplýsingar og KT-viðurskifti

Búnaðarstovan brúkar KT-skipanirnar hjá Landsnet, og hevur tískil trygdarskipanirnar, sum KT-fyrisitingin umsitur.

Váðameting

Búnaðarstovan hevur ikki gjørt váðameting. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at váðameting verður gjørd.

Trygdarpolitikkur

Í juli 2010 greiddi stjórin frá, at KT-fyrisitingin í løtuni arbeiðir við at gera uppskot til politikk fyri tann partin av skipanini hjá Búnaðarstovuni, sum KT-fyrisitingin ikki tekur sær av.

Persónsupplýsingar

Persónsupplýsingar verða bara viðgjørdar í sambandi við starvsfólkamál.

Trygdartiltøk

Búnaðarstovan goymir øll síni skjøl á staðnum. Avrit av festibrøvum, skeytum oø. eru síðani 2005 goymd talgild og í pappíri. Skjøl eru annars heilt aftur til 1937. Tey eru goymd í hølunum hjá Jarðargrunninum í Tórshavn. Arkivið er í góðkendari goymslu á stovninum. Flestu skjølini finnast eisini hjá Tinglýsingini.

Umframt skjalagoymslu hevur Búnaðarstovan eisini aðra goymslu, so sum ílegur frá føroyskum tarvum og rossum. Sáðið verður goymt í kølitanga í evni, sum ger, at kuldin er um 190 stig. Talan er um einastu goymslu av sínum slagi yvirhøvur.

4.4 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2009/205-0342)

Í oktober 2009 umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan í Fiskiveiðieftirlitinum, og hevði nøkur tilmæli og spurningar. Í september 2010 spurdi Landsgrannskoðanin Landsstýrismannin, hvat eftirsíðan er hent í málinum.

Roknskaparviðurskifti oa.

Roknskaparreglugerð

Í august 2009 kunnaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálinum um, at Fiskiveiðieftirlitið skuldi fara undir at endurskoða roknskaparreglugerðina, sum er fleiri ára gomul.

Inntøkur

Í august 2009 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at ráðið ikki hevur nakrar skrivligar reglur um heimildir, skrásetingar, avsláttir og kredittir, tá ið ræður um inntøkur, men at ráðið væntar, at *"manglandi reglurnar í inntøkusíðuni verða sannlíkt fevndar av avriks-sáttmálanum fyri 2010."*

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið boðað frá, at reglur um inntøkurnar hjá Fiskiveiði-eftirlitinum eftir ætlan fara at verða tiknar upp í sambandi við mál- og avrikssáttmálan fyri 2011.

Dagpeningur oa.

Í desember 2008 gjørdi Landsgrannskoðanin Fiskiveiðieftirlitið vart við, at Fiskiveiði-eftirlitið hevur goldið ov nógvan dagpening oa. til starvsfólk, ið ferðast fyri stovnin. Í februar 2010 hevur Fiskimálaráðið kunnað Landsgrannskoðanina um, at ov nógv útgoldið endurgjald fyri ferðing er kravt aftur frá starvsfólkunum.

Arbeiðsklæðir

Í mai 2009 heitti Landsgrannskoðanin á leiðsluna í Fiskiveiðieftirlitinum um at kanna, um "poengskipanin", sum stovnurin brúkar viðvíkjandi arbeiðsklæðum, svarar til galdandi rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 1998.

Í august 2009 hevur Fiskimálaráðið svarað, at ráðið hevur heitt á Fiskiveiðieftirlitið um at kanna poengskipanina.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at málið hevur ikki verið raðfest, men at Fiskimálaráðið fram til árskiftið fer at endurskoða mannagongdina.

4.5 Havstovan (LG 2009/205-0343)

Í oktober 2009 umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan á Havstovuni. Lands-grannskoðanin hevði nøkur tilmæli og spurningar.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerð er gjørd í 2002, men er ikki dagførd. Reglugerðin tekur ikki hædd fyri verkætlanunum, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum og øðrum. Landsgrannskoðanin mælti til, at reglugerðin varð dagførd.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum greitt frá, at arbeitt verður við at dagføra reglugerðina.

Inntøkur

Á høvuðskontu 5.34.3.01 “Verkætlanir” hjá Havstovuni eru í 2008 bókaðar ávikavist 2,8 mió.kr. í vanligum flytingarinntøkum og 2,5 mió.kr. í innanhýsis flytingum frá almennum myndugleikum. Í fíggjarlógini var roknað við ávikavist 675 t.kr. og 575 t.kr. Nakað tað sama gjørdi seg galdandi í 2007.

Í august 2009 spurdi Landsgrannskoðanin, hví roknaða inntøkan í fíggjarlógini ikki var dagført, og vit bóðu landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um viðmerkingar.

Í oktober 2009 svaraði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, at Fiskimálaráðið hevði ikki givið sær far um, at 100% samsvar ikki var millum játtan á nýtslu og undirkontum. Ráðið fór at taka hetta mál upp til næstu fíggjarlógarviðgerð.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum boðað frá, at Fiskimálaráðið hevur gjørt tillagingar til undirkontu í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2011, soleiðis at upphæddirnar, sum áður vórðu bókaðar á Høvuðskontu 5.34.3.01 “Havstovan” og undirkontu 40 “Inntøkufíggjað virksemi”, nú eru fluttar til undirkontu 45 “Verkætlanir” á somu høvuðskontu.

Ognaryvirlit

Stovnurin hevði ikki ognaryvirlit, sum lýkur treytirnar í § 20, stk. 2, í K. nr. 22/2007 um roknskaparverk landsins ot.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Havstovan hevur ognaryvirlit.

Journalviðurskifti

Havstovan hevur journalskipan, ið nevnist Info Organizer. KT-fólk hjá Fróðskaparsetrinum umsita skipanina. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar mannagongdir.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt verður við at gera skrivligar mannagongdir.

Fríir ágóðar

Nøkur starvsfólk hava fartelefonir frá stovninum. Landsgrannskoðanin hevur heitt á leiðsluna um at taka støðu til rundskriv nr. 1/2002 frá Løgmansskrivstovuni “um nýtslu av fartelefonum” og til rundskriv nr. 2/2001 frá TAKS “um fartelefon”.

Í oktober 2009 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum greitt frá, at Fiskimálaráðið er varugt við trupulleikarnar viðvíkjandi privatari nýtslu av fartelefon á øllum stovnum, og arbeiðir í løtuni við at gera reglur.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at leiðslan á Havstovuni hevur kunnað øll síni starvsfólk, sum hava fartelefonir frá stovninum, um treytirnar við at hava fartelefon. Havstovan hevur víst starvsfólkunum til rundskrivini frá ávikavist TAKS og Løgmansskrivstovuni.

Stuðul

Havstovan letur stuðul av høvuðskontu 5.34.3.01 “Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota”, 400 t.kr. í 2008. Heimildin er í Ll. nr. 72/1996. Havstovan hevur ikki gjørt nakrar

reglur fyri málsviðgerðini at gjalda út stuðul. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at reglur verða gjørdar.

Í oktober 2009 vísir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum á, at:

> *"Sambært § 25 í L.l. nr. 42 frá 2009 er tað álagt landsstýrismanninum í fíggjarmálum at áseta reglur hesum viðvíkjandi".*

Landsgrannskoðanin er samd við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, at tað er álagt landsstýrismanninum í fíggjarmálaráðnum, eftir § 25, stk. 2, í Ll nr. 42, frá 4. mai 2009 "um Landsins Játtanarskipan", at áseta reglur um stuðul, har reglur ikki longu eru ásettar í ella sambært lóg. Tó skal Landsgrannskoðanin vísa á, at tað áliggur avvarðandi landsstýrismanni í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann tí ikki frásiga sær skylduna at syrgja fyri, at ráðið og stovnar tess gera umsitingarligar leiðreglur.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Havstovan hevur gjørt reglur fyri málsviðgerð í sambandi við at stuðul verður goldin út.

KT-trygd oa.

Havstovan hevur ørgrynni av upplýsingum, sum hava stóran týdning fyri samfelagið sum heild.

Leiðslan á Havstovuni hevur orðað trygdarpolitikk. Trygdaravrit verða javnan tikin av dátum hjá stovninum. Royndir at endurskapa dátur hava eisini riggað. Starvsfólk hava lutvísa atgongd til dátugrunnar heimaníframá, og reglur eru gjørdar um tað.

Váðameting er gjørd av persónsupplýsingum á Havstovuni. Leiðslan kunnaði um, at stovnurin er næstan komin á mál, so tey lúka tilmælini um trygdartiltøk.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Havstovan ger skrivligar reglur um trygdartiltøk, fastar mannagongdir um at broyta loyniorð til teldurnar, og at telduskíggin verður læstur sjálvvirkandi.

Í oktober 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fiskimálaráðið hevur ikki nakað skipað eftirlit við KT-trygdini á stovnum Fiskimálaráðsins, men arbeitt verður við tí.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum boðað frá, at Havstovan hevur skrivligar mannagongdir "KT-reglur fyri Havstovuna", og at telduskíggjarnir verða læstir sjálvvirkandi. Ongin føst mannagongd er gjørd um at broyta loyniorð.

4.6 Trygdarmiðstøðin (LG 2009/205-0351)

Í oktober 2009 umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan á Trygdarmiðstøðini, og hevði nøkur tilmæli og spurningar. Í september 2010 hevur Landsgrannskoðanin spurt landsstýrismannin, hvat eftirsíðan er hent í málinum.

Roknskaparviðurskifti

Trygdarmiðstøðin hevði eina gamla roknskaparreglugerð, sum ikki var dagført síðani 2001.

Í oktober 2009 greiddi Fiskimálaráðið frá, at arbeitt varð við málinum at gera roknskaparreglugerðir fyri ráðið og allar stovnar undir ráðnum, men arbeiðið var ikki liðugt. Eisini kunnaði Fiskimálaráðið um, at arbeitt varð við at fáa greiðar reglur fyri skilnað millum tey, sum gjalda út og tey, sum bóka.

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at ongin nýggj roknskaparreglugerð er gjørd fyri Trygdarmiðstøðina.

Bankakontur, netbanki og gjaldkort

Í juni 2009 heitti Landsgrannskoðanin á leiðsluna á Trygdarmiðstøðini um at fáa viðurskiftini í rættlag viðvíkjandi gjaldkorti og bankakontum, soleiðis at tey samsvara við reglurnar í roknskaparkunngerðini og við reglurnar í rundskrivi um nýtslu av gjaldkortum.

Í oktober 2009 vísti Fiskimálaráðið á, at ráðið og Trygdarmiðstøðin arbeiddu við at gera roknskaparreglugerðir fyri Fiskimálaráðið og Trygdarmiðstøðina, og at í tí sambandi varð eisini hugt eftir mannagongdunum viðvíkjandi nýtslu av gjaldkortum.

Í september 2010 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin:

- eru mannagongdirnar at nýta gjaldkort gjørdar, og
- nær eru bankakonturnar seinast tømdar í landskassan

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at ongar mannagongdir eru gjørdar fyri at tøma bankakontur. Bankakonturnar vórðu seinast tømdar í landskassan í februar 2010.

Prísáseting á trygdarskeiðum

Í oktober 2009 kunnaði Fiskimálaráðið um, at ætlanin var at lóggeva, at Trygdarmiðstøðin kundi taka ein prís fyri trygdarskeiðini, sum lá undir veruliga kostnaðinum.

Í oktober 2010 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at *"tað er landsstýrismaðurin í vinnumálum, sum hevur heimild til at lóggeva ein prís, sum liggur undir veruliga kostnaðinum av at veita trygdarskeið. Í løtuni er prísurin á trygdarskeiðum kr. 4.500, og Fiskimálaráðið heldur, at hesin prísur liggur omanfyri veruliga kostnaðin."*

5 Vinnumál

5.1 Vinnumálaráðið (LG 2009/206-0111)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað Vinnumálaráðið. Samanumtikið var onki at finnast at roknskaparviðurskiftunum.

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað Vinnumálaráðið við støði í einum spurnablað um roknskapar-, lønar-, KT- og onnur viðurskifti, sum vit frammanundan høvdu sent Vinnumálaráðnum.

Endamál, virksemi og uppgávur

Sambært landsroknskapinum vóru útreiðslurnar í 2009 á høvuðskontu 6.11.1.06 “Vinnumálaráðið” stívliga 10 mió.kr.

Endamálið, virksemið og uppgávurnar hjá Vinnumálaráðnum eru orðaðar og lýstar í fíggjarlógini og á heimasíðuni hjá ráðnum.

Løglistin, sum verður lagdur fram á ólavsøku saman við løgmansrøðuni, vísir eisini, hvørjum lógaruppskotum Vinnumálaráðið skal arbeiða við í tingsetuni.

Tíðarskráseting

Vinnumálaráðið brúkar TotalView til tíðarskráseting. Skipanin verður bert brúkt til at kunna um, hvar starvsfólkini eru, og um tey eru tøk. Til ber sostatt ikki at síggja, hvussu stórur partur av tíðartilfeinginum fer til hvørt málið.

Roknskaparviðurskifti

Góðkenning av mánaðarroknskapum

Mánaðarroknskapurin hjá Vinnumálaráðnum skal ikki góðkennast av hægri myndugleika, men verður váttaður mótvegis Fíggjarmálaráðnum í sambandi við góðkenning av greinaroknskapinum.

Ognaryvirlit

Vinnumálaráðið hevur yvirlit yvir innbúgv. Virðið á innbúgvinum er ikki ásett.

Lønarumsiting, mannagongdir og eftirlit

Vinnumálaráðið nýtir setanar- og starvsfólkapolitikk landsins.

Mánaðarlønirnar verða kannaðar og stemmaðar av hvønn mánað.

Yvirtíð verður ikki goldin út, men skal verða avspákað.

Tað verður ikki kravt av starvsfólkunum í Vinnumálaráðnum, at tey skráseta sína arbeiðstíð neyvt í TotalView. Nøkur starvsfólk skráseta sína tíð neyvt, men annars verður skrásetingin bert nýtt til at kunna um, hvar starvsfólkini eru.

Stakroyndir av lønum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum grannskoðað lønarútgjaldingina hjá trimum starvsfólkum fyri september mánað 2009.

Samanumtikið vísir grannskoðanin, at lønirnar samsvara við galdandi reglur og lønartalvur.

Fríir ágóðar

Vinnumálaráðið rindar fyri fartelefonnýtsluna hjá fleiri starvsfólkum, treytað av, at telefonirnar bert verða brúktar til arbeiðsbrúks. Starvsfólkini, sum hava fartelefon frá Vinnumálaráðnum, skulu vera tøk uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Vinnumálaráðið fylgir við telefonnýtsluni, og kemur okkurt óvanligt fyri, verður kannað, hvør orsøkin er.

12 starvsfólk hava heimaarbeiðspláss, sum Vinnumálaráðið rindar internethald fyri.

Vinnumálaráðið heldur ikki, at starvsfólkini fáa fríar ágóðar, sum eiga at verða fráboðaðir skattamyndugleikunum.

Ferðauppgerðir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar ferðauppgerðir fyri fíggjarárið 2009. Onki var at finnast at.

Journalskipan

Vinnumálaráðið byrjaði um miðjan mai í ár at nýta journalskipanina 360, sum avloysti DocuLive skipanina. Vinnumálaráðið hevur ikki nakrar neyvar skrivligar mannagongdir fyri journalisering, tó eru orðingar um journalisering í starvsfólkahandbókini.

Stuðulsjáttanir oa

Kolagrevstur

Høvuðskonta 6.37.2.16 (stuðulsjáttan), 530 t.kr.
Jarðfeingi umsitur stuðul til kolagrevstur. Landsgrannskoðanin hevur spurt Vinnumálaráðið, um nakrar reglur eru ásettar fyri stuðlinum. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at ráðið hevur áður havt sáttmála við Roynds Kolasølu um kolagrevstur, og Vinnumálaráðið ætlar í hesum árinum at gera nýggjan sáttmála við Roynds Kolasølu í 2010, har ma. treytir verða settar fyri útgjaldinum.

Vinnuframagrunnurin

Høvuðskonta 6.37.2.02 (stuðulsjáttan), 4.250 t.kr.
Vinnumálaráðið umsitur stuðulsjáttan til Vinnuframagrunnin. Samskiparin hjá Vinnuframagrunninum er stovnsleiðari á játtanini. Stuðulin verður goldin út eina ferð um árið, tá ið Vinnumálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum roknskapi og eftirmeting av árinum fyri. Sambært Vinnumálaráðnum skuldu nýggjar mannagongdir verið settar í verk fíggjarárið 2010.

Fíggjarárið 2010 varð nýggja mannagongdin av misgáum ikki hildin. Játtaði stuðulin er goldin út í mars 2010, uttan at Vinnumálaráðið hevur fingið grannskoðaðan roknskap og eftirmeting. Vinnumálaráðið varð ikki kunnað um, at stuðulin varð goldin út. Sambært Vinnumálaráðnum er tað Gjaldstovan, sum hevur flutt peningin, tí tað hevur verið vanlig mannagongd undanfarin ár. Gjaldstovan hevur ikki gáa um broyttu reglurnar.

Vinnumálaráðið umhugsar, hvørt tað hevði verið rættari, at Vinnumálaráðið hevði stovnsleiðsluna til hesa stuðulsjáttan.

Javnstøðunevndin

Høvuðskonta 6.11.1.22 (rakstrarjáttan), 467 t.kr.
Vinnumálaráðið hevur boðað Javnstøðunevndini frá, at Vinnumálaráðið 1. juli 2010 tekur yvir stovnsleiðsluna.

Kvinnuluttøka í politikki

Høvuðskonta 6.11.1.48 (rakstrarjáttan), 402 t.kr.
Sambært fíggjarlógini 2009 er játtanin til Demokratia 400 t.kr. Vinnumálaráðið umsitur játtanina, og skrivarin í Demokratia fylgir við nýtsluni.

KT-viðurskifti

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at sambært rundskrivinum um KT-trygd, sum Vinnumálaráðið sjálvt hevur sent út í 2007 (upprunaliga í 2004), skuldu leiðslurnar í landsfyrisitingini fyri 1. apríl 2010 hava sett í verk KT-trygd, grundað á ávísar altjóða standardir.

Váðameting

Í 2008 varð gjørd ein váðameting av KT-viðurskiftunum í Vinnumálaráðnum. Í váðametingini eru fleiri atfinningar. Vinnumálaráðið hevur í onkrum føri sett í verk tiltøk, men samanumtikið er onki munagott gjørt at bøta um veikleikarnar, sum váðametingin vísir á.

Orðaður KT-trygdarpolitikkur

Vinnumálaráðið hevur ongan orðaðan KT-trygdarpolitikk. Í váðametingini, sum varð gjørd av KT-viðurskiftunum á Vinnumálaráðnum, varð “manglandi kunningartrygdarpolitikkur” nevndur sum ein hin mest týðandi váðin.

Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at ætlanin er at orða ein KT-trygdarpolitikk, sum framhald av váðametingini, og at arbeitt verður við ætlanini.

Í roknskaparreglugerðini og í starvsfólkahandbókini hjá Vinnumálaráðnum eru nakrar orðingar um KT-nýtslu og upplýsingar. Hesar orðingar venda sær til teirra, sum brúka KT-tilfeingi stovnsins.

Endurskapan av dátum

Vinnumálaráðið hevur ikki fastar mannagongdir um at endurskapa dátur.

Endurskapan av dátum til DocuLive

Ráðið hevur saman við KT-veitaranum hjá ráðnum endurskapað dátur frá trygdaravriti fyri at staðfesta, um back-up´ið virkar. Sambært KT-veitaranum virkar DocuLive back-up´ið.

Endurskapan av dátum til servarar hjá Vinnumálaráðnum

Saman við KT-fyrisitingini hevur Vinnumálaráðið endurskapað dátur frá servaranum hjá ráðnum, sum trygdaravrit var tikið av.

KT-leiðreglur og brúkaraváttan

Landsnet hevur orðað KT-leiðreglur. Ætlanin var, at starvsfólkini skuldu skriva undir eina brúkaraváttan, at tey høvdu lisið KT-leiðreglurnar. Henda mannagongd skuldi verða sett í gildi í februar 2010.

Vinnumálaráðið sendi øllum starvsfólkunum leiðreglurnar at lesa. Starvsfólkini hava svarað, at tey kunnu ikki góðtaka partar av leiðreglunum, tí at tað ber ikki til at halda krøvini, sum standa í teimum. Starvsfólkini hava tí ikki skrivað undir.

Í leiðreglunum um fartelefon og PDA[3] verður sagt, at trúnaðarupplýsingar mugu ikki verða sendar við sms-boðum, ella verða goymdar á fartelefonini ella á PDA´ini. Tað er ásetingin, "at trúnaðarupplýsingar mugu ikki verða goymdar á fartelefonini," sum starvsfólkini siga ikki letur seg gera at halda. Flestu fartelefonirnar hava beinleiðis atgongd til teldupostskipanina Outlook, og allir teldupostur, sum kemur inn á Outlook, sæst beinleiðis á fartelefonini, og tá kann ofta vera talan um trúnaðarupplýsingar.

Heimaarbeiðspláss

Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at 12 av 15 starvsfólkum hava heimaarbeiðspláss. Starvsfólkini eru kunnað um, at heimaarbeiðsplássini bert skulu verða nýtt í arbeiðshøpi.

Ongar serligar reglur eru ásettar um heimaarbeiðsplássini.

Persónligar upplýsingar

Eftir at sjóvinnuøkið varð lagt til Vinnumálaráðið at umsita, er Vinnumálaráðið kærumyndugleiki í avgerðum tiknar av Skipaeftirlitinum. Talan er um avgerðir um persónsupplýsingar, útflýggjan av vinnubrøvum, heilsugóðkenningum og undantaksloyvum. Slík persónsmál verða stovnað sum "persónsmál" í journalini, har bert málsviðgerin, aðalstjórin og journalleiðarin hava atgongd.

5.2 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2009/206-0373)

Í sambandi við grannskoðanina av Rúsdrekkasøluni hevur Landsgrannskoðanin víst á veikleikar í nøkrum mannagongdum. Landsgrannskoðanin hevur eisini mælt til at stemma av regluliga. Leiðslan arbeiðir við at bøta um viðurskiftini.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri fíggjarárið 2009.

Roknskapir 2007-2009

Rúsdrekkasølan ger roknskapin út frá egnari Navision bókhaldsskipan, sum verður brúkt í dagliga rakstrinum. Hvønn mánað verða samandrigin roknskapartøl send Føroya Gjaldstovu í telduposti at skráseta í Búskaparskipan Landsins. Sostatt er roknskapurin í Búskaparskipan Landsins ikki eins útgreinaður, sum innanhýsis roknskapurin. Serliga er fíggjarstøðan í Búskaparskipan Landsins munandi meira samandrigin enn hon í innanhýsis roknskapinum.

Niðanfyri hava vit sett upp roknskapin hjá Rúsdrekkasøluni árini 2007-2009, sambært Búskaparskipan Landsins (høvuðskonta 6.37.3.01):

[3] PDA = Private Digital Assistant

Rakstur 2007-2009

1.000 kr.

	2007	2008	2009
Inntøkur	115.158	117.862	118.556
Keyp av vørum og tænastum	87.831	88.017	89.414
Lønir oa.	10.344	11.631	11.892
Keyp av útbúnaði, netto	3.894	3.861	2.927
Leiga, viðlíkahald og skattur	1.882	1.729	1.866
Ymiskar rakstrarútreiðslur	544	851	726
Rentuútreiðslur oa.	23	40	0
Útreiðslur tilsamans	104.518	106.129	106.825
Úrslit	**10.640**	**11.733**	**11.731**

Fíggjarstøður 2007-2009

1.000 kr.

OGN	2007	2008	2009
Goymslur og áogn	16.197	20.106	12.947
Tøkur peningur	10.871	14.894	9.529
Ogn tilsamans	**27.068**	**35.000**	**22.476**

SKULD			
Útjavningarkonta	5.848	16.313	6.613
Flutt frá úrsliti	10.640	11.733	11.731
Stuttfreistað skuld	10.580	6.954	4.132
Skuld tilsamans	**27.068**	**35.000**	**22.476**

Roknskapartøl

Samlaðu inntøkurnar, t.e. vørusølan og rentuinntøkurnar, eru árini 2007 – 2009 øktar úr 115,2 mió.kr. til 118,5 mió.kr., harav eru rentuinntøkurnar øktar slakar 200 t.kr.

Samlaðu útreiðslurnar eru árini 2007 – 2009 øktar úr 104,5 mió.kr. til 106,8 mió.kr.

Hóast vøkstur í inntøkunum, er keypið av vørum til víðari sølu bert økt 200 t.kr.

Rentuinntøkurnar av gjaldførinum ganga inn í raksturin hjá Rúsdrekkasøluni, hóast rundskrivið um gjaldføri landskassans ásetur, at rentuinntøkur skulu verða skrásettar sum inntøkur landskassans.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at rentuinntøkurnar av innistandandi gjaldføri verða skrásettar undir høvuðskontuni fyri rentuinntøkur landskassans, eftirsum talan er um, at stovnurin umsitur part av gjaldføri landskassans. Eftirsíðan hevur stjórin greitt frá, at tað nú verður gjørt.

Fíggjarstøðan

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað flestu postarnar í fíggjarstøðuni. Grannskoðanin er farin fram á tann hátt, at vit hava tikið stakroyndir av ávísum roknskaparpostum, fyri at kunna meta um rættleikan, og eisini hava vit gjøgnumgingið dokumentatiónina av tølunum, sum vit hava fingið útflýggjað frá Rúsdrekkasøluni.

Debitorar

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað 17 debitorar. Í trimum førum var saldan ikki í samsvari við teirra bókhald. Nakrir útvaldir debitorar, sum stóðu á debitorlistanum hjá Rúsdrekkasøluni, vóru í veruleikanum ikki debitorar men kreditorar.

Mælt er til, at Rúsdrekkasølan leggur størri orku í at stemma debitorarnar av, og at síggja til, at klassifiseringin af debitorum/kreditorum er røtt.

Peningastovnskontur

Peningastovnskonturnar eru stemmaðar av mótvegis eksternum kontuavritum, og opnir postar eru stemmaðir av mótvegis undirliggjandi dokumentatión.

Munir vóru á saldunum á kontuavritunum frá peningastovnunum og salduna í roknskapinum hjá Rúsdrekkasøluni pr. 31.12.2009. Munirnir vóru í høvuðsheitum opnir postar. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at opnir postar verða bókaðir á pláss skjótast gjørligt.

Gjaldkort

Sambært fíggjarleiðaranum verða gjaldkortkonturnar ikki stemmaðar av regluliga. Landsgrannskoðanin hevur í sambandi við eftirlitið fingið eina avstemman av kontunum viðvíkjandi gjaldkortum frá Rúsdrekkasøluni. Avstemmanin vísir ein mun á 11 t.kr., sum tað ikki hevur eydnast fíggjarleiðaranum at greina út.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at gjaldkortkonturnar verða stemmaðar av javnan.

Kreditorar

Landsgrannskoðanin hevur tikið 11 tilvildarliga valdar stakroyndir av kreditorunum. Tríggir kreditorar stemma ikki, og í einum føri hava vit ikki fingið uttanhýsis skjalprógv. Sambært Rúsdrekkasøluni eru fleiri atvoldir til munirnar, ma. hevur Rúsdrekkasølan bíðað at gjalda ein faktura, tí tingingar vóru um vøruna og prísin, og í øðrum føri var ein kreditorur ikki stemmaður av.

Mælt er til, at Rúsdrekkasølan stemmar kreditorarnar av við jøvnum millumbilum. Sum eisini nevnt undir debitorunum, er klassifiseringin millum debitorar og kreditorar ikki røtt, soleiðis at debitorar verða mótroknaðir á kreditorlistanum, og øvugt. Mælt er til at tað verður rættað.

Ófráboðað kassaeftirlit

Landsgrannskoðanin hevur verið á ófráboðaðum kassaeftirlitum í handlinum í Miðlon í Tórshavn í desember 2009 og í mars 2010. Báðar ferðir vóru munir. Heitt varð á leiðsluna um at greina munirnar. Flestu munirnir eru nú greinaðir og rættaðir, men sambært fíggjarleiðaranum verða nakrir munir avskrivaðir, tilsamans um 7.000 – 8.000 kr.

Kassaeftirlitini og gjøgnumgongdirnar av kassunum vísa, at veikleikar hava verið í mannagongdunum. Landsgrannskoðanin hevur mælt Rúsdrekkasøluni til fleiri ábøtur.

Stjórin á Rúsdrekkasøluni hevur greitt frá, at arbeitt verður við at bøta um veikleikarnar. Leiðslan fer at raðfesta uppgávuna at styrkja innanhýsis eftirlitið og mannagongdirnar so frammarlaga, sum gjørligt.

Kassa- og goymslueftirlit á Drelnesi

Í apríl 2010 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirliti á deildini hjá Rúsdrekkasøluni á Drelnesi. Onki var at finnast at.

Viðmerkingar frá Rúsdrekkasøluni

Leiðslan á Rúsdrekkasøluni vísir á, at árið 2009 var eitt rættiliga turbulent ár fyri Rúsdrekkasøluna. Alt virksemið hjá Rúsdrekkasøluni varð flutt av Hoyvíksvegnum til onnur høli, eisini fíggjarfyrisitingin og onnur fyrisiting. Harumframt vóru onnur mál, sum tyngdu rættiliga nógv um hjá fyrisitingini. Av hesum umstøðum kom bókhaldið í afturhond, og tungt var at koma uppundan aftur við at stemma av og við øðrum uppgávum.

Viðmerkingar frá Vinnumálaráðnum

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2010 greitt frá, at tiltøk eru sett í verk fyri at bøta um og rætta teir veikleikar, sum Landsgrannskoðanin hevur víst á.

6 Mentamál

6.1 Yrkisdepilin (LG 2009/207-0111)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað á Yrkisdeplinum. Samanumtikið var onki at finnast at.

Í apríl 2010 grannskoðaði Landsgrannskoðanin Yrkisdepilin við støði í einum spurnablað um roknskapar-, lønar-, KT- og onnur viðurskifti, sum vit frammanundan høvdu sent stovninum.

Endamál, virksemi og uppgávur

Yrkisdepilin er fyrisiting, sum heldur til í Mentamálaráðnum. Játtanin til stovnin, stívliga 2 mió.kr., er á høvuðskontu 7.11.1.09, undirkonta 21.

Stovnurin virkar sambært Ll. nr. 94/1998 “um yrkisútbúgvingar” vsb.

Sambært § 19 setur landsstýrismaðurin eitt yrkisútbúgvingarráð við 9 limum. Arbeiðsgevarar og løntakarar velja hvør sínar 4 limir, landsstýrismaðurin velur formann. Eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum setur landsstýrismaðurin ein fyrisitingarleiðara.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerð

Stovnurin hevur góðkenda roknskaparreglugerð frá mai 2010.

Góðkenning av mánaðarroknskapum

Leiðarin góðkennir mánaðarroknskapirnar regluliga mótvegis Mentamálaráðnum.

Ognaryvirlit

Yrkisdepilin hevur yvirlit yvir ognirnar hjá stovninum.

Lønarumsiting

Reglurnar um lønarumsiting eru í Dygdarhandbók Mentamálaráðsins, og eru samsvarandi almenna setanarpolitikkinum. Fundarsamsýningar og endurgjøld til yrkisútbúgvingarráðið og yrkisnevndirnar verða avgreiddar sambært almennu reglunum.

Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina. Skrásett verður ikki, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til, men starvsfólkini skráseta nær tey koma og fara.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um lønirnar fyri september 2009 vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking oø. Onki var at finnast at.

KT- viðurskifti

Trygdarpolitikkur, herundir váðameting

Skrivligar reglur um trygdarpolitikk eru í Dygdarhandbók Mentamálaráðsins. Mentamálaráðið umsitur teldunetið hjá Yrkisdeplinum og skipar fyri øllum trygdartiltøkum.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at dáturnar í trygdaravritinum eru seinast endurskapaðar í november 2009. Ongin váðameting er gjørd fyri stovnin.

Øll starvsfólkini hava atgongd til stovnsnetið heimanífrá. Reglur um atgongd til stovnsnetið eru orðaðar í Dygdarhandbók Mentamálaráðsins.

Týdningur og samband við onnur

Yrkisdepilin goymir persónsupplýsingar í einum ólæstum arkivi, men hurðin er læst uttanfyri arbeiðstíð. Øll starvsfólk á Yrkisdeplinum hava atgongd til upplýsingarnar. Stovnurin hevur brandskáp, har gomul sveinabrøv verða goymd.

Síðani 2001 hevur Yrkisdepilin goymt sveinabrøvini talgild, og nú verða allir lærusáttmálar eisini skannaðir inn og goymdir.

Lønar- og ferðaendurgjald

Sambært § 33, stk. 4, í yrkisútbúgvingarlógini skal landskassin endurrinda arbeiðsplássinum lærlingalønina, meðan lærlingur er á skúla, og sambært stk. 5 rindar landskassin arbeiðsplássinum endurgjald fyri ferðaútreiðslur, um skúlaundirvísing ikki fæst í Føroyum.

Yrkisdepilin rindar lønar- og ferðaendurgjald umvegis KT-skipanina hjá Studna. Skrivstovufólkið hjá Yrkisdeplinum tøppar upplýsingarnar inn, og leiðarin góðkennir. Leiðarin leggur eisini takstirnar fyri endurgjøldini inn.

Treytin fyri at fáa lønar- og ferðaendurgjald er, at umsókn er latin Yrkisdeplinum áðrenn 5 ár eftir, at útreiðslan er hildin. Umsóknir eldri enn 5 ár verða avvístar.

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nøkur mál um lønar- og ferðaendurgjøld. Onki var at finnast at.

6.2 Føroya Skúlabókagrunnur (LG 2009/207-0231)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu ársfrágreiðing á ávís viðurskifti hjá Føroya Skúlabókagrunni. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Skúlabókagrunnurin er í einari samanleggingartilgongd, og at málið er, at viðurskiftini verða greið 1. januar 2011.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 greiddu vit í einum broti frá um grannskoðanina á Føroya Skúlabókagrunni.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2010 greitt frá, at Føroya Skúlabókagrunnur, KT-depilin og Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð eru í einari samanleggingartilgongd. Tað hevur við sær, at felags leistur verður lagdur fyri arbeiðstíðaruppgerðir, KT-politikk, KT-trygdarpolitik, felags roknskaparreglugerð osfr.

Málið er, at hesi viðurskifti eru greið 1. januar 2011, tó helst sett í verk so við og við fyri ta tíð. Kunningin frá landsstýrismanninum skal tí síggjast í hesum ljósinum, og endaligu loysnirnar kunnu verða tillagaðar samsvarandi.

Roknskaparviðurskifti

Skráseting av arbeiðstíð, fráveru oø.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til at finna eina hóskandi skipan at skráseta arbeiðstíð, fráveru oa. Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at málið hevur verið umrøtt. Ein felags loysn fyri allan stovnin fer at verða sett í verk. Mest sannlíkt verður talan um TotalView, sum verður samskipað við Mentamálaráðið.

Ognaryvirlit

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ognir verða skrásettar í einum rokniarki, um virðið er størri enn 5.000 kr.

Goymsla og goymslustýring

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Skúlabókagrunnurin hevur styrkt um goymslustýringina við at ogna sær eitt Navision-modul, sum koyrir saman við Navision hjá Bókamiðsøluni. Soleiðis kann Skúlabókagrunnurin til eina og hvørja tíð fylgja við sølu- og goymslutølum. Somuleiðis verður goymsluvirðið skrásett í Navision frá 1. januar 2011. Goymsluvirðið verður sett til framleiðslukostnaðin fyri eintakið, og verður, sum er, skrásett í einum rokniarki.

Frá 1. mars 2010 er Skúlabókagrunnurin farin frá kommisiónssølu til at hava *ein* keypara, Bókamiðsøluna. Bókamiðsølan umsitur goymsluna, og keypir útgávur til víðarisølu. Soleiðis er goymslustýringin vorðin meira einføld.

Samstarvið við Bókamiðsøluna er grundfest í einum samstarvssáttmála, har avtala er gjørd um at telja goymsluna upp eina ferð um árið. Skúlabókagrunnurin ger síðani stakroyndir eina ferð um árið at eftirkanna, at goymslustýringin er í lagi.

KT-viðurskifti

Sambært Skúlabókagrunninum liggur teldunetið hjá stovninum aftan fyri brandmúr og virusverju hjá Landsneti.

Stovnurin hevur ikki skrivligar reglur um trygdartiltøk, men fylgir trygdarreglunum hjá Landsneti.

Í juni 2009 heitti Mentamálaráðið á stovnin um at arbeiða fram ímóti at lýsa og orða niðanfyri nevndu viðurskifti:

- skrivligar reglur um trygdartiltøk,
- gera váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu,
- orða trygdarpolitikk,

soleiðis at ongin ivi var um, at KT trygdin var í lagi

Sum nevnt frammanfyri hevur landsstýrismaðurin í oktober 2010 víst á, at Føroya Skúlabókagrunnur, KT-depilin og Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð eru í einari samanleggingartilgongd. Tað hevur við sær, at felags leistur verður lagdur fyri arbeiðstíðaruppgerðir, KT-politikk, KT-trygdarpolitikk, felags roknskaparreglugerðir osfr.

6.3 Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð (LG 2009/207-0231)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu ársfrágreiðing á ávís viðurskifti hjá Landsmiðstøðini. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at 1. august 2010 er Landsmiðstøðin, saman við øðrum stovnum, løgd í ein stovn undir fyribilsnavninum VITIN.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 umrøddu vit í einum broti Landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð.

Í fleiri ár hevur verið tosað um at leggja Landsmiðstøðina, Skúlabókagrunnin og KT-depilin saman. Álit um samanlegging er latið landsstýrismanninum.

Í september 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at framvegis varð arbeitt við samanlegging av stovnunum, sum eftir ætlan skuldi virka frá 1. januar 2010. Samstundis var ætlanin, at Fróðskaparsetur Føroya skuldi hava ábyrgd av allari eftirútbúgving í skúlaverkinum.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at stovnarnir 1. august 2010 eru lagdir saman í ein stovn undir fyribilsnavninum VITIN, við egnari játtan á løgtingsfíggjarlógini.

6.4 Studni (LG 2009/207-0231)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu ársfrágreiðing á nøkur viðurskifti hjá Studna (Stuðulsstovninum), og hevði nøkur tilmæli.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 greiddu vit í einum broti frá um grannskoðanina av Studna.

Lógargrundarlagið

Landsgrannskoðanin mælti til, at kunngerðirnar í gomlu lógini um útbúgvingarstuðulsskipanina frá 1999 vórðu dagførdar, og at gjøllari reglur vórðu ásettar fyri umsitingina, eftir at Ll. nr. 36/2007 “um lestrarstuðul” varð sett til í gildi 1. august 2007.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at verandi kunngerðir higartil hava verið hildnar at vera nøktandi, men nú fleiri lógarbroytingar eru lagdar fyri Løgtingið, í sambandi við uppskotið til fíggjarlógina fyri 2011, verða kunngerðirnar broyttar samsvarandi samtyktum lógarbroytingum.

Ráðlegging og tíðarskráseting

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at reglurnar og mannagongdirnar um ráðlegging og tíðarskráseting verða settar í roknskaparreglugerðina.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at virksemið og ráðleggingin av uppgávunum á stovninum, er í stóran mun stýrt av ásetingum í lógini og kunngerðum, og fylgir gongdini í skúlaárinum.

Nakrar orðingar um vikuseðlar eru settar í roknskaparreglugerðina.

Roknskaparreglugerð

Uppskot til nýggja roknskaparreglugerð er um at verða liðugt. Tá ið tað er liðugt, verður tað sent Mentamálaráðnum at góðkenna.

Journalisering

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at skrivligar mannagongdir um journalisering verða gjørdar.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stovnurin í september 2010 hevur havt vitjan av Landsskjalasavninum, og í hesum sambandi verður ma. arbeitt við at áseta skrivligar mannagongdir um journalisering.

6.5 Yrkisskúlar (LG 2009/207-0233)

Hóast Ll. nr. 106/1998 “um yrkisskúlar” vsb. kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett reglur, sum álagt honum í § 14, stk. 2, í lógini. Heldur landsstýrismaðurin, at tørvur er ikki á at áseta reglurnar, mælir Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum til at broyta lógina.

Í § 14 í lógini um yrkisskúlar er ásett:

Stk. 1. “Landsstýrismaðurin útvegar góðkendum sjálvsognarstovni rakstrarstuðul til alment góðkent undirvísingarvirksemi, sambært § 1, uttan so er, at tilskot til hesar útreiðslur verður veitt eftir viðkomandi útbúgvingarlóg.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.”

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini, og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum, sæst, at málið síðani 2001 er umrøtt ferð eftir ferð, og í áravís hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at arbeitt verður við málinum.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin víst á, at yrkisskúlarnir verða tiknir við í løgtingsfíggjarlógina sum rakstrarjáttan, og eru sostatt fevndir av teimum játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglum, sum eru galdandi fyri landsstovnar. Tí verður ikki hildið neyðugt at áseta serstakar reglur fyri yrkisskúlar á hesum øki.

Mentamálaráðið fer at taka stig til at strika § 14, stk. 1 og 2, tí sum er, geva hesar ásetingar lítla og onga meining.

6.6 Føroya Studentaskúli og HF-skeið (LG 2009/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað á Føroya Studentaskúla. Samanumtikið var onki at finnast at.

Í februar 2010 grannskoðaði Landsgrannskoðanin Føroya Studentaskúla og HF-skeið við støði í einum spurnablaði um roknskapar-, lønar-, KT- og onnur viðurskifti, sum vit frammanundan høvdu sent skúlanum.

Roknskaparreglugerð

Skúlin hevur eina roknskaparreglugerð, sum ikki er dagførd. Leiðslan væntar, at roknskaparreglugerðin verður liðug viðgjørd innanhýsis og send Mentamálaráðnum til góðkenningar í oktober 2010.

Mánaðarroknskapir

Bókhaldarin stemmar allar kontur av í sambandi við mánaðarroknskapirnar.

Fíggjarleiðarin gjøgnumgongur mánaðarroknskapirnar, og ger tilmæli og møguligar viðmerkingar um góðkenning av roknskapum, sum rektarin góðkennir.

Fyri Miðnámsskúlan í Suðuroy er tað deildarleiðarin har, sum ger tilmæli um góðkenningar, meðan rektarin góðkennir roknskapirnar.

Ognaryvirlit

Í februar 2010 greiddi rektarin frá, at tey síðani 2007 ikki vóru komin longri við ognarskrásetingini, og at tað komst ma. av, at hann hevði verið so bundin av øðrum, so sum planlegging og trupulleikum við soppavøkstri í bygningunum.

Útbúnaðurin til tónleik, sum er nógv størsti partur av ognunum, er ikki skrásettur enn, hóast tey høvdu eina avtalu við veitararnar at koma at hjálpa teimum við skrásetingini.

Leiðslan kunnaði um, at hon miðar fram í móti, at eitt fullfíggjað ognaryvirlit er til skjals fyri árskiftið 2010/2011.

Lønarumsiting og tíðarnýtsla

Arbeiðstíðin hjá lærarunum er gjørd upp í vikutíðarnormar. Teir hava 21,6 tíma skylduga undirvísing, sambært sáttmálanum hjá Yrkisfelagnum fyri Studentaskúla- og HF-lærarar. Fastar mannagongdir eru, tá ið ein lærari td. ikki møtir.

Ætlanin er at fáa elektroniska skipan til at leggja undirvísingina til rættis oa. Leiðslan fylgir undirvísingini upp ma. við at fylgja við tí skrivliga, sum næmingarnir lata inn.

Við skúlaársbyrjan sendur leiðslan Føroya Gjaldstovu yvirlit við tímum at gjalda løn eftir. Eisini í september og januar verður yvirlitið sent inn fyri allar lærararnar. Hinar mánaðirnar í árinum verða bara rættingar sendar Føroya Gjaldstovu.

Studentaskúlin fær bókingarlista frá Føroya Gjaldstovu fyri hvørja lønarútgjalding, sum fíggjarleiðarin gjøgnumgongur fyri at kanna, um sjónligir týðandi feilir eru. Í januar 2010 kannaði fíggjarleiðarin allar lønir fyri at tryggja, at alt var rætt sambært sáttmálanum.

Rektarin kunnaði um, at samráðingar eru millum Yrkisfelagið og Fíggjarmálaráðið um at fáa árstíðarnorm ístaðin fyri verandi vikutíðarnorm. Hann heldur tað fara at verða lættari hjá leiðsluni at stýra. Verður árstíðarnormur tikin í nýtslu, skal skúlin hava eina nýggja skrásetingarskipan.

Øll onnur starvsfólk føra roknskap við sínum tímum.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar lønarútgjaldingar fyri september 2009. Samanumtikið vísti grannskoðanin, at lønirnar samsvaraðu galdandi reglum og lønartalvum.

KT-viðurskifti

Trygdarpolitikkur, herundir váðameting.

Landsgrannskoðanin vísti á, at skrivligar reglur eru ikki gjørdar um KT-trygdartiltøk, og ongin váðameting er gjørd.

Í september 2010 hevur rektarin kunnað um, at KT-vørðurin hevur orðað eina frágreiðing, sum í smálutum lýsir trygdarpolitikk skúlans á KT-økinum. Frágreiðingin fevnir um allar viðkomandi tættir á økinum, herundir “back-up mannagongdir”, tilbúgvingarætlan, váðameting oa.

6.7 Miðnámsskúlin í Suðuroy (LG 2009/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 víst á ávís viðurskifti hjá Miðnámsskúlanum. Ikki øll viðurskifti eru komin í rættlag enn.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 greiddu vit í einum broti frá um grannskoðanina á Miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Roknskaparreglugerð

Skúlin hevði eina roknskaparreglugerð frá 2005, sum Mentamálaráðið hevði góðkent í februar 2006. Skúlin kunnaði um, at roknskaparreglugerðin skuldi verða dagførd í sambandi við at skúlin 1. mars 2009 var fluttur í nýggjan bygning saman við Heilsuskúla Føroya.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið í oktober 2010 hevur biðið Miðnámsskúlan í Suðuroy dagføra sína roknskaparreglugerð.

Ognaryvirlit

Skúlin hevur eitt ognaryvirlit, sum ikki er dagført. Í sambandi við flytingina í nýggja bygningin er nógv nýtt innbúgv keypt. Ein trupulleiki er, at skúlin ikki veit, hvat innbúgvið hevur kostað at útvega, ma. tí at innbúgvið var ein partur av samlaðu verkætlanini at byggja skúlan. Leiðslan ætlaði at kanna, hvussu ognaryvirlit kann verða gjørt.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ognaryvirlitið er dagført, men at bøkurnar á savninum eru ikki skrásettar enn. Skúlin eru í ferð við at gera eina skipan, har bókavørðurin ger stóran part av skrásetingararbeiðinum.

KT-viðurskifti oa.

Landsgrannskoðanin vísti á, at skrivligar reglur eru ikki gjørdar um KT-trygdartiltøk, og ongin KT-váðameting er gjørd.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at trygdarpolitikkurin nú er orðaður.

Lønarumsiting oa.

Landsgrannskoðanin kannaði lønirnar fyri august 2008 hjá trimum lærarum, og vit høvdu nakrar viðmerkingar. Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin heldur seg til ásetingarnar í sáttmálanum millum Yrkisfelag Studenta- og HF-lærara og Fíggjarmálaráðið.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ásetingar í sáttmálanum nú verða hildnar.

6.8 Musikkskúlaskipanin (LG 2009/207-0235)

Hóast meira enn 25 ár eru liðin, síðani lógin kom í gildi, er framvegis ikki samsvar ímillum allar ásetingar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 69/1984 “um stuðul til musikkskúlar”, broytt við Ll. nr. 67/1996.

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at málið er umrøtt í áravís, uttan at nakað ítøkiligt hendir.

Í apríl 2009 hevði landsstýrismaðurin fund við Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, har uppskot til nýggja musikkskúlalóg varð lagt fyri kommunalu umboðini. Ætlanin hjá landsstýrismanninum var at fáa broytt lógina, so at hon samsvarar við praksis.

Úrslitið av fundinum var, at kommunuumboðini mæltu til, antin at landið yvirtekur allan musikkskúlan, og heldur allar útreiðslurnar, ella at musikkskúlin verður lagdur út til kommunurnar, og landið framvegis rindar sama part sum nú.

Landsstýrismaðurin vísti eisini á, at ein arbeiðsbólkur var settur undir Innlendismálaráðnum til ma. at viðgera spurningin um, hvat skal verða lagt til kommunurnar at umsita. Sjónarmiðini hjá kommunuumboðunum, saman við komandi niðurstøðuni frá arbeiðsbólkinum, gjørdu, at landsstýrismaðurin bíðaði við at taka endaliga støðu í málinum um musikkskúlaskipanina.

Í oktober 2009 kom álitið "Kommunur, eindir og uppgávur" við einum tilmæli viðvíkjandi Musikkskúlaskipanini: *"Nevndin mælir til, at nýggj lóg verður fingin til vegar, har bygnaðurin og ábyrgdin í musikkskúlunum verður greidd. Tá ið kommunueindirnar eru skipaðar, og fólkaskúlaøkið og frítíðarundirvísing er lagt út til kommunurnar, verður støða tikin til, um og hvussu musikkskúlin kann verða lagdur til kommunurnar."*

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eftirsíðan hevur ein bólkur av landsstýrisfólkum arbeitt við at finna politiska semju um at skipa landið í færri kommunueindir og um, hvørji málsøki skulu verða løgd út til kommunurnar.

Landsstýrismaðurin sigur eisini, at sjónarmiðini hjá kommunuumboðum á fundinum í juli 2009, og vantandi politisk avkláring av, hvørji tilmæli í Kommunuálitinum skulu verða fylgd, gera, at landsstýrismaðurin í verandi støðu ikki tekur fleiri stig til at broyta skipanina.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008, sum Løgtingið samtykti 27. mai 2010, átala Løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð, at málið ikki verður loyst, og teir heita enn einaferð á landsstýrismannin í mentamálum um at taka stig til at loysa málið.

Samanumtikið kann Landsgrannskoðanin sostatt enn einaferð staðfesta, at hóast meira enn 25 ár eru liðin, síðani lógin kom í gildi, er framvegis ikki samsvar ímillum allar ásetingar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

6.9 Húsarhaldsskúli Føroya (LG 2009/208-0235)

Landsgrannskoðanin hevur reist spurningin, um játtanin til Húsarhaldsskúla Føroya átti at verið ein "rakstrarjáttan".

Landsstýrismaðurin heldur, at verandi skipan er nøktandi.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2008 umrøddu vit játtanarviðurskiftini hjá Húsarhaldsskúla Føroya.

Vit umrøddu ma., at landið fíggjar so at siga allan raksturin av virkseminum hjá Húsarhaldsskúlanum. Landskassin veitir ein árligan stuðul 2,1 mió.kr.

Landsgrannskoðanin helt, at sæð frá einum eftirlitssjónarmiði er tað óheppið, at landið veitir so stóran árligan stuðul sum "onnur játtan". Varð játtanin tikin við í fíggjarlógina sum "rakstrarjáttan", kom skúlin undir at kalla somu játtanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

Í uppskoti til samtyktar, um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008, sum varð samtykt av Løgtinginum 27. mai 2010, mæltu Løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð landsstýrismanninum í mentamálum til at taka upp spurningin, um tað ikki er skilabetri at játtanin til Húsarhaldsskúla Føroya verður tikin við í fíggjarlógina sum rakstrarjáttan.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann hevur viðgjørt spurningin og heldur, at verandi skipan er nøktandi.

Mentamálaráðið veitir Húsarhaldsskúlanum fíggjarligan stuðul sambært umsókn og játtan í fíggjarlógini við støði í ásetingunum í § 11 í Ll. nr. 66/1992 "um Húsarhaldsskúla Føroya", og fær grannskoðaðan roknskap eftir árslok á hvørjum ári. Síðani verður gjørt upp, um ov nógv ella ov lítið er goldið í mun til játtaða virksemið.

6.10 Vinnuháskúlin (LG 2009/207-0236)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í november 2007 vísti Landsgrannskoðanin á, at lønarumsitingin ikki í øllum førum byggir á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað.

Í 2007 vísti skúlastjórin á, at tað var trupult at umsita lønirnar eftir sáttmálunum, tí teir vóru ikki nóg greiðir. Til dømis var samskifti við fakfelagið um at tulka skylduga undirvísingartímatalið, sum var 21,6 tímar um vikuna, og hvussu tímatalið skuldi verða roknað, tá ið tímar vórðu nýttir til annað enn undirvísing.

Ongar nágreiniligar reglur eru í sáttmálanum um, hvønn tímaniðurskurð hvørt fak skal hava. Einasta reglan er í § 25 í sáttmálanum, sum ásetur, at samlaði tímaniðurskurðurin ikki er hægri enn 3,4 tímar um vikuna fyri allar lærugreinir, og fyri allar seks lestrarhálvurnar samanlagt. Tað er ein áseting, sum varð gjørd tá ið tað vóru 2 skúlar. Leiðslan heldur, at nú skúlarnir eru lagdir saman, skal ásetingin skiljast sum 6,8 tímar (te. 2 ferðir 3,4 tímar). Sambært yvirlitinum eru samlaðu niðurskurðirnir 6,3851, men vit duga ikki at siga, um býtið millum lærugreinirnar/lærararnar er rætt.

Niðurstøðan av grannskoðanini av lønarmálunum er, at verður støðið tikið í sáttmálanum við Felagið Maskinmeistaralærarar, saman við Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, umframt teimum tulkingunum og "óskrivaðu reglum", sum Vinnuháskúlin hevur fyri tímaniðurskurði og lønaráseting, so tykjast útgoldnu lønirnar rættar.

Í oktober 2007 mæltu vit Mentamálaráðnum til at taka spurningin um ógreidleikar í sáttmálunum upp við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

Í oktober 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at enn vóru ongi ítøkilig stig tikin viðvíkjandi málinum um ársverksskipan fyri maritimu skúlarnar. Í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærarar saman við Fakfelagi Sjómansskúlalærara í Føroyum, sum bleiv undirritaður 4. mai 2009, stendur í § 28: *"Í sáttmálaskeiðinum arbeiða partarnir við ársverksskipan. Miðað verður eftir at seta ársverkið í verk 1. august 2010."*

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at Mentamálaráðið, saman við Fíggjarmálaráðnum, ætlaði at seta nevnd at gera eina ársverksskipan fyri maritimu skúlarnar.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið er farið undir at fyrireika eina skipan við ársverki.

6.11 Klaksvíkar Sjómansskúli (LG 2009/207-0236)

Í apríl 2010 var Landsgrannskoðanin á Klaksvíkar Sjómansskúla fyri at kunna okkum um ávís viðurskifti, sum hava verið umrødd í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009. Niðanfyri hava vit í stuttum tikið samanum úrslitið.

Roknskaparreglugerð

Landsgrannskoðanin hevur síðani 2005 vístá, at Klaksvíkar Sjómansskúli hevur ikki nakra roknskaparreglugerð, sum er góðkend av Mentamálaráðnum.

Stjórin greiddi frá, at hann í oktober 2009 hevði sent ráðnum eina nýggja roknskaparreglugerð, og biðið um at fáa at vita, hví reglugerðin ikki kundi verða góðkend. Fundur var í oktober 2009 millum skúlastjóran og Mentamálaráðið, uttan at skúlastjórin helt seg fáa nakað ítøkiligt at vita um, hví reglugerðin ikki kundi verða góðkend.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2010 kunnað um, at Mentamálaráðið í skrivi hevur boðað skúlanum frá, at roknskaparreglugerðin kann góðkennast við ávísum broytingum. Tá ið neyðugu broytingarnar og dagføringarnar eru gjørdar, skal skúlin senda Mentamálaráðnum reglugerðina at góðkenna.

Skyldugt undirvísingartímatal

Fyrra lestrarhálvárið 2007 vóru fleiri lærarar, sum ikki undirvístu skylduga undirvísingartímatalið.

Í oktober 2009 bað Mentamálaráðið skúlan um frágreiðing og uppgerð yvir, hvat tímarnir, sum ikki vórðu nýttir til undirvísing, vóru nýttir til. Leiðslan varð somuleiðis biðin um at greiða frá, hvørja virksemisætlan skúlin hevði gjørt í hesum sambandi.

Stjórin greiddi frá, at í fyrru lestrarhálvu 2007 høvdu lærararnir ikki fult tímatal á skemanum. Írestandi tímatalið, tilsamans 317,2 tímar, vóru ma. nýttir til at undirvísa á Trygdarmiðstøðini og til aðrar uppgávur á skúlanum.

Tímaniðurskurður

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar vístá, at ongar nágreiniligar reglur eru um, hvønn tímaniðurskurð hvør lærugrein skal hava.

Einasta reglan um tímaniðurskurð er í § 25 í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærarar saman við Fakfelagi Sjómansskúlalærara í Føroyum, sum ásetur, at samlaði tímaniðurskurðurin ikki er hægri enn 3,4 tímar um vikuna fyri allar lærugreinir, fyri allar seks lestrarhálvurnar samanlagt. Stjórin kunnaði um, at hann nýtir ein tímaniðurskurð, sum hann hevur brúkt seinastu 20 árini, og sum hann hevur fingið frá Mentamálaráðnum.

Í oktober 2009 segði landsstýrismaðurin, at hann hevði biðið leiðslu skúlans greiða frá, hvussu skúlin ásetur tímaniðurskurð fyri einstøku lærugreinirnar, við støði í § 25 í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærarar saman við Fakfelagi Sjómansskúlalærara í Føroyum.

Skúlastjórin greiddi í apríl 2010 frá, at hann í oktober 2009 hevði boðað Mentamálaráðnum frá, hvussu tímaniðurskurðurin var fyri hvørja lærugrein í tilsamans trimum lestrarhálvum. Í skrivinum hevði stjórin greitt frá, at tímaniðurskurðurin fyri tríggjar lestrarhálvur hjá teimum var 1,00 um vikuna, sum er minni enn tað kundi verið eftir sáttmálanum, sum sigur 3,4 tímar fyri 6 lestrarhálvur, ella 1,7 tíma niðurskurð fyri tríggjar lestrarhálvur.

Fyrra og seinna hálvár 2009

Landsgrannskoðanin fekk í apríl 2010 útflýggjað yvirlit yvir útroknaðan tímaniðurskurð fyri fyrra og seinna hálvár 2009. Skúlin nýtir enn tímaniðurskurðin, sum varð ásettur í avtaluni um tænastutíð oa. hjá lærarum og stjóra á sjómansskúlum. Avtalan varð undirskrivað av Føroya Landsstýri og Tænastumannafelag Landsins 29. januar 1988.

Nakrir munir eru millum ásetingina av tímaniðurskurðinum í avtaluni frá 1988, og tí, sum skúlin brúkar, bæði í skipara- og kokkaflokkunum, meðan ásetingin av tímaniðurskurðinum, sum skúlin brúkar til sjóvinnuflokkin, als ikki er við í áðurnevndu avtalu.

Verður støði tikið í avtaluni frá 1988 og teimum talvum, tímaniðurskurðum og útrokningum, sum skúlastjórin brúkar, tykjast lønarútgjaldingarnar rættar. Tó sær út, sum einum lærara manglar at fáa útgoldnan ein tíma um vikuna seinna hálvár 2009.

Landsgrannskoðanin skal tó gera vart við, at útrokningin byggir á 22 ára gamla avtalu, og tekur ikki støði í nýggja sáttmálanum. Lønarumsitingin byggir sostatt ikki á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað, og vit hava mælt til at bøtt verður um viðurskiftini.

6.12 Samskipan av virkseminum hjá sjómansskúlunum (LG 2009/207-0236)

Í oktober 2001 spurdi Landsgrannskoðanin, um landsstýrismaðurin hevði ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Tórshavn og í Klaksvík, vísandi til at samlaða næmingatalið var minkandi.

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at málið er umrøtt í áravís, uttan at nakað ítøkiligt hendir,

Skiftandi landsstýrismenn hava eftirsíðan fleiri ferðir boðað frá, at spurningurin um at samskipa skúlarnar fór at verða tikin upp, og arbeiðsbólkar settir.

Í oktober 2009 vísti landsstýrismaðurin á, at í samgonguskjalinum stendur: *"Nevnd verður sett at kanna møguleikarnar fyri at leggja allar maritimu útbúgvingarnar saman á einum stað".*

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at nevndin var sett. Eftir ætlan skuldi hon verða liðug við sína frágreiðing seinast í oktober 2009. Landsstýrismaðurin fór tá at taka støðu til virksemið hjá maritimu útbúgvingunum.

Í mars 2010 fekk landsstýrismaðurin handað tilmæli frá nevndini. Tilmælið er í 5 punktum:

- allar maritimar útbúgvingar og skeið verða skipaðar undir Mentamálaráðnum,

- allar maritimar útbúgvingar og skeið á Klaksvíkar Sjómansskúla, Trygdarmiðstøðini og Vinnuháskúlanum verða skjótast møguligt skipaðar undir einari leiðslu, sum fær til uppgávu at savna stovnarnar saman,
- nýggja leiðslan fær til uppgávu at leggja verandi stovnar saman í ein depil, sum bygnaðarliga skal verða skipaður saman við Fróðskaparsetri Føroya, á sama hátt sum Føroya Læraraskúli og Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya,
- maritimar útbúgvingar og skeið verða skipaðar í Tórshavn. Partar av skeiðvirkseminum kunnu tó verða skipaðar aðrastaðni,
- kokkaskeiðið á Klaksvíkar Sjómansskúla verður skipað sum partur av førleikagevandi yrkisútbúgving á einum tekniskum skúla.

Ætlanin er at skipa skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar sum bachelorútbúgvingar frá 2012, samstundis sum arbeitt verður við at samskipa virksemið soleiðis, at sama útbúgving ikki verður boðin út á báðum skúlunum.

Kokkaskeiðið á Klaksvíkar Sjómansskúla varð 1. august 2010 skipað sum partur av førleikagevandi útbúgving á Tekniska Skúla í Klaksvík.

6.13 Havlívfrøðiliga Royndarstøðin (LG 2009/207-0236)

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2009 víst á nøkur viðurskifti hjá Biofar. Enn eru øll viðurskiftini ikki komin í rættlag.

Játtanin til Biofar, 1,6 mió.kr. netto, er á høvuðskontu 7.23.6.17.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 greiddu vit í einum broti frá um grannskoðanina á Havlívfrøðiligu Royndarstøðini (Biofar).

Roknskaparreglugerð

Mentamálaráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðina 4. november 2003. Leiðarin helt, at roknskaparreglugerðin var rímiliga dagførd, hóast td. tímaprísir, sum verða brúktir til inntøkufíggjaða virksemið, ikki eru dagførdir.

Leiðarin kunnaði um, at stovnurin nýtir Verkgongdarskipanina hjá Gjaldstovuni. Í hesum sambandi vísti Landsgrannskoðanin á, at mannagongdirnar at bóka í skipanini eru ikki lýstar í roknskaparreglugerðini. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at dagføra roknskaparreglugerðina.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið hevur fingið partar av reglugerðini, og at samlaða roknskaparreglugerðin er ávegis til ráðið at góðkenna.

Inntøkufíggjað virksemi

Biofar hevur inntøkufíggjað virksemi. Eftir umbøn kann Biofar gera ma. botnkanningar á sjónum. Oftast eru tað alifeløg, sum biðja um at fáa kanningar gjørdar, men Biofar hevur eisini gjørt kanningar fyri td. oljufeløg.

Leiðarin gjørdi eina prísútrokning fyri árið 2005, sum ikki er dagførd síðani. Tímaprísurin, sum verður nýttur, verður tó javnaður eina ferð um árið við einum ávísum prosenti. Leiðarin segði, at javningin fylgir prísvøkstrinum. Prísvøksturin er ein meting av gongdini í samfelagnum sum heild, og ein meting av, hvat ikki er kappingar-

avlagandi. Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið skjalprógv fyri, hvat liggur til grund fyri prísjavningunum.

Í útrokningini eru tiknar við hølisútreiðslur, lønarkostnaðir, rakstrarútreiðslur og overhead. Leiðarin hevur greitt frá, at miðaltímaprísurin er roknaður út við grundarlagi í útreiðslunum fyri allan stovnin, og er ikki gjørdur upp eftir, hvør fæst við hvat.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at prísútrokningin verður dagførd hvørt ár, og at útrokningin verður betur skjalprógvað og útgreinað. Eisini hevur Landsgrannskoðanin mælt til, at viðkomandi útreiðslur í prísútrokningini, har tað letur seg gera, verða skildar sundur í vanligt virksemi og inntøkufíggjað virksemi.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2010 kunnað um, at ein dagførd prísútrokning er við í uppskotinum til roknskaparreglugerð.

Journalskipan

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stovnurin skrásetur innkomna og útfarna postsamskiftið við neyðugum skjalaeyðkenni. Landsskjalavørðurin og journalkønur frá Føroya Landsskjalasavni hava á vitjan í september 2010 kannað og umrøtt øll journalviðurskifti við teirri niðurstøðu, at tær mannagongdir, ið stovnurin brúkar, eru nøktandi.

KT-viðurskifti

Ongar skrivligar reglur um trygdartiltøk eru gjørdar, og ongin váðameting er gjørd viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu. Heldur ikki er nakar KT-trygdarpolitikkur orðaður.

Biofar hevur egið teldunet. Ongin ambætari er, men ein av teldunum virkar sum goymsla av dátum, her ímillum ein Access-dátugrunnur. Access-dátugrunnurin er høvuðs KT-amboðið hjá stovninum, og allar teldurnar hava atgongd hvør til aðra. Leiðarin greiddi frá, at hann fegin vildi betra um skipanina, men peningur var ikki til tess. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at trygdartiltøkini verða skrivliga orðað.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at miðað verður eftir at orða skrivlig trygdartiltøk, soleiðis at tey eru tøk fyri ársskiftið 2010/11.

Fartelefon

Øll starvsfólkini hava fingið fartelefon frá stovninum, sum tey hava fingið loyvi frá leiðaranum at taka heim við. Landsgrannskoðanin gjørdi leiðaran varugan við, at rundskriv finst um fría telefon, og at tað áliggur arbeiðsgevaranum at boða TAKS frá um fríar ágóðar hjá starvsfólkunum (§118, stk. 1, pkt. b í Ll. nr. 86/1983).

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stovnurin er farin frá fastnettelefoni til fartelefoni. Øll starvsfólk eru áløgd at hava fartelefon. Skipanin hevur ongar meirútreiðslu við sær, men sparir stovninum pening. Starvsfólk gjalda sjálvi fyri møguliga privata nýtslu. Av tí at nýtslan hjá starvsfólkunum hvørki er frí ella ókeypis, heldur stovnsleiðslan ikki, at skipanin er fevnd av fráboðanarskylduni.

6.14 Listasavn Føroya (LG 2009/207-0243)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 umrøddi Landsgrannskoðanin játtanar-, roknskapar- og ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya.

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at málið er umrøtt í áravís. Málið er ikki loyst.

Í januar 2005 greiddi landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini millum sjálvsognarstovnin og stovnsraksturin enn ikki vóru greidd, og arbeitt varð við at endurskoða viðtøkurnar hjá Listasavninum. Tá ið tað arbeiðið varð liðugt, fór eisini at verða greitt, hvussu roknskapurin skuldi verða førdur í framtíðini, ásannandi, at framferðarhátturin, har eitt møguligt rakstraravlop tilvildarliga verður býtt millum eginrakstur og stovnsrakstur, ikki kann halda fram. Mentamálaráðið væntaði, at arbeiðið fór at verða liðugt á vári 2005.

Í juli 2008 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið arbeiddi við bygnaðarbroytingum fyri alt savnsøkið, ið ætlandi skuldu koma í gildi fyrst í 2009. Ætlanin var at samskipa søvn landsins í eitt tjóðarsavn, og í tí sambandi fór at verða hugt eftir, hvussu bygnaðarliga tilknýtið hjá Listasavni Føroya til eitt tjóðarsavn kundi verða skipað.

Í september 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at vegna skifti av starvsfólki, var stígur komin í málið, sum arbeiðsbólkurin, ið varð settur í 2006, skuldi arbeiða við, men at málið var tikið uppaftur. Landsstýrismaður helt, at ein tilráðing kundi vera tøk fyrst í 2010.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008, sum Løgtingið samtykti 27. mai 2010, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð, at málið ikki var loyst, og teir heittu enn einaferð á landsstýrismannin í mentamálum um at taka stig til at loysa málið.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við tilráðingini er tíverri ikki liðugt enn. Ætlanin er at leggja øll søvn landsins saman í ein stovn, og stjóri verður væntandi settur fyri árslok. Í hesum sambandi skal arbeiðsbólkur við sakkønum fólki viðgera spurningar um ognar-, játtanar- og roknskaparviðurskiftini hjá Listasavni Føroya, og skal í sama viðfangi greina hesi viðurskifti:

- hvørja støðu og hvønn týdning hevur Listasavn Føroya í føroyskum savnshøpi,
- hvønn týdning hevur játtanin á Løgtingsins fíggjarlóg fyri Listasavn Føroya,
- hvussu vóru ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya, áðrenn Listasavnið varð skipað sum sjálvsognarstovnur í 1989, og hvussu eru tey nú, og
- hvørjar eru fyritreytirnar fyri, at Listasavn Føroya kann verða skipað sum partur av Søvnum Landsins.

Arbeiðsbólkurin skal eisini lýsa fyrimunir og vansar við:

1. Listasavni Føroya sum alment landssavn,
2. Listasavni Føroya sum alment landssavn við tilknýttum sjálvstøðugum virksemi, og
3. Listasavni Føroya sum sjálvsognarstovnur.

6.15 Føroya Landsbókasavn (LG 2009/207-0243)

Lógin um bókasøvn áleggur/heimilar landsstýrismanninum at gera reglugerðir á fleiri økjum. Ongar reglur eru settar í gildi enn.

Í lógini um bókasøvn eru ásetingar um, at landsstýrismanninum verður heimilað at gera reglugerðir á fleiri økjum, eisini er ásett, at landsstýrismaðurin skal gera reglugerðir á fleiri økjum.

Landsgrannskoðanini kunnugt, er gjørd *ein* kunngerð um skúlabókasøvn (K. nr. 28 /2004), og *eitt* rundskriv frá 13. februar 2006 um studning til fólka- og skúlabókasøvn. Vit halda tørv vera á at áseta gjøllari reglur.

Í august 2008 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at dagføra bókasavnslógina, og í hesum sambandi varð eisini arbeitt við at seta í verk neyvari reglur á fleiri økjum. Ætlanin var at fara undir arbeiðið á heysti 2008.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at Mentamálaráðið arbeiddi við bygnaðarbroytingum fyri alt savnsøkið, ið ætlandi skuldu koma í gildi fyrst í 2009. Ætlanin var at skipa søvn landsins í eitt tjóðarsavn, og Føroya Landsbókasavn skuldi vera partur av hesari ætlan.

Í august 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at leggja seinastu hond á eina røð av kunngerðum og reglugerðum, ið fóru at ganga viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini á møti. Málið skuldi eftir ætlan verða avgreitt í 2009.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin sagt, at reglur um bókasavnsvirksemi á stovnum, vinnu- og miðnámsskúlabókasøvnum og á hægri undirvísingarstovnum, og kunngerð um avhending av skyldueintøkum til Føroya Landsbókasavn, eru gjørdar, og verða eftir ætlan settar í gildi á heysti 2010.

Stovnurin “Søvn Landsins” verður settur á stovn 1. januar 2011. Tá er ætlanin at fara undir at dagføra alla lóggávu á savnsøkinum.

6.16 Vitavarðarhúsini í Akrabyrgi (LG 2009/207-0232)

Landsgrannskoðanin hevur heft seg við, at Mentamálaráðið, Náttúrugripasavnið og Fróðskaparsetur Føroya síðani 1999 hava goldið árliga leigu, 30.000 kr. í part, til Collegium Academicum Faroensis fyri Vitavarðarhúsini í Akrabyrgi. Í apríl 2010 bóðu vit tí stovnarnar um gjøllari frágreiðing.

Í oktober 2010 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at í frágreiðing frá vitjan í Vitavarðarhúsunum í apríl 1997 sæst, at ætlanin var, at fleiri feløg og stovnar skuldu keypa húsini í felag. Niðurstøðan varð, at partarnir hildu frægastu loysnina vera, at ein stovnur átti húsini, meðan onnur síðani kundu leiga húsini til skeið og annað virksemi.

Collegium academicum faeroense keypti húsini, og tey vórðu tikin í nýtslu í 1999. Mentamálaráðið játtaði saman við Náttúrugripasavninum og Fróðskaparsetri Føroya at gjalda árliga leigu, 30.000 kr. í part, ella samanlagt 90.000 kr., sum verða nýttar til rakstur og viðlíkahald av húsunum.

7 Heilsumál

7.1 Sjúkrakassar (LG 2009/211-0202)

Síðani 2002 hava skiftandi landsstýrismenn í heilsumálum boðað frá, at arbeitt verður við nýggjari lóggávu, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið.

Løgtingið samtykti 18. desember 2009 lógaruppskot "um almenna heilsutrygd", og lógin kom í gildi 1. januar 2010. Samstundis fóru ásetingarnar um sjúkrakassar í lógarkunngerðini frá 1989 um almenna sjúkratrygging fyri Føroyar úr gildi.

1. januar 2010 er skipanin við góðkendum sjúkrakassum sostatt farin í søguna.

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 25 í "Lovbekendtgørelse nr. 514 af 21. juli 1989 om den offentlige sygeforsikring" er álagt Landsstýrinum at seta neyvari reglur fyri "eftirliti við rindan av limagjaldi". Landsstýrismaðurin hevur ongar reglur ásett.

Síðani hevur landsstýrismaðurin á hvørjum ári boðað frá, at arbeitt verður við nýggjari lóggávu, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið.

Lógaruppskot "um almenna heilsutrygd" varð lagt fyri Løgtingið 3. desember 2009. Uppskotið varð samtykt 18. desember 2009, og lógin kom í gildi 1. januar 2010. Samstundis fóru úr gildi ásetingarnar um sjúkrakassarnar í lógarkunngerðini "um almenna sjúkratrygging fyri Føroyar".

1. januar 2010 er skipanin við góðkendum sjúkrakassum sostatt farin í søguna.

7.1.1 Grannskoðan av stuðli til sjúkrakassar

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað stuðulin til sjúkrakassar. Endamálið við grannskoðanini var at kanna eftir og staðfesta rættleikan av stuðlinum, sum er bókaður í landsroknskapinum á høvuðskontu nr. 11.20.2.01 "Sjúkrakassar". Hesar útreiðslur taka støði í teimum útreiðslum, sum Sjúkrakassarnir hava havt, og sum hava við sær stuðul úr landskassanum.

Útrokningargrundarlagið fyri stuðli úr landskassanum

Grundarlagið fyri landskassans stuðli til útreiðslur fyri sjúkrahjálp er ásett í § 27 í sjúkratryggingarlógini:

- 5 kr. pr. lim pr. 31.12, smb. stk. 2, nr. 1,
- 25 % av útreiðslunum til hvíldarheim, vanliga læknahjálp, serlæknar, tannlæknar, fysiurgiska viðgerð, kiropraktor viðgerð, brillur, minni bandagur, fótarøkt og sálarfrøði, smb. stk. 2, nr. 2,
- 75% av útreiðslunum til serlæknar, smb. stk. 2, nr. 3,
- 50% av útreiðslunum til flutning av lækna og sjúklingi, smb. stk. 2, nr. 4.

Grundarlagið fyri landskassans stuðli til útreiðslur til heilivág er ásett í K.nr. 145/1993 ”um skrá yvir heilivágssløg, sum eru heimilað tilskot” sum broytt við K. nr. 27/2009:

1. Frá 1. januar til 31. mars 2009:
   - 30% av útreiðslunum til heilivágssløg eftir parti I og II í skránni í skjali 1 (skjal 1 bólkar tey ymisku heilivágssløgini), smb. § 2, stk. 1,
   - 100% av útreiðslunum eftir parti III í skránni í skjali 1, samb. § 2, stk. 1.
2. Frá 1. apríl til 31. desember 2009:
   - 1,73% av útreiðslunum til heilivágssløg eftir parti I og II, smb. § 2, stk. 1,
   - 100% av útreiðslunum eftir parti III, samb. § 2, stk. 1,
   - 100% av útreiðslunum til terminaltilskot, smb. § 2, stk. 2.

Stuðul úr landskassanum

Mannagongdin hevur verið, at Almannastovan hevur goldið út ávegis gjald fyrsta, annan og triðja ársfjórðing við støði í stuðlinum árið fyri.

Stuðulin fyri fjórða ársfjórðing hevur verið goldin út, tá ið Almannastovan hevur fingið umsóknarblað til at rokna út rakstrarstuðulin fyri alt árið. Tá ið Almannastovan hevur fingið roknskapin, eru upphæddirnar á umsóknarblaðnum eftirkannaðar.

Sambært Almannastovuni varð hetta eisini gjørt fyri 2009, men av tí at Almannastovan ikki hevði fingið øll umsóknarbløðini, tá ið Gjaldstovan lat aftur fyri bókingum fyri 2009, vórðu 4,5 mió.kr. settar av. Tá ið endaliga avrokningin varð avgreidd, vóru 28 t.kr. ov nógv avsettar.

Landsgrannskoðanin hevur eftirroknað stuðulin sambært roknskapartølunum á umsóknarbløðunum. Vit hava onki at finnast at.

Sjúkrakassarnir hava eisini sent inn avrit av rokningum frá Apoteksverkinum fyri 1. ársfjórðingi 2009, so Almannastovan kundi kanna eftir, um útreiðslurnar til heilivág vóru rætt tíðaravmarkaðar, ávikavist fyri og eftir at satsurin varð broyttur. Almannastovan hevði onki at finnast at.

Roknskaparviðurskiftini hjá sjúkrakassunum

1.000 kr.

Roknskapartøl[4] Rakstur	2006	2007	2008	2009
Inntøkur:				
Limagjald oa.	90.239	91.309	96.197	96.867
Rakstrarstuðul[5]	32.242	33.320	35.475	24.881
Inntøkur tilsamans	**122.481**	**124.629**	**131.672**	**121.748**
Útreiðslur:				
Sjúkrahjálp og heilivág	111.391	115.765	121.578	115.271
Umsiting- og rentur	8.856	8.650	9.154	10.263
Útreiðslur tilsamans	**120.247**	**124.415**	**130.732**	**125.534**
Avlop/hall	**2.234**	**214**	**940**	**-3.786**

1.000 kr.

Fíggjarstøða	2006	2007	2008	2009
Ogn:				
Kassa-og bankakontur	31.855	30.891	31.989	35.645
Fastar ognir og innbúgv	3.786	3.722	3.997	4.102
Stuðul tilgóðar	9.400	8.611	11.296	4.450
Onnur ogn	3.706	5.340	4.387	5.465
Ogn tilsamans	**48.747**	**48.564**	**51.669**	**49.662**
Skyldur:				
Læknar, tannlæknar	2.686	2.775	2.932	3.808
Apoteksverkið	4.373	4.869	5.452	3.997
Onnur skuld	4.923	4.014	3.555	5.906
Skuld tilsamans	**11.982**	**11.658**	**11.939**	**13.711**
Eginogn:				
Eginogn við ársbyrjan	34.531	36.765	36.906	39.730
Rakstrarúrslit	2.234	214	940	-3.786
Aðrar javningar	-	-73	1.884	7
Eginogn tilsamans	36.765	36.906	39.730	35.951
Skyldur tilsamans	**48.747**	**48.564**	**51.669**	**49.662**

Í roknskapinum hjá Havnar Sjúkrakassa fyri 2009 verður viðmerkt, at sjúkrakassin hevur lønarskyldur til starvsfólk, um 2 mió.kr., sum ikki eru bókaðar, og eisini eitt ikki avgjørt sakarmál, 200 t.kr.

Talvan frammanfyri vísir ma., at eginognin hjá sjúkrakassunum 31. desember 2009 er um 36 mió.kr.

[4] Sambært Almannastovuni: Rakstrarroknskapur fyri allir sjúkrakassar
[5] Sambært Búskaparskipan Landsins

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið "um almenna heilsutrygd", sum landsstýrismaðurin legði fyri Løgtingið 3. desember 2009, verður ma. boðað frá, at *"uppskot til løgtingslóg um fæið í føroysku sjúkrakassunum verður sambært § 30, stk. 8, lagt fyri Løgtingið seinni í hesari tingsetuni. Heilsumálaráðið hevur samband við sjúkrakassarnar og MSF[6] um, hvat skal henda við ognunum hjá sjúkrakassunum, bæði tá ið talan er um innistandandi ognir, bygningar og innbúgv."*

Í § 30, stk. 7, í Ll. nr. 178 frá 22. desember 2009 "um almenna heilsutrygd" er ásett, at uppskot til løgtingslóg um fæið í føroysku sjúkrakassunum verður lagt fyri Løgtingið seinni í hesari tingsetuni[7]. Onki lógaruppskot er enn lagt fyri Løgtingið.

Í oktober 2010 hava vit spurt, hví landsstýrismaðurin onki lógaruppskot hevur lagt fram, og nær lógaruppskotið væntandi fer at verða lagt fyri Løgtingið.

Landsstýrismaðurin hevur svarað, at av tí at samráðingar hava verið við Meginfelag Føroysku Sjúkrakassanna um fæið, er lógaruppskot ikki enn lagt fyri Løgtingið. Semja er fingin partanna millum um at seta á stovn ein Sjúkrakassagrunn Føroya, sum hevur til endamáls at veita stuðul til átøk og verkætlanir, sum kunnu menna heilsuøkið í Føroyum. Uppskot til løgtingslóg um fæið í føroysku sjúkrakassunum verður lagt fyri Løgtingið seinni í hesari tingsetuni.

Eftirlit hjá Almannastovuni

Almannastovan hevur, sambært § 32 í Sjúkratryggingarlógini, eftirlit við sjúkrakassunum og sambært § 35, stk. 7, *"skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regnskabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan.*"

Almannastovan hevur í mars/apríl 2010 verið á eftirlitsvitjan hjá teimum 11 sjúkrakassunum. Bókingarskjøl vórðu gjøgnumgingin, stakroyndir gjørdar, kassar og bankakontur vórðu stemmaðir av. Almannastovan hevði onki at finnast at.

Almannastovan ger vart við, at ikki ber til at kanna eftir rokningar frá Apoteksverkinum, td. við at samanlíkna reseptir við upphæddir á rokningum. Tó kann verða kannað, um fólk eru limir í sjúkrakassanum.

Landsgrannskoðanin hevur fingið avrit av frágreiðingunum um eftirlitsvitjan. Eftirlitið tykist væl skipað.

7.1.2 Samskifti við Almannastovuna

Landsgrannskoðanin kann ikki góðtaka, at so long tíð gongur at fáa svar, tí tað darvar arbeiði okkara. Víst verður til § 20 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum", har tað stendur, at "øll skriv og viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum og roknskapargrannskoðanini viðvíkjandi grannskoðan og gjøgnumgongd av roknskapum skulu verða svarað áðrenn 6 vikur, um longri freist ikki verður sett."

Í hesum málinum hevur tað tíverri eyðkent samskiftið ímillum Landsgrannskoðanina og leiðsluna á Almannastovuni, at skriv frá Landsgrannskoðanini ikki eru svarað, og tað er als ikki nøktandi.

[6] Meginfelag Sjúkrakassa Føroya
[7] Tvs. í tingsetuni 2009/10.

Landsgrannskoðanin vendi sær fyrstu ferð til Almannastovuna í januar 2010, og bað um fund. Tá ið vit onki frættu, royndu vit til fánýtis fleiri ferðir gjøgnum teldupost at fáa avtalað fund við Almannastovuna.

Í februar 2010 bóðu vit um avrit av øllum viðkomandi skjølum í sambandi við avrokningina av studningi til sjúkrakassarnar fyri 2009. Vit bóðu eisini um avrit av frágreiðingum um grannskoðan av sjúkrakassunum fyri 2009, sum Almannastovan smb. § 35, stk. 7, í sjúkratryggingarlógin skal gera, og øll viðkomandi skjøl í hesum sambandi.

Aftaná fleiri áminningarskriv fekk Landsgrannskoðanin í juli 2010 tilfarið frá Almannastovuni. Landsgrannskoðanin hevði sostatt bíðað í nærum 6 mánaðir at fáa útflýggjað tilfar frá Almannastovuni.

7.1.3 Heilsutrygd (LG 2009/211-0202)

Sambært lógini um Heilsutrygd, Ll. nr. 178/2009, vanta enn nógvar reglur, sum landsstýrismaðurin skal áseta.

Sum nevnt frammanfyri, kom Ll. nr. 178/2009 “um almenna heilsutrygd” í gildi 1. januar 2010. Í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin kann ella skal áseta fleiri reglur í kunngerð. Bert tríggjar kunngerðir eru lýstar.

Í oktober 2010 spurdu vit landsstýrismannin, nær hann fer at gera vantandi kunngerðirnar. Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Heilsumálaráðið arbeiðir støðugt við at gera kunngerðir sambært Heilsutrygdarlógini, og væntandi verður komið á mál við hesum arbeiði í 2011. Fyri at røkka málinum, eru kunngerðirnar raðfestar.

Talan verður um umleið 18 kunngerðir. Tríggjar eru avgreiddar, og tvær verða lýstar í næstum:

- kunngerð um tilskotsnevnd og,
- kunngerð um ískoyti til hjálparráð.

Arbeitt verður eisini við fleiri kunngerðum í sambandi við samráðingar við yrkisfeløg. Viðvíkjandi Ergoterapeutfelagnum er kunngerð gjørd, ið verður lýst í næstum. Í sambandi við samráðingarnar við felagið Føroyskir Sálarfrøðingar verður eisini ein kunngerð gjørd og lýst seinni í ár. Sama er galdandi fyri kunngerð um ískoyti til viðgerð hjá fótterapeuti, har miðað verður ímóti at gera skipanina so smidliga sum gjørligt, so tað slepst undan óneyðugum skrivstovuveldi.

Aðrar kunngerðir sambært § 8 í lógini vera lýstar, so hvørt sum samráðingarnar verða lidnar.

Kunngerð um ískoyti at keypa brillur er komin væl áleiðis. Ætlanin er at broyta skipanina, so einans ung undir 18 ár fáa ískoyti. Á hendan hátt fer ískoytið veruliga at gera mun hjá teimum, sum fáa ískoyti, so serliga barnafamiljur koma at merkja ískoytið.

Arbeiðið at gera kunngerð um ávísing til serlækna er byrjað. Í tí sambandi eru nakrar prinsippavgerðir, ið skulu takast, men væntandi verður kunngerðin liðug í hesum árinum.

Kunngerð um virkið hjá samstarvsnevndini verður væntandi liðug fyrst í komandi ári, tá ið Heilsumálaráðið hevur fingið nakrar sáttmálar lidnar, og samstarvsnevndin veruliga fer til verka.

Kunngerðirnar um stuðul til tolk og ferðaútreiðslur vera væntandi lýstar í desember 2010 ella fyrst í 2011.

7.2 Ílegusavnið (LG 2009/211-0202)

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at roknskaparhaldið hjá ílegusavninum er væl skipað.

Í 2010 grannskoðaði Landsgrannskoðanin Ílegusavnið við støði í einum spurnablaði um roknskapar-, lønar-, KT- og onnur viðurskifti, sum vit frammanundan høvdu sent stovninum.

Endamál, virksemi og uppgávur hjá Ílegusavninum eru orðaðar í Ll. nr. 62/2005 “um gransking í mannaílegum”. Harumframt hevur Ílegusavnið í november 2009 latið Heilsumálaráðnum uppskot til mál- og avrikssáttmála.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið var í holt við at viðgera tey uppskot til sáttmálar um mál og avrik, ið ráðið hevði fingið, men ráðið var ikki enn komið á mál við hesum arbeiðinum.

Roknskaparviðurskifti oa.

Roknskaparreglugerðin er frá mai 2009 og er góðkend av Heilsumálaráðnum í mai 2010.

Ílegusavnið hevur eina journalskipan, nevnd Info Organizer, og eitt dagført ognaryvirlit.

Stakroyndir av lønarútgjaldingum

Landsgrannskoðanin kannaði lønarútgjaldingar við stakroyndum, har vit samanhildu setanarskrivini, prógvini oa. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

KT-viðurskifti

Ílegusavnið hevur tríggjar skráir um hendi:

- Ættarbandsskráin,
- Diagnosuskráin, og
- Vevnaðarskráin.

Sambært Ll. nr. 62/2005 hevur stovnurin heimild at útvega sær viðkomandi upplýsingar, sum eru skrásettir hjá Landsfólkayvirlitinum og í skjalatilfari hjá Landsskjalasavninum.

Til november 2008 hevði Ílegusavnið avtalu við KT-eindina í Almanna- og Heilsumálaráðnum um, at KT-eindin ma. veitir stovninum atgongd til alnetið. Síðani er avtala gjørd við KT-fyrisitingina/Landsnet, sum eisini umsitur øll trygdartiltøk.

Inntøkur

Sambært § 3, stk. 3, í Ll. 62/2005 *"skal Landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, hvørjar treytir skulu vera í sáttmálum um gransking, ma. um menning av føroyskari gransking, um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, gjald fyri tær veitingar og upplýsingar, sum Ílegusavnið gevur atgongd til, og part av møguligum inntøkum, sum kanningarúrslit hava við sær."* Reglurnar eru ikki ásettar.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið hevur samskift við Ílegusavnið, og Ílegusavnið hevur greitt frá, at virksemið higartil hevur verið á royndarstigi í einari menningartilgongd.

Ílegusavnið hevur mælt til, at skrivligar mannagongdir og kunngerðir, í sambandi við inntøkur, verða settar sum eitt av málunum um mál og avrik. Heilsumálaráðið hevur tikið tað til eftirtektar, nú ráðið fer at viðgera mál- og avrikssáttmálan fyri 2010.

8 Almannamál

8.1 Hjálpartólamiðstøðin (LG 2009/212-0211)

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað Hjálpartólamiðstøðina. Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Endamál, virksemi og uppgávur

Hjálpartólamiðstøðin hevur í løgtingsfíggjarlógini játtan, 7,2 mió.kr., á høvuðskontu 12.21.1.07. Endamál, virksemi og uppgávur stovnsins eru orðaðar og lýstar í fíggjarlógini.

Hjálpartólamiðstøðin hevur í eykajáttanarlógini í mai 2010 fingið játtaðar 250 t.kr. til inntøkufíggjað virksemi, og 200 t.kr. til vanligt virksemi.

Í oktober 2010 hevur Hjálpartólamiðstøðin greitt frá, at nýggja virksemið, at leiga hjálpartól út til almennar stovnar, verður skipað sambært rundskrivi nr. 2 frá 26. mai 2010 frá Almannamálaráðnum "um leiguskipan hjá Hjálpartólamiðstøðini".

Sjálvstøðugt stovnsnummar er stovnað til raksturin av leiguskipanini. Verandi tól verða nýtt til virksemið. Eru tólini áður brúkt í sambandi við virksemi sambært § 18 í forsorgarlógini, verða tey ikki keypt til leiguvirksemið, men verða leiga út uttan millumrokning millum stovnsnumrini. Eru tólini tøk á Hjálpartólamiðstøðini, men verða ikki brúkt sambært forsorgarlógini § 18, verða tey "keypt" frá vanligu rakstrarjáttanini til leiguvirksemið (millumrokning). Eru tólini ikki tøk á Hjálpartólamiðstøðini, verða tey keypt frá veitara til leiguvirksemið. Vegleiðingar verða gjørdar til starvsfólkini,ið lýsa arbeiðsgongdirnar.

Teldutøka goymsluskipanin hjá Hjálpartólamiðstøðini verður útbygd til at kunna handfara leigu av hjálpartólum. Væntandi verður útbyggingin liðug síðst í oktober 2010, og fer eftir ætlan at virka í november 2010.

Leiðarin kunnaði um, at leiguskipanin í høvuðsheitum er ætlað almennum stovnum, almennum myndugleikum og til feriulán. Feriulán er lán til persónar, sum í styttri tíðarskeið eru í Føroyum og vitja, og sum hava tørv á hjálpartólum. Feriulán kunnu eisini vera til føroyingar, sum ikki eru fevndir av ásetingunum í § 18b í forsorgarlógini, og sum í styttri tíðarskeið hava tørv á hjálpartólum í sambandi við frítíð ella ferðing.

Roknskaparviðurskifti oa.

Hjálpartólamiðstøðin hevur eina Roknskaparreglugerð. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tørvur er á at dagføra reglugerðina.

Lønarumsiting

Umsitingin av lønum hjá Hjálpartólamiðstøðini liggur á Almannastovuni. Lønaravroknningar verða sendar Almannastovuni at avgreiða.

Hjálpartólamiðstøðin hevur skrivligar reglur, tá ið fólk verða sett í starv. Setanarreglurnar eru tær somu, sum Løgmansskrivstovan hevur orðað sum setanarpolitikk landsins.

Starvsfólkini á Hjálpartólamiðstøðini arbeiða flextíð. Tímarnir verða skrásettir í TotalView. Skrásett verður, tá ið starvsfólkini koma til arbeiðis, og tá ið farið verður frá arbeiði. Skrásett verður ikki hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Stakroyndir av lønum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum grannskoðað lønarútgjaldingina fyri september 2009 hjá trimum starvsfólkum. Landsgrannskoðanin hevur biðið Hjálpartólamiðstøðina um skjalprógv, sum kunnu sanna, at rættir lønarsatsir eru nýttir, og skjøl, sum vísa, at formligu viðurskiftini viðvíkjandi setanunum eru røtt. Samanumtikið var onki at finnast at.

Kassaeftirlit

Hjálpartólamiðstøðin hevur forskotskassa, sum er skrásettur í landsbókhaldinum. Eftirlitsdagin í juli 2010 gjørdu vit kassan upp. Onki var at finnast at.

Goymslueftirlit

Hjálpartólamiðstøðin goymir og umsitur hjálpartól, sum eru keypt sambært § 18 í forsorgarlógini.

Í 2005 broytti Hjálpartólamiðstøðin goymsluskipan, og fór frá C5 til Navision. Skrásetingin av goymsluni verður nú gjørd soleiðis, at lutir, sum eru nógv í umferð, og nýggir lutir, verða skrásettir við seriunummari, sum verður lisið inn við strikukotu. Á henda hátt verður goymsluskrásetingin neyvari, við tað at td. koyristólur, púta og beinstuðlar fáa hvør sítt seriunummar, og tí verða allir lutir skrásettir. Ikki allir lutir á goymsluni eru skrásettir við seriunummari.

Landsgrannskoðanin hevur í juli 2010 við stakroyndum gjørt goymslueftirlit á stovninum. Goymsluteljingin vísti, at av teimum 18 stakroyndunum, vóru 11 vørunummur, har ósamsvar var millum goymsluyvirlitið og upptaldu nøgdina.

Leiðarin á Hjálpartólamiðstøðini sigur, at tey eru greið yvir, at goymsluyvirlitið er ófullfíggjað. Tey ætla at telja goymsluna upp og dagføra hana fyri árslok 2010.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri umførum umrøtt goymsluviðurskiftini hjá Hjálpartólamiðstøðini, seinast í frágreiðingini fyri fíggjarárið 2006, har mælt varð til at samstarva við Heimatænastuna (Heimarøktina) fyri at fáa skrásett hjálpartól, ið eru lænt út.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvat hent er í málinum, og hvussu støðan er við atlitið at skráseta hjálpartól, sum eru lænt út fyri 2002.

Hjálpartólamiðstøðin hevur í oktober 2010 svarað, at støðan er óbroytt. Hjálpartólamiðstøðin ger onki við at skráseta tól, ið eru farin til viðskiftafólk, áðrenn skrásetingarskipanin fekst at virka. Hildið verður, at so long tíð er fráliðin, at flestu tólini longu eru afturkomin og skrásett í skipanini. Orkan, sum skal til fyri at gera hetta arbeiðið, stendur ikki mát við virðið á teimum tólum, sum møguliga enn ikki eru komin aftur, og sum tí kunnu avskrivast.

Journalviðurskifti

Hjálpartólamiðstøðin hevur serstakan journalbólk í journalskipanini hjá Almannastovuni. Skjøl, sum Hjálpartólamiðstøðin nýtir í sambandi við virksemi undir § 18 í forsorgarlógini, verða skrásett í einum journalbólki fyri seg.

Hvør hending verður skrásett sum eitt mál. Hvør persónur kann hava fleiri mál. Við at skráseta á henda hátt heldur leiðslan á Hjálpartólamiðstøðini, at tey fáa betri hagtøl, sum kunnu nýtast sum stýringaramboð.

Hjálpartólamiðstøðin hevur ikki skrivligar mannagongdir fyri journaliseringina, men hevur vegleiðingar, sum eru yvirlit yvir, hvat hvør undirbólkur í journalini er roknaður til.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at skrivligar reglur verða gjørdar um journalisering.

Upplýsingar og KT-viðurskifti

Hjálpartólamiðstøðin fær viðkvæmar persónsupplýsingar av ymiskum slag, sum liður í málsviðgerðini av umsóknum um hjálpartól. Upplýsingarnar verða skrásettar í journal-skipanini.

Heimaarbeiðspláss

Hjálpartólamiðstøðin kemur, sum deild undir Almannastovuni, undir reglugerðina fyri heimaarbeiðspláss, internet nýtslu og teldupostnýtslu, sum Almannastovan hevur orðað og sett í verk.

Leiðarin á Hjálpartólamiðstøðini hevur, sum hin einasti, atgongd til stovnsnetið heimanífrá. Starvsfólkini hava atgongd til teldupost.

Umbygging og uppíbygging

Hjálpartólamiðstøðin kann, sum liður í virksemi sínum, rinda fyri umbygging og uppíbygging í sambandi við umsóknir um hjálpartól. Metingarnar, sum eru grundarlag undir játtanini, verða gjørdar av sakkønum fólki. Hjálpartólamiðstøðin hevur í høvuðsheitum brúkt Landsverk og Húsalánsgrunnin sum sakkønar.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard, skal grannskoðanin spyrja, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki.

Leiðarin greiddi frá, at skrivligar mannagongdir eru gjørdar, sum lýsa, hvussu farast skal fram, er illgruni um svik. Skjalið við mannagongdunum liggur á intranetinum hjá Almannastovuni, og er galdandi fyri Hjálpartólamiðstøðina. Leiðarin greiddi frá, at hann ikki hevði varhugan av ella illgruna um svik á stovninum av nøkrum slag.

8.2 Barnavernd (LG 2009/212-0213)

Børn á stovni uttanlands

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað:

- umsitingina av málsviðgerðarreglum sambært § 52 í Ll. nr. 18/2005 “um barnavernd” á skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, og
- mannagongdirnar á Almannamálaráðnum, við atliti at § 33, stk. 3, í barna-verndarlógini, har ásett er, at landsstýrismaðurin kann loyva at seta børn á stovn uttanlands.

Roknskapartøl

Útreiðslur til Barnavernd verða skrásettar á høvuðskontu 12.21.3.01: Barnavernd. Niðanfyri eru tøl úr landsroknskapinum 2007 – 2009:

1.000 kr.

	2007	2008	2009
Barnavernd	3.737	8.067	7.023
Kommunur[8]		-2.049	-1.115
	3.737	6.018	5.908

Stovnsplássini í Danmark kosta frá 670 t.kr. til 1.500 t.kr. árliga, fyri hvørt barnið. Afturat hesum eru eisini útreiðslur til lummapengar, ferðakostnað oa.

Umsiting

Bæði kommunurnar og landið hava umsitingina av barnaverndini um hendi.

Kommunurnar

Kommunurnar umsita og rinda kostnaðin av barnaverndarnevndum og barnaverndar-umsitingum, sum bera felagsheitið barnaverndartænastur.

Kommunurnar hava í felag stovnað Barnaverndarstovuna, sum ma. ráðgevur barnaverndartænastunum, umsitur fosturforeldraskipanina og ráðgevur landsstýris-manninum í almannamálum.

Landið

Landið umsitur og rindar kostnaðin av umsitingini hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini hjá Almannastovuni í Tórshavn.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerðir í málum um børn, sum skulu verða flutt úr heimunum. Í nevndini eru 3 limir, sum landsstýrismaðurin í almannamálum velur. Lógin ásetur, at formaðurin skal vera royndur løgfrøðingur, og at hinir nevndarlimirnir skulu vera ein sálarfrøðingur og ein barnasakkønur.

Í § 12, stk. 5, í Barnaverndarlógini er ásett, at nevndarlimirnir fáa løn ella samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur. Landsstýrismaðurin hevur ikki í kunngerð ásett reglur um løn ella samsýning.

Í juni 2007 hevur Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum góðkent:

- *at* formaðurin fær kr. 8.000,- um mánaðin í samsýning,
- *at* nevndarlimir fáa kr. 4.000,- um mánaðin í samsýning,
- *at* varalimir fáa eina samsýning sum er kr. 4.000 til formannin, og kr. 2.000 til hinar limirnar.

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin í september 2010 boðað frá, at hann hevur ongar ætlanir um at áseta samsýningarnar í kunngerð.

Útreiðslur til ókeypis umboðan

Verður eitt barn sett heiman, og foreldramyndugleikin ella barnið, ið hevur fylt 15 ár, ikki hevur givið samtykki, hava foreldrini og barnið rætt til at verða umboðað ókeypis

[8] Kommunurnar rinda brúkaragjald sambært K. nr. 4/2007.

av advokati. Í málum, har samtykki er fingið, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin gera av, at foreldur og børn fáa ókeypis umboðan. Hesar útreiðslur verða skrásettar sum útreiðslur til barnavernd.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerðir í málum viðvíkjandi ókeypis umboðan sambært Barnaverndarlógini. Landið rindar útreiðslurnar til umboðan sambært § 11, stk. 2, í Barnaverndarlógini.

Grannskoðan á skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini

Málsgjøgnumgongd

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið málsgongdina í teimum 8 málunum, har landið í 2009 hevur rindað fyri stovnspláss uttanlands.

Gjøgnumgongdin vísir, at ein long og drúgv málsgongd hevur verið frammanundan, tá ið børn verða sett á stovn uttanlands.

Sambært § 11, stk. 3, leggja barnaverndarnevndirnar málini fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Áðrenn eitt mál verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, fyrireikar Barnaverndarumsitingin málið og leggur eitt tilmæli fyri nevndina.

Við støði í § 52 í Barnaverndarlógini, sum ásetur málsviðgerðarreglur fyri Høvuðsbarnaverndina, kannaðu vit, um:

- hvørt barnið hevði eitt mál/sak,
- tilmæli, frágreiðingar, upplýsingar, skjøl, ætlanir oa. vóru í øllum málum,
- samtykki var fingið sambært § 48,
- frágreiðingar og skjøl eisini vóru til Almannamálaráðið, har mælt varð til stovnsuppihald uttanlands, tí onki tilboð var í Føroyum,
- játtan frá Almannamálaráðnum eisini lá í øllum málum, har ráðið boðaði Høvuðsbarnaverndini frá, at landsstýrismaðurin hevði játtað/góðkent fyriskipanina.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin umsitingina vera trygga, og hevur onki at finnast at.

Uppalingarískoyti

Við heimild í K. nr. 85 frá 8. september 2007 “um uppalingarískoyti”, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin áleggja foreldrum eitt gjald í sambandi við umsorganaryvirtøku av barni teirra. Er barnið sett á stovn hjá landinum ella á annan stovn, har landið ber útreiðslurnar, er tað landið, ið hevur rættin til uppalingarískoytið.

Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð, at uppalingarískoyti er kravt frá foreldrum, har barnið er sett á stovn uttanlands, og vit bóðu tí skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini um gjøllari frágreiðing.

Frágreiðing frá skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini

Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini greiddi í juli 2010 frá, at sambært § 1, stk. 2, í K. nr. 85/2007, skal barnaverndarnevndin leggja tilmæli fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina um ásetan av uppalingarískoyti.

Í 2007 og 2008 fekk skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini onki tilmæli frá barnaverndarnevndunum, at foreldur ella børn skuldu verða áløgd at gjalda uppalingarískoyti.

Skrivstovan ásannar, at verður spurningurin um uppalingarískoyti ikki viðgjørdur í tilmælinum til Høvuðsbarnaverndarnevndina, ella er onki prógv til skjals fyri inntøku-grundarlagnum, eigur skrivstovan, um hon ikki sendur málið aftur vegna vantandi upplýsingar, at taka spurningin um uppalingarískoyti upp á einum eftirfylgjandi fundi og rykkja Barnaverndartænastuna eftir tilmæli og skjølum.

Í einum máli í 2009 mælti ein barnaverndarnevnd til, at foreldrunum varð álagt at gjalda uppalingarískoyti. Í tilmælinum stendur, at umsitingin hjá barnaverndarnevndini hevur biðið foreldrini koma við skjalprógvi frá TAKS fyri inntøku teirra. Skrivstovan hevur ikki fingið hesi skjøl.

Tað er Almannastovan, sum skal krevja inn uppalingarískoyti frá teimum foreldrum, sum fáa álagt at gjalda. Mannagongdin fyri innkrevjingini er ikki komin uppá pláss, og onki er kravt inn í 2009.

Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini leggur afturat, at tað ikki enn hevur eydnast teimum at skipa eina mannagongd at krevja inn uppalingarískoyti, men tey vilja tryggja, at tað verður gjørt í 2010.

Sum Landsgrannskoðanin dugir at síggja, er onki uppalingarískoyti kravt inn í 2010.

Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini kunnar Almannamálaráðið

Í skrivi í januar 2010 til Almannamálaráðið ger skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndar-nevndini vart við, at kunngerðin er trupul at umsita, tí so nógvir partar eru í málunum:

- Barnaverndartænasturnar biðja foreldrini greiða frá inntøkugrundarlagnum,
- foreldrini ella Barnaverndartænastan skal seta seg í samband við TAKS, fyri at fáa skjalprógvað inntøkugrundarlagið,
- skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini skal kanna, um grundarlag er fyri at áleggja foreldrum at gjalda uppalingarískoyti,
- Veitingardeildin á Almannastovuni skal kanna, um foreldrini fáa veitingar frá Almannastovuni, ið møguliga skulu verða steðgaðar,
- avvarðandi økisdeild á Almannastovuni skal eisini hava boð, skulu tey steðga einari møguligari veiting,
- Fíggjardeildin á Almannastovuni skal krevja peningin inn frá foreldrunum.

Tað hevur víst seg at vera ein tung og kostnaðarmikil leið at fara eftir hesum gjaldinum, sum krevur nógva orku og tíð hjá fleiri deildum. Henda mannagongd er ikki at meta sum ein skjótur, skynsamur ella úrslitagóður leistur, sigur skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur gjørt vart við, at tað er ikki neyðugt, at tey eru partur av spurninginum um uppalingarískoyti. Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur ongan serligan førleika at viðgera slík mál, og tey halda ikki, at hetta er ein spurningur, sum tey skulu taka støðu til.

Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini heitir á Almannamálaráðið at umhugsa ein einfaldari leist, fyri at fáa fatur á uppalingarískoytunum.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ætlanin er at viðgera málið, í sambandi við at barnaverndarlógin verður endurskoðað.

Brúkaragjøld frá kommununum

Barnaverndarøkini rinda brúkaragjald fyri at seta barn á stovn sambært § 69, stk. 2, í barnaverndarlógini. Landsstýrismaðurin hevur ásett neyvari reglur um brúkaragjald í K. nr. 4/2007.

§ 2, stk. 2, í kunngerðini ásetir, at *"tá ið Høvuðsbarnaverndarnevndin setir barn á samdøgursstovn uttanlands, rindar avvarðandi barnaverndarøki til landið, sambært stk. 1".*

Brúkaragjøld verða kravd frá kommununum eina ferð um ársfjórðingin. Almannastovan sendur rokningar til kommunurnar umvegis debitorskipanina hjá Gjaldstovuni. Landsgrannskoðanin hevur kannað og eftirroknað nakrar rokningar.

Landsgrannskoðanin heldur, at umsitingin viðvíkjandi brúkaragjøldum frá kommunum er hóskandi og væl skipað.

Grannskoðan á Almannamálaráðnum

Í § 33, stk. 3, í barnaverndarlógini er ásett, at *"í serligum førum, tá ið talan er um sera trupul børn, ið ikki kunnu fáa nøktandi stovnspláss í Føroyum, kann landsstýrismaðurin loyva, at børn verða sett á stovn uttanlands".* Talan er um børn við ma. álvarsomum atferðartrupulleikum, psykiatriskum diagnosum og fjøltáttaðum trupulleikum, sum krevja námsfrøðiliga/sernámsfrøðiliga, sálarfrøðiliga og/ella medisinska viðgerð.

Landsgrannskoðanin hevur kunnað seg um innanhýsis mannagongdina hjá Almannamálaráðnum, tá ið tilmæli koma frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Landsgrannskoðanin hevur lisið tilmælini til landsstýrismannin. Tíðarbilið, frá tí at tilmælið er skrivað, til málið er avgreitt av landsstýrismanninum, er stutt, bert nakrir dagar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, at mannagongdir tryggja, at ongi børn verða sett á stovn uttanlands, uttan við loyvi frá landsstýrismanninum. Vit hava onki at finnast at.

Landsgrannskoðanin ivast tó í, um landsstýrismaðurin veruliga hevur nakað val, tá ið hann skal taka støðu til loyvið at senda børn á stovn uttanlands.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at í sambandi við, at barnaverndarlógin verður endurskoðað, fer mannagongdin í sambandi við § 33, stk. 3, at verða viðgjørd.

Sambært § 84 í barnaverndarlógini skal landsstýrismaðurin fyri 31. desember 2010 leggja frágreiðing fyri Løgtingið, hvørt lógin virkar eftir ætlan, herímillum um broytingar skulu verða gjørdar.

8.3 Meginskrivstovan fyri Nærverkið (LG 2009/212-0216)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2008 umrøddu vit í einum broti grannskoðan av Meginskrivstovuni fyri Nærverkið.

Roknskaparreglugerð

Meginskrivstovan hevur eina roknskaparreglugerð frá mars 2006, ið er send Almannamálaráðnum at góðkenna. Ráðið hevur ikki enn góðkent reglugerðina.

Í september 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið í november 2008 hevði fingið uppskot frá Nærverkinum um roknskaparreglugerð fyri bústovnar undir Trivnaðartænastuni. Sambært Nærverkinum skuldu roknskaparreglugerðir verða gjørdar fyri aðrar stovnar eftir sama leisti. Almannamálaráðið hevði ikki endaliga viðgjørt uppskotið, men fór at avgreiða málið skjótast til ber.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Nærverkið í mai 2010 varð biðið um at dagføra roknskaparreglugerðina, av tí at viðurskifti vóru broytt, sum ávirkaðu hana, ss. at elektronisk góðkenningarskipan var sett í verk.

Sambært landsstýrismanninum hevði Nærverkið ikki havt orku at dagføra roknskaparreglugerðina, men væntandi fór ein dagførd reglugerð at verða send til góðkenningar um ársskiftið 2010/11.

KT-viðurskifti

Í juli 2005 sendi Meginskrivstovan Dátueftirlitinum ”umsókn um góðkenning av telduskráum (visitatiónsskipanin)”. Í stuttum skrivi 31. august 2005 svaraði Dátueftirlitið soleiðis: *“Sagt skal vera frá, at Dátueftirlitið hevur móttikið umsókn tygara. Vegna stóra arbeiðsbyrðu og starvsfólkatal á 1,25 ber ikki til at siga, nær umsóknin verður viðgjørd”*.

Í august 2007 greiddi Nærverkið frá, at tey høvdu ikki mint Dátueftirlitið á málið. KT-leiðarin, ið skuldi byrja í starvi hjá Nærverkinum 1. september 2007, skuldi ma. arbeiða við KT-trygd.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at av tí at skipanin er so gomul og ótíðarhóskandi, er Nærverkið í holt við at dagføra Visitatiónsskipanina. Nærverkið hevur tí ikki mint Dátueftirlitið á málið, men fer at skriva eina nýggja umsókn til Dátueftirlitið í sambandi við dagførdu skipanina.

8.4 Føroyingar á stovni í Danmark (LG 2009/212-0216)

Endurgjald av pensjónum

Í fleiri ár eru næstan ongi krøv viðvíkjandi endurgjaldi av pensjónum goldin. Socialministeriet í Danmark hevur ikki sett reglur í kunngerð, og tí ivast Landsgrannskoðanin í, um donsku kommunurnar hava nakað rættarligt krav til endurgjald.

Landsstýrismaðurin heldur hinvegin, at danskar kommunur hava eitt rættarligt krav um at fáa pensjónina endurgoldna. Tó fyrnast kravið eftir vanligum fyrningarreglum.

Sambært viðmerkingunum til "Lov nr. 315 af 17. maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne" endurrindar landskassin donskum kommunum pensjónsútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark. Landið hevur endurrindað hesar útreiðslur síðani 1995. Talan hevur verið um 10 fólk, hóast eini 25 - 30 fólk hava verið á stovni í Danmark hesi árini. Árligu endurgjaldsútreiðslurnar hava ligið um 1 mió.kr.

Árini 2007 - 2009 vórðu bert rindaðar um 100 - 200 t.kr. hvørt árið. Higartil í 2010 er onki goldið út. Allarhelst hevur strukturreformurin í Danmark havt við sær, at kravið um endurgjald fyri pensjónir onkursvegna er "gloymt" í donsku kommununum.

Í august 2009 boðaði Nærverkið frá, at tey høvdu kunnað Almannamálaráðið um, at tað kann fáa álvarsamar fylgjur fyri Nærverkið (landskassan), fara donsku kommunurnar at krevja endurgjald afturvirkandi, td. fyri 5 ár, fyri allar 25 brúkararnar í senn. Hetta endurgjald kann blíva 20 – 25 mió.kr.

Í § 54 í "Lov nr. 217 af 16. maj 1984 om social pension" við seinni broytingum hevur Socialministeren ma. heimild til at áseta reglur um "afholdelse af udgifter til pension efter denne lov til personer, der på foranledning af færøske sociale myndigheder får ophold i Danmark". Reglurnar eru ikki ásettar.

Eftirsum Socialministeriet ikki í kunngerð hevur sett nakrar reglur, ivast Landsgrannskoðanin í, um donsku kommunurnar hava nakað rættarligt krav til endurgjald av pensjónum, og í september 2009 settu vit landstýrismanninum spurningin.

Í november 2009 helt landsstýrismaðurin, at hóast reglur ikki eru ásettar í danskari kunngerð, hava danskar kommunur eitt rættarligt krav um at fáa pensjón endurgoldna. Føroyskir myndugleikar hava medábyrgd av, at pensjónisturin býr í Danmark, tískil mugu føroyskir myndugleikar halda tær útreiðslur, sum standast av pensjónini. Harafturat hava danskar kommunur fingið útreiðslur til pensjón endurgoldnar í fleiri ár.

Landsstýrismaðurin vísir á, at kravið fyrnast eftir vanligum fyrningarreglum. Landsstýrismaðurin heldur, at samlaða kravið frá donskum kommunum kann ikki verða hægri enn um 2,5 mió.kr. árliga fyri 10 persónar – tvs. 12,5 mió.kr. fyri 5 ár.

8.5 Forsorgarútreiðslur (LG 2009/212-0217)

8.5.1 Hjálp sambært §§ 9 og 13 í forsorgarlógini

Grundupphæddin í uppihaldshjálpini sambært § 9, og varandi veitingin sambært § 13 í forsorgarlógini, er ikki hækkað síðani 1. februar 1999, og hevur tí ikki fylgt við prísvøkstrinum.

Eftir øllum at døma hevur landsstýrismaðurin ongar ætlanir um at javna upphæddina, sum skal nøkta grundleggjandi tørvin til uppihald sambært §§ 9 og 13 í forsorgarlógini.

Sambært § 9 í forsorgarlógini kann fyribilshjálp vanliga í mesta lagi svara til grundupphæddina í fólkapensjónini. Grundupphæddin skal røkka til útreiðslur til mat, klæði, sjálvrøkt, reingerð, telesamskifti, bløð ot. Grundupphæddin í fólkapensjónini hevur ikki verið javnað síðani 1999, og hevur tí ikki fylgt við prísvøkstrinum.

Samlaði stuðulin kann ikki fara upp um ta upphædd, sum verður goldin út til persónar, ið fáa dagpening eftir hægsta satsi, og sum ikki hava aðra inntøku.

Samlaði stuðulin, ið verður goldin í sambandi við vantandi arbeiðsmøguleikar, kann ikki vera hægri enn 75 % av lønini eftir galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, og viðkomandi skal ikki hava aðra inntøku.

Sambært § 13 verður varandi hjálp veitt við einari upphædd, ið svarar til fólkapensjónina (grundupphædd og viðbót) hjá pensjónisti uttan aðra inntøku.

Í øllum førunum verður ískoyti veitt fyri hvørt barn, svarandi til barnaviðbótina eftir løgtingslóg um almannapensjónir.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at av tí at grundupphæddin til fólkapensjón ikki longur varð javnað, var neyvan rætt framhaldandi at nýta hana til at áseta eina upphædd, ið skuldi nøkta grundleggjandi tørvin til uppihald sambært forsorgarlógini. Landsstýrismaðurin umhugsaði tí at broyta lógina.

Í september 2006 og í oktober 2008 boðaði landsstýrismaðurin frá, at framvegis var ætlanin at fremja lógarbroytingina í § 9 í forsorgarlógini. Ætlanin var at nýta grundupphæddina til fyritíðarpensjón, sum útrokningargrundarlag í staðin fyri grundupphæddina til fólkapensjón. Við broytingini skuldi trygd verið fyri, at upphæddin fór at verða javnað á hvørjum ári.

Í september 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið var farið í holt við at endurskoða §§ 9 og 13 í forsorgarlógini. Arbeiðið skuldi verða liðugt á heysti 2010.

30. september 2010 hevur landsstýrismaðurin lagt fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Árliga javningin verður sett til 0%, galdandi frá 1. januar 2011.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið merkir tað, at persónur, sum fær almenna veiting, í framtíðini fer at fáa tað sama, sum hann hevur fingið í 2010.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eftir ætlan fer arbeiðið at endurskoða §§ 9 og 13 í forsorgarlógini í gongd í 2011.

8.5.2 Stuðul til mista arbeiðsinntøku smb. § 17 í forsorgarlógini

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at umsitingin hevði stutta tíð at laga seg til broytingarnar. Tað, saman við gomlum vegleiðingum og øðrum umstøðum, er helst ein orsøk til úrslitið av stakroyndunum.

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað útreiðslur til endurgjald fyri inntøkumiss.

Endamálið við grannskoðanini er at kunna okkum um umsitingina, eftir at kunngerð nr. 94/2009 "um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku" varð lýst 24. juni 2009.

Roknskapartøl

Útreiðslurnar til endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17 eru skrásettar í Búskaparskipan landsins á stovnsnummari 124604: "vanlig forsorg, meirútreiðslur, brekað barn § 17" (ein útgreining á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkonta 04.) Roknskapartølini 2002 til 2009 síggjast á talvuni niðanfyri:

1.000 kr.

Ár	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009
Upphædd	6.271	6.207	6.502	9.132	9.240	10.021	11.239	11.387

Talvan vísir, at útreiðslurnar eru øktar 82% tíðarskeiðið 2002 til 2009. Almannastovan hevur eisini víst á, at talið á teimum, sum søkja um endurgjald fyri inntøkumiss, er økt 100 % tíðarskeiðið 2002 - 2009.

Lógargrundarlag oa.

Í frágreiðingunum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin víst á, at landsstýrismaðurin hevur ikki gjørt reglur um endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17 í forsorgarlógini. Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), sum varð samtykt 18. mai 2004, heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at áseta reglurnar sum skjótast.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í 2002 og aftur í 2005 gjørdi Landsgrannskoðanin vart við, at útrokningin av mistari arbeiðsinntøku tyktist tilvildarlig, og vísti Landsgrannskoðanin á dømir.

Við Ll. nr. 82/2003 "um broyting í lóg um almenna forsorg" varð heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur fyri útreiðslum til ávísar viðgerðir, og endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17 í forsorgarlógini. 24. juni 2009 varð kunngerð "um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku" lýst.

Vegleiðingar og rokniørk

Í februar 2010 fekk Landsgrannskoðanin tríggjar vegleiðingar um "endurgjald fyri inntøkumiss" frá desember 2009, og tvey rokniørk, sum Almannastovan nýtir til at rokna út endurgjaldið.

Almannastovan hevur kunnað um, at skattaútrokningarnar verða gjørdar í einum forriti hjá TAKS. Skatturin verður síðani innlisin manuelt í ein teig í rokniarkinum, sum roknar út arbeiðsmarknaðargjøld, frítíðarløn og endurgjaldið.

Í oktober 2010 kunnaði Almannastovan um, at frammanfyri nevndu vegleiðingar og rokniørk ikki vóru grundarlag fyri útgjøldunum í september 2009, ið eru grannskoðað. Orsøkin var, at tíðin, at fyrireika umsitingina til lógarbroytingarnar, var ógvuliga stutt, og vegleiðingarnar og rokniørkini vóru ikki liðug í september mánað. Grundarlagið undir fleiri útgjøldum í september 2009 vóru gomul rokniørk.

Kunngerð nr. 94/2009

24. juni 2009 varð kunngerð "um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku" lýst, við gildi 1. juli 2009.

Deildarleiðarin kunnaði um, at Almannastovan 1. juli 2009 gjøgnumgekk øll mánaðarlig útgjøld størri enn 12 – 13.000 kr. Fleiri broytingar vórðu gjørdar, og allar flytingar til eftirlønir vórðu steðgaðar.

Niðanfyri er ein samandráttur av samskiftinum við Almannastovuna um ásetingarnar í kunngerðini:

Persónsskari (§ 1)

Sambært Almannastovuni eru tað í fyrsta lagi skrásetingarnar í Landsfólkayvirlitinum, ið tryggja, at bert persónar, ið eru fevndir av § 1, fáa endurgjald. Síðani staðfestir læknin í skrivligari váttan støðuna hjá tí ávísa persóninum, og Almannastovan tosar altíð við umsøkjaran, aloftast á einari heimavitjan. Harumframt kennir Almannastovan ofta frammanundan viðurskiftini hjá nógvum familjum.

Treytir (§ 3)

Sambært § 3 í kunngerðini verður endurgjaldið játtað fyri í mesta lagi eitt ár í senn, og persónar skulu søkja um endurgjald hvørt ár. Landsgrannskoðanin hevur heft seg við, at tá ið umsókn at leingja tíðarskeiðið fyri endurgjaldi kemur inn, verður verandi gjald ofta goldið út uttan nýggja útrokning.

Almannastovan hevur kunnað um, at nú verða nýggjar útrokningar gjørdar, tá ið inntøkugrundarlagið skal dagførast og tá ið broytingar henda í skattaútrokningum oa.

Endurgjaldið (§ 4)

Sambært § 17, stk. 3, í forsorgarlógini og § 4, stk. 1, í K. nr. 94/2009 kann inntøkugrundarlagið í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin, íroknað frítíðarløn og møguliga arbeiðsinntøku, sum viðkomandi framhaldandi hevur. Endurgjaldið er ein nettoveitan, ið verður ásett við støði í inntøkugrundarlagnum, men frároknað landsskatt, kommunuskatt og arbeiðsmarknaðargjøld.

Harumframt verða útreiðslur, sum viðkomandi sparir við ikki longur at arbeiða, drignar frá útgjaldinum; dømi er um spardar útreiðslur fyri barnaansing. Í 2010 verður veruligi kostnaðurin av barnaansing mótroknaður. Ongar aðrar spardar útreiðslur verða mótroknaðar í endurgjaldinum fyri inntøkumiss.

Vit spurdu, hvussu Almannastovan heldur skil á, nær eitt útgjald skal verða steðgað. Almannastovan greiddi frá, at játtanartíðarskeiðið verður tøppað í VFS[9]-skipanina, og tá ið játtanartíðarskeiðið er lokið, steðgar útgjaldið sjálvvirkandi.

[9] VFS-skipanin er ein málsviðgerðar- og útgjaldsskipan

Vit spurdu, hví nýggj útrokning ikki verður gjørd, tá ið endurgjaldstíðarskeiðið verður longt. Almannastovan greiddi frá, at tá ið talan er um at leingja verandi játtan, verður vanliga ikki gjørd nýggj útrokning.

Í mai og juni mánaði verður frítíðarløn eisini mótroknað í útgjaldinum. Harumframt verður onnur inntøka mótroknað, sum ikki er í inntøkugrundarlagnum.

Almannastovan greiddi frá, at tey kanna inntøkurnar hvønn mánað í lønarskipanini hjá TAKS, og er onnur inntøka, verður hon mótroknað. Onki skjalprógv er fyri, at tey hava kannað, um umsøkjarin hevur fingið aðra inntøku.

§ 4, stk. 3, í kunngerðini ásetur, at hædd verður ikki tikin fyri serligum frádráttum og skattafyrimunum. Sambært stk. 4 rindar Almannastovan heldur ikki longur fyri arbeiðsgevaragoldna eftirløn.

Frítíðarlønin verður sambært stk. 6 roknað og drigin frá hvørjum útgjaldi. Frítíðarlønin verður síðani skrásett í einum forriti. Henda mannagongd skal tryggja, at frítíðarløn verður goldin út 2. mai á hvørjum ári.

Inntøkugrundarlagið (§ 5)

Almannastovan greiddi frá, at váttan frá arbeiðsgevara er altíð til skjals. Tað er ikki bara váttanin frá arbeiðsgevaranum, sum er avgerandi fyri, hvussu stórt endurgjald Almannastovan rindar, váttanin skal eisini lýsa arbeiðs- og setanarviðurskiftini hjá umsøkjaranum.

Sambært Almannastovuni hava starvsfólk atgongd til lønarskrásetingar í skipanunum hjá TAKS, og tær skrásetingar eru avgerandi fyri ásetingina av inntøkugrundarlagnum. Høvuðsreglan er, at vísa skrásetingarnar í skráunum hjá TAKS, at ongin veruligur inntøkumissur er, verður onki endurgjald goldið út.

Sambært Almannastovuni er størsti trupulleikin hjá umsitingini at áseta inntøkugrundarlagið. Summir umsøkjarar kunnu hava verið á arbeiðsmarknaðinum fulla tíð ella niðursetta tíð, aðrir hava tørv á endurgjaldi av og á, aftur aðrir umsøkjarar eru ongantíð komnir út á arbeiðsmarknaðin. Ásetingarnar í stk. 1 (væntaða mista arbeiðsinntøkan) og stk. 2 (móttikna miðal mánaðarliga A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar fyri fráveruna) kunnu verða tulkaðar ósamsvarandi. Almannastovan brúkar sum meginreglu ásetingina í stk. 2, og eru broytingar í arbeiðs- og setanarviðurskiftunum, undantaksregluna í stk. 3.

Onnur eftirlit við útgjøldum

Vit hava kunnað okkum um umsitingina, hvørjar mannagongdir og hvørji innaneftirlit tryggja, at útgjøldini eru røtt, ma. við samrøðum og stakroyndum.

Almannastovan hevur greitt frá, at málsviðgerar/ráðgevar hava heimild at játta og ávísa gjøld. Deildarleiðarin skal góðkenna, hava eftirlit við og leysgeva útgjaldingarnar. Ein dagslisti verður skrivaður út fyri hvørja útgjalding. Deildarleiðarin skal kanna dagslistan. Ein kekklisti við 5 eftirlitsmálum er gjørdur til kanningina/eftirlitið, men hann verður ikki brúktur. Deildarleiðarin áteknar sjálvan dagslistan, og sambært Almannastovuni merkir átekningin, at somu eftirlit eru framd, sum ásett eru í kekklistanum.

Landsgrannskoðanin heldur, at ein tílíkur kekklisti er eitt gott amboð hjá leiðsluni, at skjalfesta, at eftirlitini eru framd sum ætlað. Leiðslan brúkar úrslitið frá eftirlitinum, sum grundarlag at góðkenna roknskapin. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at kekklistin verður brúktur sum ætlað.

Umframt útgjaldingareftirlit hava deildarleiðararnir skyldu, eina ferð um mánaðin, at gera eitt deildareftirlit við 5 stakroyndum fyri at tryggja dygdina av málsviðgerðini. Til endamálið er eitt skjal gjørt "Deildareftirlit stakroynd", sum ásetir, hvørji eftirlit deildarleiðarin skal gera. Steðgur kom í at gera deildareftirlit, men í mai 2010 er arbeiðið tikið uppaftur.

Stakroyndir

Vit hava valt út 15 persónar, sum hava fingið endurgjald fyri inntøkumiss í september 2009. Í stakroyndunum hava vit ma. kannað um:

1. skrivlig umsókn er um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku,
2. frágreiðing finst frá serlækna,
3. váttan frá arbeiðsgevara um setanarviðurskifti (har tað er neyðugt),
4. inntøkumissurin er veruligur,
5. inntøka, sum kemur afturat í umsóknartíðarskeiðinum, verður mótroknað,
6. skrivlig avgerð um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku finst,
7. inntøkugrundarlagið er rætt ásett,
8. endurgjaldið fyri mista inntøku er rætt roknað,
9. spardar útreiðslur verða drignar frá endurgjaldinum, og
10. málsviðgerðin er skjalfest í málinum.

Úrslit av stakroyndunum

Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av stakroyndunum.

Skrivlig umsókn er um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku (1)

Í málunum, sum vit hava kannað, eru umsóknir í 14 av 15 málum. Fleiri umsóknir eru gamlar, dømi er um tvær umsóknir frá 1999 og ein frá 2000.

Almannastovan hevur síðani viðmerkt, at tað ikki er ein treyt, at ein formlig umsókn fyriliggur.

Frágreiðing finst frá serlækna (2)

Í øllum málum eru læknaváttanir.

Váttan frá arbeiðsgevara um setanarviðurskifti (har tað er neyðugt) (3)

Har tað ber til, er váttan frá arbeiðsgevara um lønarviðurskifti.

Inntøkumissurin er veruligur (4)

Umsøkjarar hava allir mist inntøku av at verið heima og ansa barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku.

Inntøka, sum kemur afturat í umsóknartíðarskeiðinum, verður mótroknað (5)

Dømi eru um, at ikki altíð verður mótroknað, tá ið umsøkjari fær aðra inntøku, sum ikki er í inntøkugrundarlagnum. Almannastovan kannar hvønn mánað, men kanningarnar eru ikki skjalfestar.

Almannastovan hevur í oktober 2010 kunnað um, at fær umsøkjarin inntøku í sama tíðarskeiði, sum endurgjald verður rindað, eigur hon sum høvuðsregla at verða mótroknað. Er inntøkan ikki mótroknað, eigur tað at ganga fram av uppritinum, at støða er tikin til ikki at mótrokna.

Almannastovan gjørdi á vári 2010 av, at upplýsingarnar frá TAKS skulu verða skrivaðar út hvønn mánað, tá ið inntøkuviðurskiftini verða kannað.

Skrivlig avgerð um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku finst (6)

Í 14 av 15 málum finnast skrivligar avgerðir um at játta inntøkumiss. Í einum máli er ein útrokning send umsøkjaranum.

Almannastovan hevur síðani kunnað um, at tey hava gjørt av, at avrit av útrokningini av endurgjaldinum altíð skal verða send umsøkjaranum saman við avgerðini.

Inntøkugrundarlagið er rætt ásett (7)

Inntøkugrundarlagið tykist vera rætt, tá ið talan er um nýggj mál, men tá ið talan er um gomul mál, har útgjaldið verður longt uttan nýggja útrokning, er ivasamt, um inntøkugrundarlagið er rætt.

Dømi er um, at endurgjaldið ikki er broytt síðani 2000. Eitt annað endurgjald í 2009 er roknað við støði í inntøkuni 2002. Hetta er galdandi fyri játtanir, sum verða longdar uttan nýggja útrokning.

Almannastovan hevur í oktober 2010 kunnað um, at tá ið útrokningin av endurgjaldi ikki hevur verið dagført, hongur tað óivað saman við vantandi regluverki, sum var áðrenn nýggju kunngerðina.

Almannastovan hevur nú umroknað øll verandi mál í mun til vanligar lønarhækkingar, skattaprosent, faktisk gjøld til barnaansing osfr. Eisini verða málini í framtíðini tikin upp árliga og sett til áminningar, í mun til spardu ansingarútreiðsluna, tá ið barnið fyllir 3 ár, 7 ár og 9-10 ár.

Endurgjaldið fyri mista inntøku er rætt roknað (8)

Endurgjaldið er rætt roknað út frá inntøkugrundarlagnum í 14 av 15 málum. Ikki er altíð greitt, hvussu arbeiðsmarknaðargjøld verða roknað. Í einum máli tykist útrokningin ikki at vera røtt. Vit hava ikki sæð, um útrokningarnar verða roknaðar eftir av øðrum persóni, fyri at tryggja at feilir ikki eru.

Ymiskt er, hvussu frítíðarløn verður umsitin. Tey, sum fáa fast mánaðarligt endurgjald, fáa eins gjald allar mánaðir, meðan tey, sum fáa leyst endurgjald, ella fáa endurgjald í styttri tíðarskeið, fáa 12 % í frítíðarpeningi í mai. Hetta er neyvan í tráð við § 4, stk. 6, í kunngerðini, sum sigur, at endurgjaldið verður frároknað frítíðarløn, sum verður goldin út 1. mai. Frítíðarlønin er munurin millum endurgjaldið sambært § 2 og endurgjaldið sambært stk. 2 býtt við 1,12.

Almannastovan hevur síðani kunnað um, at hetta er ein avleiðing av, at málini, sum eru kannað, eru viðgjørd áðrenn nýggja kunngerðin kom í gildi, t.e. tá ið ongar reglur vóru fyri hesum. Allar frítíðarlønir skuldu nú verið rætt roknaðar út og útgoldnar rættstundis.

Nakrar økisdeildir hava mannagongdir at rokna eftir útrokningarnar av endurgjaldi. Almannastovan hevur nú gjørt av, at allar økisdeildir í framtíðini skulu fylgja somu mannagongdum.

Spardar útreiðslur verða drignar frá endurgjaldinum (9)

Aðrar spardar útreiðslur, enn spardar útreiðslur fyri barnaansing, verða ikki drignar frá endurgjaldinum. Almannastovan brúkar ymiskar upphæddir at rokna sparda barnaansing.

Almannastovan hevur greitt frá, at spard ansing verður trekt frá í øllum málum, har talan er um sparing. Talan er ikki um eins upphæddir, tí grundarlagið er ymiskt í kommununum.

Málsviðgerðin er skjalfest í málinum (10)

Málsviðgerðin er skjalfest í uppritum í málunum.

Aðrar viðmerkingar

Almannastovan hevur kunnað um, at endurgjaldið fyri inntøkumiss verður ikki regulerað, um tað vísir seg, at inntøkugrundarlagið ikki er rætt. Farið verður ikki aftur í tíðina at gjalda út ella at krevja inn. Landsgrannskoðanin helt, at tað í øllum førum eigur at verða gjørd ein nýggj útrokning, tá ið eitt tíðarskeið er lokið, fyri at tryggja, at endurgjaldið er rætt. Dømi eru um, at lønartalvur frá 2003 framvegis verða brúktar sum grundarlag fyri endurgjaldi fyri inntøkumiss í september 2009.

Almannastovan hevur síðani kunnað um, at tey hava eftirroknað endurgjøldini eitt ár aftur í tíðina og goldið út eftirgjald, har ov lítið hevur verið goldið út. Almannastovan hevur ikki kravt ov nógv útgoldið endurgjald inn, tá ið talan hevur verið um umsitingarligar villur.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Almannastovan kannar, hvussu nógv “gomul mál” eru, har útrokningargrundarlagið stavar frá eldri árum, og at Almannastovan roknar endurgjaldið út av nýggjum. Almannastovan hevur síðani kunnað um, at øll mál eru eftirroknað á sumri 2010, aftaná felags átak á øllum økisdeildum.

Almannastovan kunnaði eisini um, at tey hava lagt eina ætlan at gjøgnumganga og endurskoða allar innanhýsis vegleiðingarnar á heysti 2010. Byrjað verður á teimum økjum, sum nú eru reglusett við lógarbroytingum, nýggjum kunngerðum og vegleiðingum, t.e. §§ 17 og 18b í forsorgarlógini. Hetta fyri at tryggja einsháttaða og rætta málsviðgerð.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at umsitingin hevði stutta tíð at laga seg til broytingarnar. Tað, saman við gomlum vegleiðingum oø. umstøðum, er helst ein orsøk til úrslitið av stakroyndunum. Landsgrannskoðanin heldur tað vera eitt stig á leiðini at tryggja einsháttaða og rætta málsviðgerð, at leiðslan málrættað bøtir um innaneftirlitið, málsviðgerðina og vegleiðingarnar.

8.5.3 Stuðul til útreiðslur til ávísar viðgerðir smb. § 17 í forsorgarlógini

Landsgrannskoðanin hevur í 2010 grannskoðað stuðulin til útreiðslur til ávísar viðgerðir hjá børnum.

Lógargrundarlag

Forsorgarlógin § 17 heimilar persónum, sum heima uppihalda einum barni við fysiskum ella psykiskum sjúkum, endurgjald fyri:

- neyðugar meirútreiðslur, og
- útreiðslur til ávísar viðgerðir.

Neyðugar meirútreiðslur

Landsgrannskoðanin hevur áður fingið flýggjað út leiðbeining nr. F-17-1, meirútreiðslur, § 17, stk. 1, sum er galdandi frá 1. januar 2007. Sambært Almannastovuni er henda leiðbeining framvegis galdandi. Leiðbeiningin greinar ma., hvørjar meirútreiðslur Almannastovan rindar fyri.

Broytingar í forsorgarlógini 1. apríl 2010

Broytingin í lógini um almenna forsorg og nýggja lógin um heilsutrygd, sum komu í gildi 1. apríl 2010, hava við sær, at stuðul til heilivág og stuðul til ávís hjálparráð í framtíðini fara at verða veitt av Heilsutrygd, og ikki eftir §§ 17 og 18 í forsorgarlógini. Almannastovan hevur tí frá 1. august 2010 bert heimild at rinda stuðul til útreiðslur til viðgerðir, har avtala er gjørd við Heilsutrygd. Henda broyting er sambært kunngerð nr. 44/2009 “um stuðul til ávísar viðgerðir til børn sambært forsorgarlógini”.

Útreiðslur til ávísar viðgerðir

Kunngerð nr. 44/2009 er frá 6. mai 2009, og kom í gildi dagin eftir, at hon varð kunngjørd, tó skuldi § 5, stk. 3, ikki fáa gildi fyrr enn 1. januar 2010. § 5, stk. 3, ásetur, at stuðul til viðgerðir sambært stk. 1 og 2 bert verður veittur, um viðgerðin er fevnd av avtalu við sjúkrakassa.

23. november 2009 varð kunngerðin broytt. Ásetingin í § 5, stk. 3, skuldi nú koma í gildi 1. august 2010 (K. nr. 143/2009). Sambært skrivligum svari til fyrispurning eftir tingskipanini § 52a, nr. 28/2009, segði landsstýrismaðurin, at gildiskoman varð útsett, so at betri stundir vórðu at fáa møguligar avtalur við Heilsutrygd í rættlag.

Vegleiðing frá Almannamálaráðnum

Almannamálaráðið gjørdi 12. mai 2009 “Vegleiðing til kunngerð um stuðul til ávísar viðgerðir sbrt. § 17, stk. 1”. Vegleiðingin greinar neyvari treytirnar fyri at fáa stuðul til viðgerðir, hvat viðgerð er ot.

Roknskapartøl

Útreiðslurnar til “stuðul til útreiðslur til ávísar viðgerðir til børn”, sambært forsorgarlógini § 17, eru skrásettar í Búskaparskipan landsins á stovnsnummar 124604: “vanlig forsorg, meirútreiðslur, brekað barn § 17” (partur av høvuðskontu 12.21.7.01, undirkonta 04). Roknskapartølini árini 2002 til 2009 síggjast á talvuni niðanfyri:

1.000 kr.

Útgreining/Ár	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009
Tilsamans	8.086	8.449	9.610	11.294	11.239	13.440	17.086	17.036

Talvan vísir, at útreiðslurnar eru meira enn tvífaldaðar árini 2002 til 2009. Serliga útreiðslur til heilivág og aðrar sjúkraútreiðslur eru øktar nógv. Útreiðslur til endurgjald fyri inntøkumiss verða eisini bókaðar á stovnsnummarið, men tølini eru ikki við í talvuni frammanfyri.

Innaneftirlit oa.

Vit hava kunnað okkum um umsitingina, hvørjar mannagongdir og hvørji innaneftirlit tryggja, at útgjøldini eru røtt.

Stuðulin verður umsitin á deildunum hjá Almannastovuni kring landið. Ávísar skipanarligar avmarkingar eru, hvussu/nær málsviðgerar, deildarleiðarar oo. kunnu gjalda út stuðul.

Almannastovan hevur í oktober 2010 greitt frá, at málsviðgerar/ráðgevar hava heimild at játta og ávísa stuðulin. Deildarleiðarar skulu góðkenna, hava eftirlit við og leysgeva útgjaldingar. Ein dagslisti verður skrivaður út áðrenn hvørja útgjalding. Deildarleiðarin skal kanna dagslistan. Ein kekklisti við 5 eftirlitsmálum er gjørdur til kanningina/eftirlitið, men hann verður ikki brúktur. Sjálvur dagslistin verður áteknaður av deildarleiðaranum, og sambært Almannastovuni merkir átekningin, at somu eftirlit eru framd, sum ásett eru í kekklistanum. Leiðslan brúkar úrslitið av eftirlitinum sum grundarlag at góðkenna roknskapin.

Landsgrannskoðanin heldur, at kekklistin hevði verið eitt gott amboð hjá leiðsluni at skjalfesta, at eftirlitini vóru framd, og Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at nevndi kekklisti verður brúktur sum ætlað.

Umframt útgjaldingareftirlit, hava deildarleiðararnir skyldu, eina ferð um mánaðin, at gera eitt deildareftirlit við 5 stakroyndum, fyri at tryggja dygdina av málsviðgerðini. Til endamálið er eitt skjal gjørt “Deildareftirlit stakroynd”, sum ásetir, hvørji eftirlit deildarleiðarin skal gera. Almannastovan byrjaði við deildareftirlitinum í 2008. Steðgur hevur tó verið í síðani mars 2010, men nú er eftirlitið tikið uppaftur.

Stakroyndir

Vit valdu tilvildarliga út 20 persónar, sum í september 2009 hava fingið stuðul til útreiðslur til ávísar viðgerðir. Í stakroyndunum hava vit ma. kannað, um:

1. umsókn og játtan er fyri hvørt útgjald av stuðli,
2. foreldur ella avvarðandi hava áteknað rokningar, sum Almannastovan rindar,
3. tað sæst í málinum, at barnið býr heima og er yngri enn 18 ár,
4. læknaváttan er í málinum, sum td. lýsir sjúkuna/brekið ea.,
5. frágreiðing er frá lækna, sum metir um, hvussu leingi tørvur er á stuðli,
6. viðgerðin ikki kann verða goldin sambært aðrari lóggávu,
7. málsviðgerðin er skjalfest í málinum,
8. endurgjaldið svarar til meirútreiðsluna/útreiðsluna,
9. uppfylging er av málinum, og
10. tíðarskeiðið fyri játtanina.

Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av stakroyndunum.

Úrslit av stakroyndunum:

Stakroyndirnar av útgjaldingunum av stuðli til ávísar útreiðslur sambært forsorgarlógini vísa, at umsøkjarar, sum í heiminum uppihalda brekaðum børnum, fáa ta viðgerð og tey hjálparráð til børnini, sum søkt verður um, og sum lækni mælir til. Vit hava ikki kannað avvístar umsóknir.

Harumframt hava vit hesar viðmerkingar:

Umsókn og játtan er fyri hvørt útgjald av stuðli (1)

Flestu umsóknir eru á standardoyðubløðum. Læknaváttanir, sum mæla til viðgerð, ella til at leingja eina verandi viðgerð, eins og váttanir frá optikara og kostráðgeva, verða eisini roknaðar sum umsóknir. Eisini eru játtanir í málunum. Almannastovan hevur greitt frá, at tað eigur at verða skjalfest í málinum, at søkt verður um eina veiting. Málsviðgerin hevur skyldu at lýsa málið væl, og at heinta inn vantandi upplýsingar.

Foreldur ella avvarðandi hava áteknað rokningar, sum Almannastovan rindar (2)

Rokningar, sum eru sendar Almannastovuni, eru ikki áteknaðar av foreldrum ella avvarðandi. Almannastovan hevur ikki tryggjað sær, at barnið hevur fingið viðgerðina, sum Almannastovan hevur játtað, og sum goldið verður fyri.

Almannastovan hevur kunnað um, at tey hava “strammað upp” tá ið tað snýr seg um at vátta/átekna, at ein viðgerð er fingin ella framd. Komið er ikki á mál enn.

Tað sæst í málinum, at barnið býr heima og er yngri enn 18 ár (3)

Ongin umsøkjari er spurdur, um barnið býr heima, heldur ikki eru føði- ella navnabrøv í málunum, sum skjalprógva aldurin á barninum.

Almannastovan hevur kunnað um, at tey halda upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum vera nóg góðar, og saman við ítøkiliga og stóra kunnleikanum hjá málsviðgerunum til familjurnar og børnini, ber illa til at fara skeivur av upplýsingunum.

Læknaváttan er í málinum, sum td. lýsir sjúkuna/brekið ea. (4)

Váttanir frá lækna, optikara ella kostráðgeva eru í øllum málunum.

Frágreiðing er frá lækna, sum metir um, hvussu leingi tørvur er á stuðli (5)

Ongar frágreiðingar eru frá lækna, sum meta um, hvussu leingi tørvur er á stuðli, ella um viðgerðirnar gera nakran mun fyri barnið.

Almannastovan ásannar, at krøvini til frágreiðingar frá lækna ikki hava verið nóg neyv. Í sambandi við nýggju kunngerðina hevur Almannastovan gjørt eina standardáheitan til læknar. Tá ið arbeiðsgongdin er komin í eina fasta legu, roknar Almannastovan við, at læknaliga grundarlagið verður nøktandi.

Viðgerðin ikki kann verða goldin sambært aðrari lóggávu (6)

Í tilfarinum sæst ikki, at Almannastovan hevur kannað, um viðgerðin kann verða goldin sambært aðrari lóggávu.

Almannastovan greiðir frá, at talan er um viðgerðir, sum eru framdar í psykiatriskum ella sernámsfrøðiligum høpi, og viðgerðir, sum fáa stuðul frá Heilsutrygd, har Almannastovan endurrindar egingjaldið.

Málsviðgerðin er skjalfest í málinum (7)

Almannastovan skrásetir málsgongdina í uppritum.

Endurgjaldið svarar til meirútreiðsluna/útreiðsluna (8)

Endurgjaldið svarar til útreiðsluna, uttan í einum máli.

Uppfylging er av málinum (9)

Vit hava ikki sæð, at málini verða fylgd upp. Hetta er ikki í tráð við vegleiðingina um ikki at sleppa málum, fyrr enn tey eru avgreidd

Almannastovan sigur, at sambandið við familjurnar er ofta og regluligt, har fylgt verður við familjunum. Ongin reglulig (árlig) skipað uppfylging er. Í nógvum førum er tað ein spurningur um tøka starvsfólkaorku á Almannastovuni.

Tíðarskeiðið fyri játtanina (10)

Í játtanarskrivum sæst ikki altíð, hvussu nógvir tímar/viðgerðir eru játtaðar, ella hvussu leingi ein játtan er galdandi.

Almannastovan sigur, at játtanarskrivini verða endurskoðað í næstum við atliti at tølum á viðgerðum, tíðarskeiði fyri viðgerðir, játtanartíðarskeiði oa.

Tilmæli

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at vegleiðingarnar verða dagførdar, so tær samsvara við umsitingina og lóggávuna.

Almannastovan hevur eftirsíðan kunnað um, at á heysti 2010 er ætlanin at gjøgnumganga og endurskoða allar innanhýsis vegleiðingar á forsorgarøkinum. Byrjað verður við § 17 og §18b. Endurskoðan av umsóknarbløðum og játtanarskrivum er partur av ætlanini.

8.5.4 Kontering av forsorgarveitingum

Í 20 ár hevur Landsgrannskoðanin til fánýtis víst á, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, helst tí at ongin konteringarleiðbeining finst. Hóast fleiri ætlanir, er onki hent.

Skiftandi landsstýrismenn hava í áravís boðað frá, at konteringarleiðbeiningin væntandi fór at verða liðug innanfyri stutta tíð. Hóast nógvar ætlanir, er ikki komið á mál.

Í uppskotum til samtyktar hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir heitt á landsstýrismannin um at tryggja, at viðurskiftini komu í rættlag sum skjótast.

Í september 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið at gera konteringarleiðbeining oa. fyri forsorgarveitingar á Almannastovuni var knýtt at nýggju KT-heildarskipanini. Hetta arbeiði var seinkað, og torført var at siga neyvt, nær arbeiðið fór at verða liðugt.

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at parturin av KT-heildarskipanini, sum viðvíkti forsorgarøkinum, var ætlaður at verða liðugur í desember 2010, og arbeiðið at gera konteringarleiðbeining skuldi eftir ætlan verða liðugt fyri tað.

Í oktober 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við KT-heildarskipanini dregur út, og parturin av KT-heildarskipanini, sum viðvíkur forsorgarøkinum, fer væntandi at verða liðugur á heysti 2011. Arbeiðið við konteringarleiðbeining verður væntandi liðugt um somu tíð.

8.5.5 Reglur um endurbúgving oa.

Í uppskotum til samtyktar at góðkenna landsroknskapin hava Løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett neyvari reglur fyri endurbúgving oø. sambært § 18, stk. 1-5, í forsorgarlógini.

Reglurnar eru framvegis ikki ásettar.

20 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð heitti á Landsstýrið um at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurbúgving oa.:

- Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir ferð eftir ferð átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett reglurnar á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.
- Landsgrannskoðanin hevur í fleiri frágreiðingum víst á nógv ivamál viðvíkjandi umsitingini á Almannastovuni av endurbúgving, og hevur víst á, at ein orsøk til ivamálini er, at reglur vanta.
- Trivnaðarnevndin helt eisini í oktober 2007, at tað ikki var nøktandi, at ongar neyvari reglur vóru ásettar um endurbúgving. Nevndin vísti á, at tað skapti iva um rættarstøðu borgarans.
- Føroya Kærustovnur hevur í ársfrágreiðingum sínum seinastu árini víst á, at tað er serliga átrokandi at fáa ásett reglur viðvíkjandi endurbúgving. Kærustovnurin vísir á, at kærumál á økinum eru serstakliga ring at eftirkanna, tí at ongar reglur finnast, og tí er Almannastovan eisini í stóran mun noydd til at áseta innanhýsis reglur, fyri yvirhøvur sjálv at kunna umsita lógirnar.
- Løgtingsins Umboðsmaður heitti eisini í juli 2008 á landsstýrismannin, at áseta meira útgreinaðar reglur á endurbúgvingarøkinum.

Í september 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at eitt av fremstu málunum hjá landsstýrismanninum var at virka fyri, at arbeiðsmarknaðurin verður rúmligari, og í hesum sambandi var ætlanin at endurskoða og fáa ásett greiðari reglur fyri skipanum av týdningi fyri rúmliga arbeiðsmarknaðinum, herundir skipanini fyri endurbúgving og vardum størvum. Arbeiðið var liður í at endurskoða forsorgarlógina. Ætlanin var at fara undir hetta arbeiðið á heysti 2009, og skuldi tað vera liðugt á heysti í 2010.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at gongd er sett á arbeiðið at endurskoða skipanina við endurbúgving og vardum størvum smb. §§ 18 og 18a í forsorgarlógini. Eftir ætlan verður uppskot hesum viðvíkjandi sent til hoyringar í desember 2010.

8.6 Vantandi dagføring av forsorgarlógini (LG 2009/212-0217)

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggáva fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan fyri stutta tíð.

Ábøtur eru framdar í verandi forsorgarlóg, men enn er onki lógaruppskot um nýggja forsorgarlóg lagt fyri Løgtingið.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne". Talan er um rammulóg, sum áleggur/heimilar heimastýrinum at lóggeva á almannaøkinum. Sambært rammulógini verða gomlu donsku almannalógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1995 varð ma. avtalað, at nýggj almannalóggáva skuldi verða løgd fyri Løgtingið í 1996/97. Í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998 vórðu tíðarfreistirnar broyttar.

Síðani hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggáva fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan fyri stutta tíð:

- Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin legði fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis í apríl 1999, varð ma. kunnað um, at uppskot til nýggj forsorgarlóg fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti sama ár.
- Í desember 1999 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at seta alt árið 2000 av til at gera nýggja forsorgarlóg.
- Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at orka var ikki í løtuni til at fara í gongd við at gera nýggja forsorgarlóg.
- Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2003 varð játtanin hækkað 500 t.kr. at nýta til at gera nýggja forsorgarlóg.
- Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2004 og 2005 var fyrireikingararbeiðið til eina nýggja forsorgarlóg byrjað.
- Í svari sínum 26. januar 2005 til fyrispurning "viðvíkjandi skiftisupphædd hjá fyritíðarpensjónistum, javning og øðrum" (Lm. nr. 100-17/2004) segði landsstýrismaðurin ma., at arbeiðið at gera eina nýggja forsorgarlóg var farið í gongd.
- Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at gera nýggja forsorgarlóg. Hildið varð, at arbeiðið fór at taka 3 ár.
- Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2008 verður Løgtingið ma. kunnað um, at landsstýrismaðurin hevði framhaldandi ætlanir um at gera nýggja forsorgarlóg.

Í september 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann á landsstýrisfundi í desember 2008 hevði fingið undirtøku fyri at fara undir arbeiðið at gera eina nýggja forsorgarlóg.

Leisturin var í høvuðsheitum at fylla út verandi heimildir fyri kunngerðum í forsorgarlógini, og at endurskoða tilknýttar lógarásetingar stigvíst. Endurskoðan av tilboðum til børn við breki var skipað í sjálvstøðuga verkætlan, og somuleiðis var arbeiðið at endurskoða tilboð til eldri og til fólk við breki skipað í sjálvstøðuga verkætlan.

Verkætlanin um nýggja forsorgarlóg, sum farið var undir at fremja, snúði seg sambært landsstýrismanninum um at endurskoða hesar sosialu veitingar í forsorgarlógini:

- Fyribils og varandi peningahjálp (§§ 9 og 13)
- Hjálp í serligum føri (§ 15)
- Meirútreiðslur, viðgerðir, inntøkumissur (§ 17)
- Hjálparráð, bilar og bústaðarbroytingar (§ 18, stk. 7, § 18 b og § 18 c)
- Endurbúgving og vard størv (§ 18, stk. 1-6, § 18a)

Landsstýrismaðurin vísti á, at nakrar ábøtur vóru tó longu framdar í verandi forsorgarlóg í 2009. Nýggjar kunngerðir um stuðul til ávísar viðgerðir, og um endurgjald fyri mista inntøku smb. § 17, stk. 1 og 3, vórðu lýstar í 2009.

Í september 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at verkætlanin at endurskoða skipanina við hjálparráðum er liðug:

- Løgtingið samtykti í desember 2009 nýggja § 18b í forsorgarlógini um hjálparráð, við gildiskomu 1. apríl 2010, og
- 1. apríl 2010 kom eisini nýggj kunngerð um hjálparráð í gildi.

Harumframt eru tvær nýggjar vegleiðingar og eitt rundskriv sett í gildi:

- vegleiðing frá 1. apríl 2010 til kunngerð um hjálparráð,
- vegleiðing frá 1. apríl 2010 til ásetingar um markamót smb. § 18, stk. 5 og 6 um hjálparráð í forsorgarlógini og smb. §§ 7 og 8 í kunngerð um stuðul til hjálparráð, og
- rundskriv frá 26. mai 2010 “um leiguskipan hjá Hjálpartólamiðstøðini”.

Gongd er sett á arbeiðið at endurskoða skipanina við endurbúgving og vardum størvum smb. §§ 18 og 18a í forsorgarlógini. Eftir ætlan verður uppskot hesum viðvíkjandi sent til hoyringar í desember 2010.

Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at eftir ætlan fer arbeiðið við at endurskoða §§ 9 og 13 í forsorgarlógini í gongd í 2011.

Landsstýrismaðurin ásannar, at enn er langt á mál í verkætlanunum at endurskoða tilboð til børn við breki, og tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi. Landsstýrismaðurin heldur tað tí ikki vera møguligt, at nýggj løgtingslóg um forsorg verður løgd fyri Løgtingið til várs, í 2011.

9 Uttanríkismál

9.1 Uttanríkisráðið (LG 2009/216-0111)

9.1.1 Roknskaparviðurskifti

Hóast Uttanríkisráðið hevur sett reglur um nýtslu av kredittkortum, verða reglurnar ikki hildnar.

Kredittkort

Í september 2010 grannskoðaði Landsgrannskoðanin Uttanríkisráðið, har vit kannaðu peningastovnskontur og nýtsluna av kredittkortum.

Reglur fyri kortnýtslu

Uttanríkisráðið hevur sett reglur um nýtslu av kredittkortum í roknskaparreglugerðina. Í fylgiskjali 4 í roknskaparreglugerðini hevur Uttanríkisráðið ma. ásett, at:

- í Uttanríkisráðnum eru starvsfólk, ið hava fingið loyvi til at nýta gjaldkort í ávísum førum,
- stovnurin letur gjaldkort til teirra, sum við jøvnum millumbilum gera gjaldingar, ið ikki hóska at gjalda um Búskaparskipan Landsins,
- hvørja ferð gjaldkortið hevur verið brúkt, skal korteigarin geva tí, sum góðkennir útgjøld, neyðugar upplýsingar í sambandi við ávísing av útgjaldinum,
- bæði góðkennarin og korteigarin skulu vátta útgjaldsávísingina (mánaðarligu uppgerðina frá veitaranum av gjaldkortinum),
- um korthavarin ikki nóg væl kann prógva, hvussu útreiðslurnar eru brúktar, hevur bókhaldarin skyldu at boða aðalstjóranum frá hesum viðurskiftum.

Í Rundskrivi 11. november 2009, um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti fyri landsstovnar, hevur Fíggjarmálaráðið ásett nakrar reglur ma. um at keypa um alnetið, í pkt. 4.1, : *"Keyp við gjaldkorti um alnetið kann verða framt, um keypta vøran ella tænastan bara er at fáa um alnetið, ella um keypið verður munandi bíligari/betri um alnetið enn hjá einum "vanligum" veitara.*

Hámark

Í 2008 útvegaði Uttanríkisráðið kredittkort til starvsfólkini. Talan er um 11 Mastercard Business Gold og eitt Mastercard Business Platin. Ráðið hevur veitt trygd fyri nýtsluni við peningastovnskontu. Kassahámarkið er 100.000 kr.

Uppgerðin í juni 2010, fyri nýtslu tíðarskeiðið mars – mai 2010, vísir, at 164.627 kr. eru brúktar av kontuni.

Uppgerðin í juli 2010, fyri kortnýtslu tíðarskeiðið mai – juni 2010, vísir, at 190.749 kr. eru brúktar av kontuni.

1. juli 2010 var saldan á peningastovnskontuni ÷255.386 kr.

Niðurstøðan av kanningini er sostatt, at munandi meira enn kassahámarkið verður brúkt, áðrenn uppgerðirnar fyri kortnýtslu verða sendar Føroya Gjaldstovu.

Eftirlit við kortnýtslu

Uttanríkisráðið hevur Netbanka frá peningastovninum, sum verður brúktur til at hava eftirlit við kredittkortunum.

Landsgrannskoðanin gjørdi ófráboðað eftirlit av kortnýtsluni í september 2010. Vit staðfestu, at onki starvsfólk í Uttanríkisráðnum hevði atgongd til Netbankan.

Sambært Uttanríkisráðnum vóru ongar transaktiónir á kredittkortunum bókaðar síðani hálvan juni 2010, tí at bókhaldarin var farin úr starvi hálvan august. Fyri at spara, hevði Uttanríkisráðið sagt fleiri fólkum úr starvi, harímillum bókhaldaranum, og ístaðin høvdu tey gjørt avtalu við eitt bókhaldsvirki um at taka sær av bókhaldinum.

Meðan Landsgrannskoðanin var í Uttanríkisráðnum, fekk umboðið fyri bókhaldsvirkið atgongd til Netbankan.

Leiðslan hevði onki dagført yvirlit yvir, hvør hevði kort frá Uttanríkisráðnum. Einasti møguleiki fyri at síggja dagført yvirlit yvir korthavararnar var á einari skermmynd á Netbankanum, sum bara umboðið frá bókhaldsvirkinum hevði atgongd til.

Niðurstøðan er, at onki eftirlit hevur verið við kortnýtsluni síðani juni 2010, av tí at bókhaldarin er farin úr starvi, og onki starvsfólk hevur havt atgongd til Netbankan.

Manglandi skjøl

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið kontuútskriftirnar viðvíkjandi kredittkortunum tíðarskeiðið juni – september 2010. Vit staðfestu, at fleiri skjøl manglaðu.

Í kassauppgerð fyri tíðarskeiðið 20. mars – 26. mai 2010, sum fyrisitingarstjórin hevur skrivað undir 26. juni 2010, manglaðu eisini fleiri skjøl. Bókhaldarin hevði gjørt eitt yvirlit yvir, hvørji skjøl manglaðu. 28. juni 2010 skrivar bókhaldarin, at hann hevði rykt fólk eftir kvittanum, men at hann kundi ikki bíða longur, og hevði tí sent uppgerðina til Gjaldstovuna.

Flestu skjølini vóru konterað á standardroknskaparkontu 1420 “umboðan” útgreining 9000 “onnur umboðan”, og viðmerkt var, at skjølini skuldu umbókast, tá ið kvittanirnar vóru komnar, helst í september/oktober.

Niðurstøðan er, at hóast korteigararnir ikki hava latið inn neyðugar upplýsingar, er útgjaldingarumbøn latin Gjaldstovuni, og peningur fluttur á kontuna, sum stendur sum trygd fyri kortnýtsluni. Heldur ikki sæst bókhaldarin at hava boðað aðalstjóranum frá.

Í oktober 2010 hevur Uttanríkisráðið greitt frá, at tey fara at kanna skjølini, sum mangla.

Í roknskaparreglugerðini hjá Uttanríkisráðnum er álagt korteigarunum at geva neyðugar upplýsingar í sambandi við ávísing av útgjaldinum.

Landsgrannskoðanin heldur ikki hesar treytir vera loknar, tá ið bókhaldarin noyðist at rykkja korteigararnar eftir kvittanum, og at hann í fleiri førum ongar kvittanir fær.

Avrokning

Roknskaparreglugerðin hjá Uttanríkisráðnum áleggur bæði korteigaranum og tí, sum góðkennir, at vátta útgjaldsávísingina (mánaðarligu uppgerðina frá veitaranum av gjaldkortinum).

Sambært teimum uppgerðum, sum eru bókaðar í Búskaparskipan Landsins í 2010, eru ongar váttanir frá korthavarunum.

Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum, um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti, skal nýggjur peningur ikki verða settur á kontuna, fyrr enn allar gjaldingar við gjaldkortinum eru avgreiddar og skrásettar í bókhaldinum.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at hendan reglan verður fylgd, tá ið onki er bókað síðani miðjan juni 2010, og kortini framvegis verða brúkt tríggjar mánaðir seinni.

Í oktober 2010 hevur Uttanríkisráðið víst á, at eftir at bókhaldarin varð sagdur úr starvi, var ongin atgongd til Netbankan fyrr enn 22. september 2010, og tí var ikki gjørligt at avrokna fyrr enn tá.

Renta

Sambært kontuútskriftunum fyri kredittkortini, er renta roknað av upphæddunum á øllum kortunum ultimo juni 2010.

Hvat verða kortini brúkt til

Sum áður nevnt, eru reglur í roknskaparreglugerðini hjá Uttanríkisráðnum sum siga, at starvsfólk hava fingið loyvi til at nýta kredittkort í ávísum førum. Rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um gjaldkort og kredittkort nevnir nøkur dømi, hvat kortini kunnu verða nýtt til:

- keyp um alnetið,
- flutningsútreiðslur, sum td. hýruvogn í tænastuørindum her á landi,
- kontantgjald, tá ið pakkar verða tiknir út á posthúsi, til tollrindan ot.
- útreiðslur til frímerkju, og
- onnur smærri daglig keyp, sum vanliga verða goldin í hondina.

Rundskrivið nevnir, at keyp um alnetið kann verða framt, um vøran ella tænastan bara er at fáa um alnetið, ella um keypið verður munandi bíligari/betri um alnetið, enn hjá einum "vanligum" veitara.

Á skjalatilfarinum, sum Landsgrannskoðanin hevur kannað, sæst, at tað er heldur reglan enn undantakið, at gjaldkort verður nýtt td. í sambandi ferðir og umboðan.

Landsgrannskoðanin heldur, at nógvar rokningar áttu at verðið goldnar um Búskaparskipan Landsins.

Í oktober 2010 hevur Uttanríkisráðið greitt frá, at *"orsøkin til at eitt nú ferðaseðlar verða bílagdir og goldnir yvir alnótina er stóri prísmunurin. Tá ið veitarar, sum eitt nú ferðastovur, verða nýttar, verður prísurin munandi hægri, og sostatt verða útreiðslurnar munandi størri. Munurin er somikið stórur, at mett verður skynsamt at nýta alnótina í slíkum føri".*

Góðkenning av mánaðarroknskapum

Leggjast kann afturat, at stovnsleiðarin hevur góðkent mánaðarroknskapin fyri juli 2010 uttan viðmerkingar, hóast nýtslan av kredittkortum ikki er bókað síðani miðjan juni 2010.

9.1.2 Løn til deildarstjórar og sendimenn

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 umrøddi Landsgrannskoðanin í einum broti lønir til deildarstjórar og sendimenn.

Í september 2009 greiddi Uttanríkisráðið frá, at *"Fíggjarmálaráðið hevur góðkent fýra ávís deildarstjórastørv í Uttanríkisráðnum samsvarandi tænastumannalíknandi størvum í 37. lønarflokki fyri deildarstjórar í miðfyrisitingini sambært hjálagda brævi frá 6. februar 2009."*

Uttanríkisráðið kunnaði um, at lønirnar vórðu ásettar samsvarandi tænastumannalíknandi størvum í 37. lønarflokki fyri deildarstjórar í miðfyrisitingini, til endalig góðkenning er fingin til vegar.

Eisini greiddi Uttanríkisráðið frá, at deildarstjórastørvini vórðu ikki lýst leys, tí í tveimum málum var talan um umflytingarmál, ið endurtaka seg triðja hvørt ár, eins og hjá fremmandum uttanríkistænastum. Triðja málið varð avgreitt eftir politiskari avgerð í sambandi við at málsøkjabýtið millum Uttanríkisráðið og Fiskimálaráðið varð samsvarandi endurskoðað.

Í oktober 2009 greiddi Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum frá, at á fundi millum Uttanríkisráðið og Lønardeildina í september 2008 varð gjørt av, at starvsfólkini, sum longu høvdu fingið skriv um, at tey vóru sett sum deildarstjórar í 37. lønarflokki, skuldu hava eina a-konto løn, meðan Lønardeildin arbeiddi við málinum. Tað merkti ikki, at lønin skuldi vera ájavnt 37. lønarflokk, tí tað hevði givið skeivar vónir, og møguleikin at eftirregulera hevði at kalla fallið burtur.

Lønardeildin heldur, at í hesum ítøkiligu førunum, við deildarstjórunum í Uttanríkisráðnum, er talan um somikið stórar broytingar, at størvini áttu at verið lýst leys. Við at verða flutt í deildarstjórastørv fáa hesi starvsfólk økta leiðsluábyrgd, væl hægri løn og hægri tign.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008, sum Løgtingið samtykti 27. mai 2010, mæltu Løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum í uttanríkismálum og landsstýrismanninum í starvsfólkamálum til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Í august 2010 hevur Landsgrannskoðanin spurt landsstýrismannin í uttanríkismálum, hvat er hent í málinum, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur.

Vit fingu ikki svar frá landsstýrismanninum, men í telduposti 21. september 2010 hevur umsitingarstjórin í Uttanríkisráðnum kunnað um, at samskifti er ímillum Uttanríkisráðið og Lønardeildina um málið, og at miðað verður eftir loysn á málinum í næstu framtíð.

Eftirsíðani heittu vit á Uttanríkisráðið um at greiða okkum gjøllari frá, hvat samskiftið millum Uttanríkisráðið og Fíggjarmálaráðið er um, og um so er, at samskiftið er skrivligt, at senda okkum avrit av tí.

Landsgrannskoðanin fekk ikki svar frá landsstýrismanninum í uttanríkismálum, men hevur í oktober 2010 fingið teldupost frá umsitingarstjóranum í Uttanríkisráðnum. Í teldupostinum greiðir umsitingarstjórin frá, at samskifti hevur verið millum aðalstjóran í Uttanríkisráðnum og landsstýrismannin í uttanríkismálum øðrumegin, og aðalstjóran í Fíggjarmálaráðnum og landsstýrismannin í fíggjarmálum hinumegin. Uttanríkisráðið hevur ikki nakað skrivligt av samskiftinum

Uttanríkisráðið væntar, at loysnin á málinum verður, at nýggjur bygnaður verður framdur í Uttanríkisráðnum, og at deildarstjórastørvini verða alment lýst leys at søkja, tá ið bygnaðarbroytingarnar eru klárar at fremja.

Í oktober 2010 hevur Lønardeildin greitt frá, at málið um at flokka deildarleiðarastørvini varð liðugt viðgjørt í november 2009. Niðurstøðan var, at Uttanríkisráðið skuldi lýsa fýra deildarstjórastørv leys at søkja, og størvini skuldu verða flokkað eftirfylgjandi, men at lønin verður um 44 t.kr. um mánaðin umframt 15% í eftirlønargjaldi.

Lønardeildin vísir á, at tað er ein fyrisitingarligur grundsetningur, og er ásett í flestu sáttmálum, at øll størv skulu lýsast leys. Undantøk kunnu vera, tá ið tað snýr seg um fyribilshjálp, vikarar ella frítíðaravloysarar fyri stutt tíðarskeið.

9.1.3 Nevndarsamsýningar

Í frágreiðing okkara til Løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2009 greiddu vit ma. í einum broti frá, at Uttanríkisráðið hevði rindað fasta mánaðarliga fundarsamsýning til formannin í nevndini fyri menningarsamstarv. Samsýningin varð goldin eftir fyribils-góðkenning frá Lønardeildini.

Í august 2009 hevði Uttanríkisráðið greitt frá, at tey í juli 2008 høvdu fingið boð frá Lønardeildini, at Lønardeildin skuldi venda aftur til Uttanríkisráðið við endaligari áseting av samsýningini.

Í oktober 2009 kunnaði Lønardeildin um, at ongin endalig niðurstøða var gjørd víðvíkjandi nevndarsamsýningini, tí Lønardeildin skuldi eftirmeta allar verandi fundarsamsýningar við tí í hyggju, at taka samsýningarnar upp til nýggja meting.

Uttanríkisráðið greiddi í oktober 2009 frá, at tey framvegis bíðaðu eftir endaligu ásetingini hjá Lønardeildini.

Í oktober 2010 hevur Lønardeildin greitt frá, at arbeiðið, at endurskoða og útgreina nevndarsamsýningar sum heild, er ikki liðugt. Tí hevur Lønardeildin ikki endaliga góðkent samsýningina. Uttanríkisráðið hevur tí ikki fingið onnur boð frá lønardeildini enn, at nevndarsamsýningin er fyribils.